# FÓLKASKÚLALÓGIN
# BROYTINGAR

*Tilmæli frá arbeiðsbólki*

2. mai 2023

Fólkaskúlalógin, broytingar – Tilmæli frá arbeiðsbólki
© Barna- og útbúgvingarmálaráðið 2023
Umbrotið og prentað: Føroyaprent
Perma: Ingi Joensen
ISBN: ISBN: 978-99918-3-742-0

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

# Innihaldsyvirlit


1. Formæli . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7

2. Politiskur fylgibólkur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 11

3. Inngangur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 13
   3.1. Tímatalið og skúladagurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 14
   3.2. Floksstødd, tvílæraraskipan og samlæring . . . . . . . . . . . . . . . . . . 15
   3.3. Tíma- og lærugreinabýtið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 16
   3.4. Undirvísing og námsætlanir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 17
   3.5. Kostnaður . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 17
   3.6. Myndugleikabýtið og fígging í fólkaskúlanum . . . . . . . . . . . . . . . . 18

4. Tilmæli, kostnaður og tíðarætlan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 22

5. Arbeiðssetningur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 26

6. Arbeiðsgongd . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 28

7. Hugsjónarliga grundarlagið í fólkaskúlanum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 29

8. KT Førleikar og talgildisbúgving . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 31
   8.1. Tilmæli I – KT og læring . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 32

9. Floksstødd . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 33
   9.1. Floksstødd hevur týdning fyri úrtøkuna hjá næminginum og trivnaðin . . . . 34
   9.2. Ábendingar um meira happing í smærri flokkum . . . . . . . . . . . . . . . 37
   9.3. Niðurstøða . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 37
   9.4. Tilmæli II. Floksstødd . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 38
   9.5. Flokkatal, stødd og kostnaður . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 38
   Talva 1. Verandi skipan og játtanargrundarlag . . . . . . . . . . . . . . . . . . 39
   9.6 Kostnaður í mun til flokkatal . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 40
   Talva 2. Kostnaður, tá ið 22 næmingar eru í flokkunum . . . . . . . . . . . . . 40
   Talva 3. Kostnaður, tá ið 20 næmingar eru í flokkunum . . . . . . . . . . . . . 42
   Talva 4. Kostnaður, tá ið 18 næmingar eru í flokkunum . . . . . . . . . . . . . 43
   Talva 5. Samanumtøka, flokkar og kostnaður . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 44

10. Økt flokkatal og hølistørvur í skúlunum kring landið . . . . . . . . . . . . . . . . 45
10.1. Flokkatalið í skúlunum uttan fyri Havnina . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 46
Talva 6. Yvirlit yvir flokkatal í skúlunum uttan fyri Havnina . . . . . . 46
Talva 7. Flokkar og hølistørvur á Skúlatrøð . . . . . . . . . . . . . . . . . . 47
Talva 8. Flokkar og hølistørvur í Fuglafjarðar skúla . . . . . . . . . . . . 47
Talva 9. Flokkar og hølistørvur í Skúlanum í Eysturkommunu . . . . 48
Talva 10. Flokkar og hølistørvur í Skúlanum við Streymin . . . . . . . 48
Talva 11. Flokkar og hølistørvur í Runavíkar kommunuskúla . . . . . 48
Talva 12. Flokkar og hølistørvur í Tofta skúla . . . . . . . . . . . . . . . . . 49
Talva 13. Flokkar og hølistørvur í Vestmanna skúla . . . . . . . . . . . . 49
Talva 14. Flokkar og hølistørvur í í Skúlanum á Giljanesi . . . . . . . . 49
Talva 15. Flokkar og hølistørvur í Tvøroyrar skúla . . . . . . . . . . . . . 50
Talva 16. Flokkar og hølistørvur í Vágs skúla . . . . . . . . . . . . . . . . . 50
Talva 17. Flokkar og hølistørvur í Sørvágs skúla. . . . . . . . . . . . . . . 51
Talva 18. Flokkar og hølistørvur í Stranda skúla. . . . . . . . . . . . . . . 51
Talva 19. Flokkar og hølistørvur í Sandoyar meginskúla . . . . . . . . . 51
Talva 20. Flokkar og hølistørvur í Kollafjarðar skúla. . . . . . . . . . . . 52
Talva 21. Flokkar og hølistørvur í sjeyflokkaðu skúlunum í Tórshavn 52
Talva 22. Flokkar og hølistørvur í Tórshavn, um tað var felags innskriving 52
Talva 23. Flokkar og hølistørvur í Eysturskúlanum . . . . . . . . . . . . 53
Talva 24. Flokkar og hølistørvur í Hoyvíkar skúla . . . . . . . . . . . . . 53
Talva 25. Flokkar og hølistørvur í Sankta Frans skúla. . . . . . . . . . . 53
Talva 26. Flokkar og hølistørvur í Skúlanum á Argjahamri . . . . . . . 54
Talva 27. Flokkar og hølistørvur í Skúlanum á Fløtum . . . . . . . . . . 54
Talva 28. Flokkar og hølistørvur í Skúlanum við Løgmannabreyt . . 54

11. Fjølbroytt læring og arbeiðshættir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 55
11.1. Tilmæli III. Fjølbroyttir arbeiðshættir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 56

12. Eftirútbúgving. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 57
12.1. Nakrar ásetingar í rundskrivinum, sum hava myndað eftirútbúgvingina 58
12.2. Eftirútbúgvingartørvur. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 59
12.3. Tilmæli IV. Raðfesting innan eftirútbúgving og drúgvari skeið . . . . 60
12.4. Kostnaðarmeting . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 60
12.5. Tímaniðurskurður umroknaður til klokkutímar . . . . . . . . . . . . . . . 61
Talva 29. Kostnaður fyri eftirútbúgving, sum er 60 ects,
25 luttakarar og niðurskurður 5t/v . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 62
12.6. Tilmæli V. Eftirútbúgving, skipan og játtan . . . . . . . . . . . . . . . . . . 62

13. Handaverk og list . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 63
13.1. Tilmæli VI. Handverk og list . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 64

14. Námsætlanir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 65
14.1. Tilmæli VII. Námsætlanir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 66

15. Tvílæraraskipan . . . . . . . . . . 67
Talva 30. Galdandi tvílæraraskipan . . . . . . . . . . 68
15.1. Samlæring (Co-teaching) og tvílæraraskipan . . . . . . . . . . 69
Talva 31. Kostnaður at víðka galdandi tvílæraraskipan . . . . . . . . . . 70
15.2. Tvílæraraskipan, tá ið fleiri enn 12 næmingar eru í flokkunum . . . . 71
Talva 32. Dømi um tillagaða tvílæraraskipan . . . . . . . . . . 71
Talva 33. Kostnaður. Tillagað tvílæraraskipan og floksstødd 20 næmingar . . . . . . . . . . 72
15.3. Tilmæli VIII. Tvílæraraskipan og samlæring . . . . . . . . . . 73

16. Játtanarskipan í fólkaskúlanum og skúlastødd . . . . . . . . . . 74
16.1. Grundarlagið undir tímajáttanini . . . . . . . . . .
16.2. Dømi um tímajáttan í miðalstórum sjeyflokkaðum skúla . . . . . . . . 76

17. Flokslæraraskipanin . . . . . . . . . . 78
17.1. Tímajáttan til flokslæraraarbeiðið. . . . . . . . . . 79
17.2. Flokslæraraarbeiðið kostnaður . . . . . . . . . . 79
17.3. Tilmæli IX. Flokslæraraarbeiðið. . . . . . . . . . 79

18. Skúlaárið. . . . . . . . . . 80
18.1. Árliga skúladagatalið í Norðurlondum . . . . . . . . . . 80

19. Lærugreinaskipanin og drúgvi skúladagurin. . . . . . . . . . 83
19.1. Kravdar lærugreinir í 1. - 9. flokki . . . . . . . . . . 84
19.2. Tíma- og lærugreinabýtið í fólkaskúlanum . . . . . . . . . . 84
19.3. Samanberingar . . . . . . . . . . 85
19.4. Samanberingar millum Føroyar og Danmark . . . . . . . . . . 86
19.5. Samanberingar millum Føroyar og Finnland . . . . . . . . . . 88
19.6. OECD frágreiðing 2021. Samanberingar millum Norðurlond. . . . 90
19.7. Tilmæli X og XI. Broytingar í kravda vikutímatalinum . . . . . . . . . . 91

20. Broytingar í tíma- og lærugreinabýtinum . . . . . . . . . . 92
20.1. Alis- og evnafrøði. . . . . . . . . . 93
20.2. Týskt. . . . . . . . . . 93
20.3. Tilmæli XII., XIII og XIV. Broytingar í tíma- og lærugreinabýtinum 95
20.4. Tilmæli XV. Tíma- og lærugreinabýtið í grunddeild 1.-3. flokkur . . 95
20.5. Tilmæli XVI. Tíma- og lærugreinabýtið í miðdeild 4.-6. flokkur . . . 96
20.6. Tilmæli XVII. Tíma- og lærugreinabýtið í hádeild 7.-9. flokkur . . . 97

21. Fíggjarligar samanberingar . . . . . . . . . . 99
21.1. Kostnaður, Føroyska skúlaverkið . . . . . . . . . . 99
Talva 34. Heiti á útbúgvingum á føroyskum og enskum . . . . . . . . . . 99
Talva 35. Eindarkostnaður, fólka- og miðnámsskúlar . . . . . . . . . . 100
Talva 36. Samanberingar, næmingakostnaður í Norðurlondum . . . 100
Talva 37. BTÙ í mun til útbúgving . . . . . . . . . . 101

Talva 38. Almenna nýtslan, ið verður nýtt til útbúgving . . . . . . . . . 101
Talva 39. Almenna nýtslan til útbúgving, greinað eftir útbúgvingarstigi 102
Talva 40. Partur av BTÚ, sum Føroyar nýta til skúlaverkið. . . . . . . 103
21.2. Raðfesting av almennu játtanini til skúlaverkið . . . . . . . . . . . . . . . . 103
21.3. Tilmæli XVIII. BTÚ og hagtøl . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 103

22. Keldulisti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 104

23. Kostnaður og íverksetan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 108

# 1. Formæli

Ásannandi tann stóra týdning, sum fólkaskúlin hevur fyri einstaka næmingin og sum grundarlag undir samfelagsmenningini, tók táverandi landsstýrimaður í Uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana, stig til at taka fólkaskúlalógina til viðgerðar.

Spurningar eru seinastu árini settir við ymisk viðurskifti í fólkaskúlanum m.a., at skúladagurin er ov drúgvur, har víst verður á, at næmingarnir í føroyska fólkaskúlanum hava fleiri undirvísingartímar um vikuna enn í hinum Norðurlondunum, at kreativu lærugreinarnar eiga ov lítið pláss á tímatalvuni, og at fremmandamæltir næmingar ikki hava nøktandi undirvísingartilboð.

Táverandi landsstýrið hevði eisini í samgonguskjalinum mælt til, at tillagingar og dygdargóðar broytingar verða gjørdar í fólkaskúlalógini í samband við floksstødd, serøki og starvsfólkaviðurskifti, at stig verða tikin til at styrkja kreativu og handaligu lærugreinarnar, talgildu førleikarnar og málmenningina, mál- og mentanarundirvísingina hjá næmingum við fremmandum uppruna og at stuðla skrivi- og lesiveikum næmingum, soleiðis at teir kunnu nema sær útbúgving á jøvnum støði við onnur.

Táverandi landsstýrismaður í Uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana, setti í novembur 2021 ein arbeiðsbólk við umboðum frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum, Undirvísingarstýrinum, Námi, Sernámi, Kommunufelagnum, Føroya Lærarafelagi, Skúlaleiðarafelagnum, Fólkaskúlaráðnum, Námsvísindadeildini og Felagnum Heim og skúla at umrøða og gera tilmæli til broytingar við atliti at ávísum viðurskiftum, sum tilskilað eru í arbeiðssetninginum.

Nývaldi landsstýrismaðurin í Barna- og útbúgvingarmálum, Djóni Nólsøe Joensen, heitti á arbeiðsbólkin um at halda fram við arbeiðinum. Hann vísti á, at fleiri av arbeiðsuppgávunum, sum arbeiðsbólkurin arbeiddi við, vóru í samsvari við stevnumiðini hjá nývalda landsstýrinum, sum í samgonguskjalinum viðvíkjandi fólkaskúlaøkinum hevur sett sær sum mál, at skúlin skal menna almenna dannilsið, kveikja skapandi og verkliga lærihugin hjá børnunum, at javnvág skal vera millum hugvísindi,

náttúruvísindi og skapandi læru, at skúlarnir fáa størri frælsi at skipa skúladagin, raðfesta flokslæraraleiklutin, styrkja tvílæraraskipanina í grunddeild, stytta skúladagin, endurskoða lærugreinabýtið og lækka talið av næmingum í hvørjum flokki.

Harumframt ynskir landsstýrið at leggja áherðslu á saman við avvarðandi pørtum at endurskoða karakterstigan, læraraútbúgvingina, førleikamál í námsætlanum, skúlafrítíðina, lands- og pisaroyndir og lærara- og leiðslutíð. Nám skal uppraðfestast, og regluligur eftirútbúgvingarleistur verður skipaður fyri starvsbólkar skúlans. Eisini skal meira gransking verða skipað á skúlaøkinum.

Arbeiðsbólkurin hevur arbeitt við fleiri av hesum økjum, m.a. at javnvág skal vera millum hugvísindi, náttúruvísindi og skapandi læru, at skúlarnir fáa størri frælsi at skipa skúladagin, at flokslæraraleikluturin verður mentur, at styrkja tvílæraraskipanina, at stytta skúladagin, at lækka næmingatalið í flokkunum og at endurskoða lærugreinabýtið, sum eisini er tengt at einum javnari býti millum lærugreinapartarnar.

Arbeiðsbólkurin heldur, at hetta eru grundleggjandi øki, sum neyðug eru at endurskoða fyri at kunna menna fólkaskúlan, so at umstøður verða hjá øllum næmingum bæði at mennast, læra og trívast.

Tey, ið hava mannað arbeiðsbólkin, eru:

Vagn Foldbo, Fólkaskúlaráðið
Janus Vang, Foreldrafelagið Heim og skúli
Janus Haraldsen, Kommunufelagið
Jákup Eli Olsen, Føroya Lærarafelag
Rannvá Joensen, Skúlaleiðarafelagið
Eyðdis Eidesgaard, Undirvísingarstýrið
Eyðun Gaard, Nám

Harriet Hansen, Sernám
Erla Olsen, Námsvísindadeildin
Høgni V. Warberg, fundarskrivari, Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Jenny Lydersen, forkvinna, Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Tórshavn, á krossmessu 2023

| | | |
|---|---|---|
| Vagn Foldbo | Janus Vang | Janus Haraldsen |
| Jacob Eli Olsen | Rannvá Joensen | Eyðun Gaard |
| Eyðdis Eidesgaard | Harriet Hansen | Erla Olsen |
| Høgni Warberg | Jenny Lydersen | |

# 2. Politiskur fylgibólkur

Eisini varð politiskur fylgibólkur settur, umboðandi allar flokkar á tingi, soleiðis at arbeiðsbólkurin ávegis kundi umrøða ætlaðu broytingarnar við umboð fyri politisku flokkarnar og fáa afturmelding og kunning um, hvør politiska hugsanin var viðvíkjandi ymsu økjunum í fólkaskúlanum. Umboðini í politiska fylgibólkinum vóru:

Beinir Johannesen fyri Fólkaflokkin, Bjarni Kárason Petersen fyri Framsókn, Beinta Løwe fyri Tjóðveldi, Jóhannis Joensen fyri Javnaðarflokkin, Edva Jacobsen fyri Sambandsflokkin, Steffan Klein Poulsen fyri Miðflokkin og Óli Sonni Djurhuus fyri Sjálvstýri.

Politiski fylgibólkurin tók í høvuðsheitum undir við arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum og vísti á nøkur sera týðandi viðurskifti, har myndugleikin má seta átøk í verk fyri at geva okkara børnum og ungum ein mennandi skúladag, har næmingarnir ogna sær lívsmót, áræði og fakligar førleikar, og at trivnaður verður eitt mál í øllum virksemi fólkaskúlans. Umrøtt varð m.a.:

- at raðfesta dannilsi
- at raðfesta føroyskt heldur enn danskt
- at varða um, at broytingarnar ikki ávirka støðuna hjá føroyskum
- at styrkja handaverk og list
- at stytta undirvísingarvikuna
- at endurskoða málsligu lærugreinarnar, so vit ikki hava ov nógvar endurtøkur við at greina stuttsøgur í føroyskum, donskum og so aftur í enskum
- at tað verður eitt javnari býti millum náttúruvísindi og hugvísindi
- at raðfesta mentan og samfelag
- at ansa eftir ikki at troytta næmingarnar ov nógv, so tey missa hugin at læra
- at samlaða tímabýtið, tíðin og orkan í skúlanum verður nýtt skynsamt og so skilagott, sum til ber
- at eftirkanna týdningin av pisa royndum
- at veita næmingum lektiuhjálp
- at taka hædd fyri hølisviðurskiftunum og fysisku umstøðunum í sambandi við ætlaðu broytingarnar, so at skúlarnir eru egnaðir til virksemið og

broyttu umstøðurnar, um tað verða fleiri og smærri flokkar. Tað kundi t.d. verið skipað fyri royndarverkætlan í trimum ymiskum skúlum, fyri at finna fram til eina hóskandi skipan

- at hóskandi næmingatal er í flokkunum. Í stórum flokkum er vandi fyri, at ov nógv børn detta niður ímillum og tí fáa tørv á eyka hjálp. Í stórum flokkum er eisini trupult at fáa tíð til einstaka barnið
- at skapa góðar relatiónir, sum eru av alstórum týdningi fyri læring og trivnaðin hjá næmingunum
- at raðfesta likamligu og skapandi læringina
- at tað sum heild er gott at stytta um skúladagin hjá næmingunum
- at virka fyri, at upptøkukrøvini til miðnám ikki skulu stýra fólkaskúlanum
- at kanna, hvussu vit standa okkum sum vaksin víðari í lívinum í mun til okkara grannalond.
- at vit mugu hugsa um endamálið og hugsa okkum væl um, tá ið vit gera íløgur í fólkaskúlan, at undirvísingartilfar er tókt, og at vit ikki fáa ov nógv av tí sama
- at vit skulu vera djørv og minka enn meira um tímarnar, møguliga flyta tímar til grunddeildina, men hetta má endiliga ikki enda sum sparing.

# 3. Inngangur

Arbeiðsbólkurin er á einum máli um, at fólkaskúlin er grundútbúgvingin hjá landsins íbúgvum. Tað er umráðandi, at allir næmingar hava eitt nøktandi grundstøði og vitanarkarm, tá ið teir hava lokið fólkaskúlan. Fólkaskúlin skal búgva næmingarnar til lívið (dannilsi), umframt at geva teimum førleikar til sjálvstøðugt og í felagsskapinum at umhugsa og taka støðu til lívsfatan, siðfrøði og fólkaræði. At búgva næmingarnar til lívið og geva teimum áræði og førleikar at megna avbjóðingar skal hava størri rúmd í skúlanum, so at næmingarnir bæði fakliga, persónliga, menniskjaliga og sosialt ogna sær førleikar til at nema sær útbúgving og arbeiði og at liva og virka í samtíðarinnar samfelagi. Fólkaskúlin skal tí verða eitt endamál í sær sjálvum, har allir næmingar við teirra ymiskleika skulu rúmast, búnast og mennast sum menniskju og sum borgarar í einum fólkaræðisligum samfelagi.

Vit hava sum heild ein góðan fólkaskúla við útbúnum starvsfólkum, men bæði skúlaleiðarar, lærarar og eisini næmingar vísa á, at skúladagurin bæði er ov drúgvur og fakliga stýrdur, og at ov lítið rúm er til fleksibilitet og kreativitet.

Fólkaskúlin hevur eina fleirstreingjaða uppgávu, sum ásett er í endamáli fólkaskúlans[1]. Uppgávan er:

- við atliti at tí einstaka næminginum og í samstarvi við foreldrini at fremja, at næmingarnir nema sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini
- at skapa sovorðin líkindi fyri uppliving, virkishugi og djúphugsan, at næmingarnir kunnu menna sína sannkenning, sítt hugflog og hug til at læra, og at teir kunnu venja síni evni til sjálvstøðuga meting, støðutakan og virkan og búnast í treysti til sín sjálvs og til teir møguleikar, sum eru í felagsskapinum
- í sátt og samvinnu við foreldrini hjálpa til at geva næmingunum eina kristna og siðalagsliga uppaling
- við støði í heimligari mentan menna kunnleika næminganna um

1 § 2 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022

føroyska mentan og hjálpa teimum at fata aðrar mentanir og samspæl manna við náttúruna
– at búgva næmingarnar til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur í einum fólkaræðisligum samfelagi
– at undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði.

Skúlarnir vísa á, at við verandi skipan er sera torført og so at siga ómøguligt at skipa gerandisdag skúlans soleiðis, at endamál skúlans verður rokkið, har fakliga læringin, trivnaður, persónliga menningin og at brynja næmingarnar til lívið eru samskipaðir partar í virksemi skúlans. Vána trivnaður, happing, frávera, skúlamøði og næmingar, ið hava sálarligar avbjóðingar, eru eisini liðir í virkisøki skúlans, sum skúlin skal taka støðu til og loysa saman við foreldrum, skúlamyndugleikum og ráðgevandi stovnum, so møguligt er at veita bæði einstøkum næmingum og flokkum nøktandi hjálp.

Tað er tí sera umráðandi, at fyriskipanir verða settar í verk innan fólkaskúlaøkið, har vit endurskoða okkara skúlaskipan og leggja lunnar undir ein skúladag, har møguleiki er at møta einstaka næminginum og flokkinum, at skipa ein fjølbroyttan skúladag og at skapa trivnað. Arbeiðsbólkurin mælir tí til, at serlig átøk verða gjørd innan hesi øki:
1. at næmingatalið í flokkunum verður lækkað
2. at skylduga undirvísingartímatalið verður lækkað, soleiðis at skúladagurin verður styttur
3. at tvílærara skipanin verður víðkað til at fata um bæði grund- og miðdeild, har dentur verður lagdur á samlæring (CO-teaching)
4. at broytingar verða gjørdar í tíma- og lærugreinabýtinum, so at tað verður eitt javnari býti millum lærugreinapartarnar, og at skúlarnir fáa størri frælsi at leggja tilrættis og
5. at umstøður verða at skipa ein fjølbroyttan skúladag eisini við støði í námsætlanunum.

Skipanin í fólkaskúlanum er, at ábyrgd og fígging eru býtt millum tveir høvuðsmyndugleikar, land og kommunur. Harumframt hava skúlastýri og skúlaleiðari eisini síni ábyrgdarøki, sí punkt 3.6.

### 3.1. Tímatalið og skúladagurin

Sum heild heldur arbeiðsbólkurin, at skúladagurin er ov langur við nógvum bókligum lærugreinum og skiftum, at tað eru ov nógvir tímar í málsligum lærugreinum, har nógv av tí sama gongur aftur sum bókmentagreining og skrivligar framsetingar, og at tað hevði borið til at gjørt ávísa samskipan í málsligu lærugreinunum. Samanborið við hini Norðurlondini, so hava vit í Føroyum fleiri tímar í móðurmálinum og mállærugreinum sum heild, umframt at samlaða tímatalið er væl hægri enn í okkara grannalondum.

Serliga í hádeild er skúladagurin rættiliga drúgvur, har næmingar kunnu hava 37 tímar og fleiri um vikuna, um tey hava valt bæði týskt og alis- og evnafrøði og eina vallærugrein afturat, men sum oftast er ikki rúm fyri áhugaverdum vallærugreinum, tí flestu næmingar vilja tryggja sær bæði týskt og alis- og evnafrøði fyri at fyrireika seg til miðnám. Næmingarnir hava eisini heimaarbeiði og eiga eisini at kunna hava tíð til frítíðarítriv, men við einum so drúgvum skúladegi, so eru tað næmingar, sum lúgvast og ikki megna skúlan og avbjóðingarnar.

Mælt verður til, at flokkarnir verða skipaðir í tríggjar deildir, grunddeild, miðdeild og hádeild, og at undirvísingartímatalið í hvørjari deild verður lækkað, serliga í hádeild, og at tímarnir, ið eftir eru, verða nýttir til tvílærara-skipan og at lækka næmingatalið í flokkunum.

| | |
|---|---|
| Grunddeild, | 1.-3. flokkur – 25 tímar um vikuna |
| Miðdeild, | 4.-6. flokkur – 30 tímar um vikuna |
| Hádeild, | 7.-9. flokkur – 32 tímar um vikuna |

### 3.2. Floksstødd, tvílæraraskipan og samlæring

Floksstøddin er rættiliga avgerandi fyri, hvat einstaki næmingurin fær burturúr undirvísingini, og hvussu næmingarnir trívast í flokkinum. Vit frætta javnan um, hvussu trupult tað er hjá lærarunum at røkka øllum næmingunum, og at skúlafrávera byrjar longu í grunddeildini. Um ikki verður sett inn frá byrjan av, so fáa vit ikki loyst henda trupulleika, at tað eru ov fá vaksin at taka hond um einstaka næmingin, at fráveran økist og kann føra til bæði mistrivnað og skúlaaftran. Hetta er ein trupulleiki, vit eiga at taka í størsta álvara og gera neyðugar ábøtur, har vit m.a. tryggja eina rímiliga floksstødd og menna tvílæraraskipanina við samlæring, so at næmingarnir fáa eina so góða og trygga skúlabyrjan, sum til ber, og sum teir kunnu byggja víðari á alla fólkaskúlatíðina.

Næmingarnir ganga í skúla stóran part av teirra barna- og ungdómslívi, og tí er umráðandi, at fólkaskúlaskipanin verður stuðlandi og kveikjandi, har næmingarnir trívast og fáa roynt sítt hugflog, forvitni, skapanargleði og evni at læra.

Við at broyta skipanina, har hámarkið fyri næmingatalinum í flokkunum verður lækkað, samstundis sum kravda undirvísingartímatalið verður lækkað, fáa skúlarnir størri rásarúm at økja um læraratíðina til hvønn einstakan næming og kunnu fáa fleiri lærarakreftir inn í hvønn flokk. Serliga í grunddeildini er neyðugt at gera karmarnar betri viðvíkjandi læraratíð til hvønn næming. Umframt hetta krevst eisini, at lærarar hava førleikar at skipa eina fjøltáttaða undirvísing og at virka fyri góðum sosialum relatiónum og trivnaði fyri allar næmingar.

Mælt verður til, at skúladagurin verður styttur, og at spardi peningurin verður nýttur til at lækka hámarkið fyri næmingatalinum í flokkunum og at skipa tvílæraraskipan við denti á samlæring, soleiðis at tað verður meira lærararatíð til hvønn einstakan næming, og at bæði læraraførleiki og tímajáttan verða gagnnýtt á skilabesta hátt. Við eini tvílæraraskipan, ið er grundað á samlæring, verða samstundis betri umstøður at skipa eina øðrvísi undirvísing við evniskunnandi arbeiði og tvørgreinaligum samstarvi, eina undirvísing, sum eisini skapar grundarlag fyri verkætlanum við denti á samstarv og spurdómskenda undirvísing, har næmingarnir kunnu nýta sítt forvitni, undrast og fáa roynt síni skapanarevni.

## 3.3. Tíma- og lærugreinabýtið

Tíma- og lærugreinabýtið er grundalagið, sum skúlarnir skipa undirvísingina og skúladagin eftir. Vit hava eitt rættiliga útgreinað tíma- og lærugreinabýti, sum ger, at einstaki skúlin ikki hevur stórt frælsi sjálvur at raðfesta innan lærugreinir, lærugreinasamanseting og tímatal. Arbeiðsbólkurin heldur, at tað er ein forðing í menningartilgongdini í skúlunum, at landsmyndugleikin stýrir bæði virksemi skúlans og skúladegnum hjá næmingunum í smálutum við at áseta, hvussu nógvar tímar, hvør einstøk lærugrein hevur á tímatalvuni, hvørt skúlaár, soleiðis, sum tíma- og lærugreinabýtið er skipað í fólkaskúlanum.

Tíma- og lærugreinabýtið er ikki ásett í lógini, men ásett er í § 19, stk. 10, at landsstýrismaðurin ger reglur um tíma- og lærugreinabýtið. Hetta verður gjørt við ásetingunum í lógini sambært kravdu lærugreinunum, sum eru ásettar í § 5, stk. 2 og eftir kravda tímatalinum í hvørjum árgangi sambært § 19, stk. 2.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at gjørt verður eitt yvirskipað tíma- og lærugreinabýti, ið ikki nágreinar niður í smálutir, hvussu nógvir tímar um vikuna skulu vera í hvørjari einstakari lærugrein, men at gjørt verður eitt javnari býti millum hesar lærugreinabólkar:

- Málllærugreinar (føroyskt, danskt og enskt)
- Náttúruvísindi (støddfrøði, heimstaðarlæra, náttúra og tøkni, alisfrøði, evnafrøði og lívfrøði)
- Mentan og samfelag (søga, samfelagsfrøði, lívsáskoðan, átrúnaður, kristnikunnleiki og landalæra)
- Likamlig og skapandi læring (ítróttur, rørsla, heilsa, handarbeiði, smíð, myndlist, heimkunnleiki og tónleikur).

Hetta fer at geva einstaka skúlanum, og serliga leiðslu skúlans størri leiðslurúm og frælsi saman við lærarunum at ráðleggja og skipa undirvísingina í samsvari við námsætlanir, tørvi skúlans á undirvísingarligum fyriskipanum, námsfrøðiligar og fakligar førleikar og umstøður annars í einstaka skúlanum.

Hetta er eisini í samsvari við úrslitini í kanning hjá Undirvísingarstýrinum í novembur 2020, har kannað varð, um og í hvønn mun skúlarnir nýttu

heimildina í § 19, stk. 3, sum varð ásett í lógini í 2019, og sum gevur skúlunum ávíst frælsi at flyta tímar frá ávísum lærugreinum til at menna sang og tónleik og aðrar lærugreinir innan handaverk og list, vallærugreinaskipan og at seta inn í flokkum við fleiri læraratímum.

72 % av skúlaleiðarunum luttóku í kanningini, og vóru teir sum heild fegnir um hetta víðkaða leiðslurúmið, har teir í størri mun kundu ráðleggja og leggja undirvísingina til rættis, soleiðis sum leiðsla og lærarar hildu verða gagnligt í mun til læring, menning og trivnaðin hjá næmingunum. Víst varð samstundis á, at henda skipan var ov avmarkandi, og ynsktu skúlarnir størri frælsi at ráðleggja tímar og gera skipanir millum lærugreinir.

Arbeiðsbólkurin heldur, at tað er umráðandi at veita skúlunum álit og frælsi í ráðleggingini, og at bæði leiðslur og lærarar virka fyri at skipa skúladagin og læringina, so at næmingarnir trívast, mennast og í læringini fáa sum mest burturúr undirvísingini.

Við frælsi fylgir eisini ábyrgd, og hetta kann innibera øðrvísi og størri krøv til skúlaleiðslur og eisini til Undirvísingarstýrið og skúlamyndugleikarnar í sambandi við eftirlit og vegleiðing. Sum eftirlitsamboð kunnu bæði skúlarnir og myndugleikarnir nýta nýggju KT heildarætlanina í sambandi við umsiting, umframt námsætlanirnar, førleikamál og landsroyndarúrslit.

### 3.4. Undirvísing og námsætlanir

Undirvísingartilgongdin og fakliga læringin eru høvuðsvirksemið í fólkaskúlanum, har tann búnandi, trivnaðarliga og persónliga menningin hjá næminginum er ein sameindur partur. Tað er tí so umráðandi, at námsætlanirnar innihaldsliga fata um fjølbroytt og neyðug faklig evni, men eisini tryggja, at næmingarnir fáa umstøður at arbeiða seg í dýpdina í nøkrum evnum. Samstundis eigur dentur at verða lagdur á, at næmingarnir læra at nýta fleiri arbeiðshættir í undirvísingini, har teir fáa vegleiðing og umstøður at dvølja við viðkomandi evni og trupulleikaorðingar. Tað skal vera smidligari hjá lærarum at brúka mennandi evnisarbeiði, sum fevnir um ymisk fakøki, og sum fremur djúphugsni og vitanardýpi.

### 3.5. Kostnaður

Tað kostar at gera størri broytingar, serliga at lækka næmingatalið í flokkunum til 20 næmingar og at víðka tvílæraraskipanina. Útrokningarnar, sum eru gjørdar, vísa, at átakið at lækka næmingatalið í øllum flokkum í 1.-9. flokki til í mesta lagi 20 næmingar kostar umleið 36. mió. kr. Mælt verður ikki til at seta skipanina í verk í einum, men eftir 9 árum, og at byrjað verður við innskrivingini til fyrsta flokk skúlaárið 2024-25. Ein tillagað tvílæraraskipan, um hon verður sett í verk í 1.-6. flokki, kostar 12. mió.kr. afturat, sum er 2 mió. kr. í seks ár.

Samstundis verður mælt til, at skúladagurin verður styttur, og har er ein sparing, ið er á leið 16. mió.kr.

Tað er sera umráðandi, at henda sparing verður nýtt til at lækka næmingatalið í flokkunum og at víðka tvílæraraskipanina. Tað hevur stóran týdning, at neyðug átøk verða gjørd í fólkaskúlanum, men spurningurin er samstundis, hvussu umfatandi, tey skulu verða bygnaðarliga og innihaldsliga, og í hvørjari raðfylgi, tey verða sett í verk. Arbeiðsbólkurin hevur sett átøkini í tíðarrøð, men av tí at tørvurin er stórur innan fleiri øki, og viðurskiftini eisini hanga saman, so er neyðugt at byrja við fleiri økjum í senn, men at broytingarnar verða gjørdar yvir eitt áramál. Umframt at lækka næmingatalið í flokkunum og at økja tvílæraraskipanina, er stórur tørvur á eftirútbúgving innan fleiri øki, og hetta hongur eisini saman við menningini bæði innan læring og trivnað.

## 3.6. Myndugleikabýtið og fígging í fólkaskúlanum

Ábyrgdin av fólkaskúlanum er býtt millum land og kommunur, har skúlastýrini eisini eru partur av skúlamyndugleikanum á staðnum, og skúlaleiðarin hevur dagligu ábyrgdina av virkseminum í einstaka skúlanum. Fíggingin av fólkaskúlanum er somuleiðis býtt millum land og kommunur, soleiðis at landið rindar undirvísingarliga virksemið, lønir og eftirlønir hjá lærarum og skúlaleiðarum, eftirútbúgving, royndar- og menningarvirksemi og próvtøku og royndarhald, meðan kommunurnar rinda bygningar, innbúgv, amboð, tilfar, kt-útbúnað og rættindagjøld, seta skrivarar og umsjónarfólk og rinda alt virksemi í forskúlunum. Harumframt bera kommunurnar kostnaðin av skúlalagnum og atkomumøguleikum til skúlan.

Fólkaskúlin er tí ein samansett skipan, har fleiri myndugleikar hava hvør síni ábyrgdarøki, landsstýrismaðurin, kommunurnar, skúlastýrini og skúlaleiðarar. Broytingar í fólkaskúlalógini hava sostatt eisini ávirkan á ábyrgdarøkið hjá kommunum, tá ið tað ræður um hølisviðurskifti, tilfar og útgerð.

### Ábyrgdarøkið hjá kommunum

Kommunurnar hava ein stóran leiklut til tess at tryggja, at næmingarnir í kommununi fáa ásettu undirvísingina. Tær hava eftirlit við, at øll børn í undirvísingarskyldugum aldri í kommununi verða innskrivað í fólkaskúlan, ella at tey á annan hátt fáa eina undirvísing, ið kann javnmetast við ta, sum vanliga verður kravd í fólkaskúlanum.

Kommunustýrini skulu eisini skipa fyri, at næmingarnir fáa undirvísing øll skúlaárini frá 1.-10. flokk, antin við at stovna egnan skúla ella við at skipa skúlasamstarv við aðra kommunu. Tað eru fleiri av smærru kommununum, ið ikki hava framhaldsdeild, 8.-10. flokk, serliga við atliti at næmingagrundarlagnum, og tí hava eitt skipað samstarv við aðra kommunu um henda partin av undirvísingini. Tilvísing til skúla hjá øðrum

skúlamyndugleika kann tó vanliga bert fata um næmingar, sum eru í 4. skúlaári og eldri.

Høvuðsábyrgdin hjá kommununum er at skipa og fíggja karmarnar kring undirvísingina, bæði hølisviðurskifti, rakstur, amboð og undirvísingarmiðlar. Eisini hava kommununurnar ábyrgd av møguligum næmingaflutningi. Er talan um at flyta næmingar millum kommunur, so letur UVS kommununum ávísan stuðul til góðkendan næmingaflutning.

Kommunurnar hava somuleiðis ábyrgd av skúlabygnaðinum og allari skúlabygging. Kommunurnar gera uppskot til skúlabygging og skúlabygnað og skulu í sambandi við at tryggja, at allir næmingar fáa kravdu undirvísingina, skipa fyri, at fígging er til raksturin, at hóskandi undirvísingarhøli eru tøk, ella avtala er gjørd við aðra kommunu um felags undirvísing og undirvísingarhøli.

Skipanin merkir eisini, at kommunalt sett starvsfólk hava sín gerandisdag í skúlunum kring landið, serliga skúlavørðar, skrivarar og reingerðarfólk.

**Ábyrgdin hjá skúlastýrunum**

Í hvørjum sjálvstøðugum skúla í kommununi, t.e. skúli, sum vanliga í minsta lagi fatar um trý samanhangandi floksstig, verður eitt skúlastýri valt. Skúlastýrið luttekur í arbeiðinum at mynda yvirskipaðu karmarnar um undirvísingina í skúlanum í tøttum samstarvi við skúlaleiðaran. Skúlastýrið ger við støði í ásettum reglum atferðarreglur skúlans og reglur um umsjónina við næmingunum í skúlatíðini.

Skúlastýrið ásetur eisini meginreglur um virksemi skúlans m.a. samarbeiðið ímillum skúla og heim, fráboðan til heimini um úrtøku næminganna av undirvísingini, foreldrafundir, trivnaðarætlan og felagstiltøk fyri næmingarnar í skúlatíðini sum útferðir, setursskúla og vitjanir á stovnum, virkjum og á mentanarligum tiltøkum.

Skúlastýrið er partur av øllum setanarmálum bæði at seta skúlaleiðarar og lærarar. Skúlastýrið luttekur eisini í arbeiðinum hjá bý- og bygdaráðunum at skipa fysisku karmarnar og undirvísingarligu fortreytirnar á staðnum. Skúlastýrið viðger saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygging og umbygging av verandi skúlum.

**Skúlastjórin, fyrsti- og einalærarin**

Til hvønn sjálvstøðugan skúla, sum hevur fleiri lærarar í føstum starvi, verður leiðari settur, ið antin verður nevndur fyrstilærari ella skúlastjóri. Skúlaleiðarin hevur bæði ta námsfrøðiligu og fyrisitingarligu ábyrgdina, hann setur lærarar og varaskúlastjórar og leggur tímabýtið til rættis, so at næmingarnir fáa kravdu undirvísingina umframt vallærugreinatilboð.

Skúlaleiðarin tekur allar ítøkiligar avgerðir viðvíkjandi næmingum skúlans og hevur eftirlit við, at teir næmingar, sum eru innskrivaðir í skúlan, fylgja nóg væl við og taka lut í undirvísingini, og hann skipar samstarvið millum skúla og heim og við skúlastýrið. Hann skipar námsfrøðiliga ráðið og virkar fyri, at næmingaráð verða stovnað. Hann stýrir og býtir arbeiðið millum teirra, sum starvast í skúlanum, og setur flokslærara í hvørjum flokki. Skúlaleiðarin skal tryggja, at flokslærarin og aðrir lærarar floksins ráðleggja og fyrireika undirvísingina, so at allir næmingar kunnu fáa sínar avbjóðingar, og hann virkar fyri, at næmingar, sum hava fakligar og sosialar avbjóðingar, fáa hjálp og ráðgeving.

Skúlaleiðslan stendur eisini á odda fyri námsfrøðiligu, fakligu og sosialu menningini, sum skúlin skipar sítt virksemi eftir. Innan fyri settar karmar hevur tann einstaki skúlin ábyrgdina av undirvísingardygdini sambært endamáli fólkaskúlans.

**Landsstýrismaðurin**

Landsstýrismaðurin hevur meginfyrisitingina og yvirumsjónina við fólkaskúlanum og ansar eftir, at galdandi reglur verða hildnar, og at ásettar fyriskipanir verða settar í verk. Hann skipar karmarnar og innihaldið sambært ásetingum í fólkaskúlalógini, ásetur skúladagatalið og ger reglur um fyrskipanir, serøkið og arbeiðsøki í fólkaskúlanum m.a. um skúlabókasavnið, førleikastovuna, flokslæraran, skúlavegleiðing, próvtøkur, landsroyndir, serlig undirvísingartilboð, um námsfrøðiliga ráðið og næmingaráð, skúlastýrið og reglur um gott skil og umsjón við næmingunum í skúlatíðini. Hann setur skúlastjórar, fyrstu- og einalærarar og tekur avgerð í klagumálum. Hann setur fólkaskúlaráð og kann seta ráðgevandi nevndir. Hann hevur ábyrgd av innihaldinum í lærugreinum og evnum, ger námsætlanir og leiðbeinandi tilfar, hann ger reglur um tíma- og lærugreinabýtið, um frítíðarætlanina, um royndar- og menningarvirksemi og ásetur endamálið í einstøku lærugreinunum og evnunum. Hann ger av í hvørjum lærugreinum próvtøka verður og setur tær skrivligu uppgávurnar til royndirnar, hann ásetur reglur um royndarkrøvini í einstøku lærugreinunum, um royndarhald, próvtalsgeving, og hvussu próvskjølini skulu vera, og hann skipar fyri landsroyndunum í 4. og 6. floksstigi. Meginparturin av ásetingum kring royndarhald og próvtøkur er fluttur til Nám at umsita, og uppgávur viðvíkjandi fíggjarliga partinum í fólkaskúlanum og dagliga samskiftinum og eftirlitinum eru lagdar til Undirvísingarstýrið at umsita.

Landsstýrismaðurin tekur eisini støðu til ymisk øki, ið kommunurnar fyrisita. Hann góðkennir øll byggimál og allar umbyggingar í fólkaskúlanum. Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð vavið av undirvísingarmiðlum, góðkennir flutningsskipanir og ásetur reglur um landskassastudning til

lutvíst at rinda flutningsútreiðslur. Landsstýrismaðurin skal góðkenna teir sáttmálar, sum kommunurnar gera um skúlasambond, eisini sáttmálar, sum kommunur gera um at vísa næmingum á undirvísing í skúla hjá aðrari kommunu.

# 4. Tilmæli, kostnaður og tíðarætlan

| Tilmæli | Kostnaður | Tíðarætlan | Ábyrgd |
|---|---|---|---|
| **Tilmæli I – KT og læring** | | | |
| KT verður partur í øllum lærugreinum | Partur av námsætlanararbeiðinum | 2023/24-2025/26 | Nám og BÚMR |
| KT verður partur av læraraútbúgvingini | Partur av lestrarskipanini | Varandi | NÁD |
| KT verður høvuðsevni á læraradøgunum í 2023 | 100.000 | Novembur 2023 | Nám |
| Eftirútbúgving í KT fyri øllum lærarum | 600.000 árliga | 2023/24-2025/26 | Nám |
| **Tilmæli II – Floksstødd** | | | |
| Næmingatalið við skúlaársbyrjan verður 20 næmingar. | Uml. 36 mió. kr. í 1.-9. fl. | Byrjað verður í 1. fl. í august 2024 | BÚMR og UVS |
| Skipanin verður sett í gildi eftir níggju árum | Uml. 4 mió. kr. árliga | 2024/25-2032/33 | BÚMR og UVS |
| Skúlastjórin tekur støðu til, um nýtt floksbýti verður gjørt, ella nýtt verður tvílæraraskipan | Sami kostnaður | Sama tíðarskeið | Skúlaleiðarin |
| **Tilmæli III – Arbeiðshættir** | | | |
| Verkætlanararbeiði, evniskannandi undirvísing og verkstaðarundirvísing verða nágreinað í fólkaskúlalógini | Partur av arbeiðinum at endurskoða fólkaskúlalógina | 2023-24 | BÚMR |
| Eftirútb.í evnis-, verkstaðar- og verkætlanararbeiði við denti á kannandi-, verkligar-, og skapandi námshættir | 100.000 í 2 ár<br>200.000 í 2 ár | 2024/25-2027/28 | Nám |

| Tilmæli IV – Raðfeting innan eftirútbúgving og drúvari skeið | | | |
|---|---|---|---|
| Tørvslýsing av eftirút-búgving og drúgvaru skeiðum | Sí tilmæli V | Sí tilmæli V | BÚMR |
| **Tilmæli V – Eftirútbúgving, skipan og játtan** | | | |
| Eftirútbúgvingarnevnd, samskipan, fyrireiking og kostnaðarmeting | 50.000 árliga | Raðfesting fyri næstu 10 árini, býtt í 2-3 ára virksemisskeið | BÚMR |
| NÁD: eftirútbúgvingar<br>Nám: skeiðsvirksemi, si tilmæli I, III og VI og VIII | 3.5 mió. kr.<br>1. mió. kr. | 2024/25- 2033/34<br>2024/25- 2026/27 | BÚMR, UVS, Nám, NÁD |
| **Tilmæli VI – Handaverk og list** | | | |
| Menna handaverk og list og endurskoða skipanina | Raðfesta í tíma- og lærugreinabýtinum | 2024-25 | BÚMR |
| Skeið innan handaverk og list í handarbeiði, tilevning, smíð, heimkunnleika og tónleiki | 100.000 í 2 ár<br>200.000 í 2 ár | 2023/24-2026/27 | Nám og BÚMR |
| Næmingar í hádeild fáa møguleika at velja eina verkliga ella listarliga lærugrein | Skipan í tíma- og lærugreinabýtinum | Seta í verk skúlaárini 2024/25-2026/27 | Skúlastjórar og UVS |
| **Tilmæli VII – Námsætlanir** | | | |
| Arbeiðsbólkar dagføra námsætlanirnar í fólkaskúla og miðnámi og gera leiðbeinandi tilfar. Fólkaskúlin 35, miðnám 45 og yrkisnám 24 námsætlanir | 1.0 mió. kr. árliga | 2023/24-2027/28 | BÚMR og Nám |
| **Tilmæli VIII – Tvílæraraskipan og samlæring** | | | |
| Víðka tvílæraraskipan-ina til 1.-6. fl, tá ið 13-20 næmingar eru í flokkinum. Byrjað í 3. fl. 2024-25. Sama skipan galdandi í samanløgdum flokkum | 1.-6. fl.<br>12.250 mió. kr.<br><br>3. fl. uml.<br>2 mió.kr. | 2024/25-2029/30 | UVS og BÚMR |
| Samskipa samlæring og tvílæraraskipan, skeið og ráðgeving | 50.000<br>200.000 árliga | Fyrireiking 2023/24<br>2024/25-2028/29 | Nám, BÚMR, NÁD og UVS |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Tilmæli IX – Flokslæraraskipanin** | | | |
| Eftirútbúgving við denti á relatiónskompetansu, trivnað, samskifti og samstarv | 20 ects – 1.5 mió.kr<br>10 ects – 0.75 mió kr | Fyrireiking 2023/24<br>2024/25-2027/28 | BÚMR, UVS, NÁD og Nám |
| Økja tíðina til flokslærara-arbeiðið | 3.5 mió. kr. | 2023/24-2025/26 | BÚMR og UVS |
| **Tilmæli X – Lækka kravda undirvísingartímatalið** | | | |
| Grunddeild<br>1.-3.fl.:25 tímar<br>Miðdeild<br>4.-6. fl.:30 tímar<br>Hádeild<br>7.-9. fl.:32 tímar | Lækkað játtan<br>1.-9. fl.<br>uml. 16 mió. kr. | 2024/25-2026/27 | BÚMR og UVS |
| **Tilmæli XI – Dagliga undirvísingartímatalið** | | | |
| Forskúli og<br>1.- 3. fl.: 5 tímar<br>5.- 6. fl.: 6 tímar<br>7.- 9. fl.: 7 tímar | Partur av tíma- og lærugreinaskipanini | 2024/25-2026/27 | BÚMR og skúlaleiðararnir |
| **Tilmæli XII – lærugreinaskipanin** | | | |
| Lærugreinirnar skip-aðar í 4 høvuðspartar: mállærugreinir náttúru-vísindi, mentan og samfelag og likamlig og skapandi læring | Partur av tíma- og lærugreinabýtinum | 2024/25-2026/27 | BÚMR, UVS og skúlaleiðararnir |
| **Tilmæli XIII – Undirvísingarpartar og lærugreinabýtið** | | | |
| Áseta undirvísingarpartarnar í § 5 í lógini.<br>Lærugreinabýtið ásett í % fyri hvønn undirvísingarpart<br>Grunddeild, 1.-3. flokkur<br>Miðdeild, 4.-6. flokkur<br>Hádeild, 7.-9. flokkur | Partur av tíma- og lærugreinabýtinum | 2024/25-2026/27 | BÚMR |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Tilmæli XIV – Alis- og evnafrøði og týskt** | | | |
| Alis- og evnafrøði verður kravd lærugrein í 7.-9. fl. Bólkastødd við í mesta lagi 12 næm. í náttúru og tøkni og alis- og evnafrøði, sama skipan sum í verkligu og handaligu lærugreinunum | Partur av tíma- og lærugreinaskipanini og játtanarskipanini | 2024/25-2025/26 | BÚMR og UVS |
| **Tilmæli XV – Tíma- og lærugreinabýtið í grunddeild 1.-3. flokkur** | | | |
| Lærugreinapartarnir verða skipaðir í prosentstigum | Partur av tíma- og lærugreinaskipanini | 2024/25 | BÚMR |
| **Tilmæli XVI – Tíma- og lærugreinabýtið í miðdeild 4.-6. flokkur** | | | |
| Lærugreinapartarnir verða skipaðir í prosentstigum | Partur av tíma- og lærugreinaskipanini | 2025/26 | BÚMR |
| **Tilmæli XVII – Tíma- og lærugreinabýtið í hádeild 7.-9. flokkur** | | | |
| Lærugreinapartarnir verða skipaðir í prosentstigum | Partur av tíma- og lærugreinaskipanini | 2026/27 | BÚMR |
| **Tilmæli XVIII- BTÚ og hagtalsskipan** | | | |
| Hægri prosentpartur av BTÚ verður brúktur sum játtanargrundarlag til skúlaverkið, herímillum fólkaskúlan | Fíggjarlógararbeiði | 2024 | Fíggjarnevndin og løgtingið |
| Útvega hagtøl, so til ber at samanbera við hini Norðurlondini og lond, sum eru í OECD samanberingum | Partur av arbeiði í skúlum og stovnum | 2023 | Hagstovan, BÚMR, UVS og útbúgvingarstovnar |

# 5. Arbeiðssetningurin

Uppgávan, sum arbeiðsbólkurin fekk, var at lýsa arbeiðsøkini niðanfyri við atliti at, hvørjar ábøtur kunnu verða gjørdar, fyrimunir og vansar, og hvørja ávirkan átøkini hava á undirvísing og trivnað:

1. Tíma- og lærugreinabýtið, har hugt verður eftir kravdu lærugreinunum, sum eru ásettar í § 5, stk. 2 og tímatalinum í hvørjum árgangi í § 19, stk. 2.
2. Floksstødd, har skipanin í dag og ásetingarnar í § 20 verða viðgjørdar saman við møguleikanum at lækka næmingatalið til 20-22 næmingar við skúlaársbyrjan.
3. Menna lærugreinapartin, handaverk og list, har lýst verður møguleikin at styrkja einstøku lærugreinarnar og skipa tær øðrvísi, § 5, stk. 2, pkt. 4.
4. Føroyskt sum annaðmál, Hvat kann verða gjørt fyri at menna undirvísingina, næmingabólkar, móttøkuflokk, § 5, stk. 6.
5. Serøkið, herundir
   a) næmingar við sálarligum og sosialum avbjóðingum
   b) skúlaaftran
   c) lívsmeistran og
   d) stuðul og hjálp hjá næmingum, ið eru lesi- og skriviveikir.
   6. Onnur viðurskifti, sum arbeiðsbólkurin heldur verða umráðandi at dagføra.
6. Fíggjarligar avleiðingar av átøkunum.

Arbeiðsbólkurin gjørdi av at raðfesta arbeiðið í tveimum, har trý tey fyrstu evnini, pkt. 1-3, verða viðgjørd í fyrstu atløgu, umframt at áherðsla verður løgd á fjølbroytta læring og eftirútbúgving við atliti at pkt. 1 og 3 og tvílæraraskipan við atliti at floksstødd pkt. 2. Harumframt er dentur lagdur á flokslærarauppgávuna, sum landsstýrismaðurin ynskti at styrkja, serliga við atliti at trivnaðinum í flokkunum, sum eisini er knýtt at pkt. 5, b og c. Harumframt verða gjørd uppskot um aðrar tillagingar í lógini. Ætlanin var, at uppskot um lógarbroytingar við atliti at hesum parti skuldi verða latið landsstýrismanninum um mánaðarskiftið novembur/desembur 2022.

Arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum heldur fram, har hini økini, pkt. 4 og 5, verða viðgjørd. Orsøkin til, at øll evnini ikki verða tikin undir einum, er, at økini fevna víða, og at annað arbeiði samstundis varð skipað innan bæði hesi øki. Í sambandi við pkt. 4 er verkætlan, føroyskt sum annað mál, skipað, og settur er arbeiðsbólkur, sum leggur til rættis undirvísing fyri næmingar úr Ukraina. Innan serøki situr annar arbeiðsbólkur, ið arbeiðir við sálarheilsu hjá børnum og ungdómi í skúlaaldri, og harumframt verður eftirmeting eisini gjørd innan sernámsfrøðiliga økið. Hesi arbeiði verða grundarlag undir framhaldandi arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum.

# 6. Arbeiðsgongd

Arbeiðsbólkurin varð settur 15. november 2021 á fundi í táverandi Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt arbeiðssetningin á tilsamans 15 fundum, íroknað 3 fundum saman við politiska fylgibólkinum. Harumframt hava fundir verið í einum fyrireikingarbólki, har 5 av umboðunum frá samlaða arbeiðsbólkinum hava fyrireikað nakrar av fundunum. Flestu fundirnir hava verið í fundarhøli hjá BÚMR á Tinghúsvegi 5-7, meðan einstakir fundir hava verið á Teams.

Við støði í arbeiðssetninginum hevur arbeiðsbólkurin í viðgerðini og umrøðuni á fundunum eisini havt áður gjørd tilmæli, álit, upprit, granskingarúrslit og greinar umframt ásetingar í fólkaskúlalógini sum fakligt og námsfrøðiligt grundarlag. Eisini hevur arbeiðsbólkurin, umframt orðaskifti, framløgur og felags viðgerð í arbeiðsbólkinum, skipað arbeiðið í smærri bólkum, ið síðani hava havt framløgur, har tilfarið er viðgjørt í samlaða arbeiðsbólkinum.

# 7. Hugsjónarliga grundarlagið í fólkaskúlanum

Fólkaskúlin er ein av hollastu grundarsteinunum undir fakligari og sosialari menning og læring hjá einstaka næminginum. Hann skal tryggja, at allir næmingar fáa møguleika at nýta og menna sínar fakligu, musisku, kreativu, handaligu og sosialu førleikar, og at teir mennast í felagsskapinum saman við floksfeløgum og lærarum. Fólkaskúlin skal í sínum virksemi skapa rúm fyri ymiskleika bæði andliga, handliga, mentanarliga og fakliga. Fólkaskúlin hevur eina stóra uppgávu at búgva næmingin til lívið, har næmingurin ognar sær alment dannilsi, fær innlit í ymiskleika og liviumstøður hjá menniskjum, náttúrunnar margfeldi, vernd, møguleikar og burðardygt skynsemi. Harumframt dagliga venjing at luttaka í einum sosialum og lærandi felagsskapi, grundað á fólkaræðisliga hugsan við atliti at flokkinum og tí einstaka.

Í fólkaskúlanum eru vitan og umstøður at skapa trivnað og møta ymiskleika grundleggjandi førleikar og fortreytir fyri at skipa eina mennandi og viðkomandi undirvísing, har góðar relatiónir millum allar partar, millum lærara og næming og næmingar sínámillum, eru so umráðandi. Tað tykist, sum tað eru alsamt fleiri næmingar, sum hava tørv á serligum fyriskipanum og eisini næmingar, sum kenna seg ikki megna skúlagongdina, ofta vegna trivnaðarligar og sálarligar avbjóðingar sum angist, happing, einsemi og vantandi umsorgan. Týðandi liðir í hesum arbeiði eru flokslæraraskipanin og áherðsla á at styrkja fakliga, námsfrøðiliga og sosiala førleikan í skúlanum sum heild. Førleikastovan og teir fakpersónar, sum er knýttir at arbeiðinum í førleikastovuni, hava ein stóran leiklut í hesum arbeiði.

Tað er týdningarmikið, at børn og ung uppliva kensluna av at eydnast og trívast. Hetta hevur stóra ávirkan á teirra sjálvsvirði og sjálvsfatan. Fólkaskúlin eigur at leggja dent á eitt trygt og mennandi læriumhvørvi. Handaligu og listarligu lærugreinarnar kunnu hava ein stóran leiklut í hesum sambandi og á menningina og trivnaðin hjá næmingum. Næmingar eiga at sleppa at hugsavna seg og hava ávirkan á tilgongd og innihald í tí, tey fáast við. Tað er umráðandi, at tað í læringini er eitt samspæl millum

bókligar, verkligar og musiskt /kreativar lærugreinir, so næmingurin fær ment sínar ymisku førleikar.

Fólkaskúlin eigur at leggja dent á, at næmingarnir ogna sær førleikar at nýta kunningartøkni bæði sum part av undirvísingini og sum samskiftismiðil. Nógv samskifti millum børn og ung fer fram á snildtelefon, teldli og á talgildum rásum sum facebook, tik-tok, messenger og instagram. Tað er ein stór avbjóðing hjá næmingunum bæði at duga at brúka amboðini, skilja hvørja ávirkan tey hava og kritiskt at duga at meta um talgilt tilfar.

# 8. KT Førleikar og talgildisbúgving

Talgildir miðlar og talgild amboð eru partur av dagsins samfelagi. Bæði børn, ung og vaksin eru meira ella minni á hvørjum degi í sambandi við okkurt slag av talgildum miðli. Hetta er eisini eitt evni, sum sera ofta er uppi at venda í tíðindum og í gerandissamtalum. Talgildi heimurin er ein torgreidd og samansett eind og krevur bæði førleikar og skynsemi, um vit ynskja at gagnnýta hann.

Hetta er ein orsøk til, at tað er alneyðugt, at skúlaverkið málrættað og tilvitað fer at inndraga kt-førleikar og talgildisbúgving í undirvísingina. Í § 2, stk. 3 í fólkaskúlalógini er ásett, at fólkaskúlin skal búgva næmingarnar til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur í einum fólkaræðisligum samfelagi. Av tí at samfelagið í stóran mun er samantvunnið við talgilda heimin, er neyðugt at leggja til rættis eina undirvísingarleið, sum frá skúlabyrjan til skúlaenda kann vera við til at búgva næmingarnar til tað samfelag, sum teir eru í og skulu verða ein partur av.

Í støðisnámsætlanini[2], sum er ein yvirskipaður partur í námsætlanunum, eru kt-førleiki og talgildisbúgving nevnd sum ein av støðisførleikunum. Hinir støðisførleikarnir eru lesing, skriving, rokning og munnligt samskifti. Kt-førleikar og talgildisbúgving snúgva seg bæði um førleikar at brúka ítøkilig, viðkomandi kt-amboð og at skilja amboðini, og í hvørjum samanhangi tey skynsamt kunnu nýtast. Eisini snúgva kt-førleikar og talgildisbúgving seg um atferð á talgildum miðlum og keldukritiska viðgerð av talgildum tilfari. Endamálið er at búgva næmingarnar til at vera virknar, sjálvstøðugar, kritiskar og fólkaræðisligar borgarar í einum talgildum samfelagi.

Av tí, at hetta er eitt torgreitt og samansett øki, er hesin støðisførleikin innan kt býttur í seks øki. Um vit skulu búgva næmingar til eitt samfelag, har talgildi parturin er samantvunnin, eiga øll hesi økini at vera umboðað.

---

2 Støðisnámsætlanin er skipað í tríggjar partar: Virðisgrundarlag, førleikar og meginreglur fyri undirvísing. Øll undirvísing, frá byrjan í fólkaskúla til lokið miðnám ella yrkisnám, skal hava støði í støðisnámsætlanini og í námsætlanunum fyri einstøku lærugreinarnar.

Økini eru:

- Nýtsla
- Fatan og teldulig hugsan
- Metingarevni
- Samskifti og samstarv
- Leitan og viðgerð
- Skapan

Tá ið dentur verður lagdur á øll hesi økini, verður tryggað, at tilgongdin til støðisførleikan er holistisk og megnar at fevna um hetta samansetta økið. Hetta merkir, at tað ikki er nóg mikið at duga at nýta talgildar miðlar og talgild amboð (Nýtsla). Tað er eisini neyðugt at skilja samanhang, endamál og týdning av amboðunum í mun til umheimin (Metingarevni). Eisini er neyðugt at gjøgnumskoða, hvørjir fyrimunir og vansar kunnu standast av nýtsluni av ávísum talgildum miðlum, amboðum og forritum, og at meta um ein uppgáva skynsamt og úrslitagott kann loysast við talgildum loysnum (Fatan og teldulig hugsan). Í virkseminum at skapa við talgildum miðlum, forritum og amboðum fær næmingurin møguleika at arbeiða virkið, nýhugsandi og skapandi, og hetta gevur eina aðra fatanartilgongd enn óvirkin (passiv) nýtsla. Í skapandi læringini fær næmingurin á ein øðrvísi hátt bæði innlit og møguleika at skilja bygnað og teir møguleikar, sum eru í talgildum skipanum.

Um vit gera kt-førleikar og talgildisbúgving til ein natúrligan part av skúlaverkinum, so tryggja vit, at vit áhaldandi búgva næmingarnar til at vera virknar og ábyrgdarfullar borgarar í einum samfelagi, sum áhaldandi fer at møta talgildum avbjóðingum og møguleikum.

## 8.1. Tilmæli I. KT og læring

Mælt verður til:

at kt verður partur í øllum lærugreinum
at kt verður partur av kravdu námsætlanunum í læraraútbúgvingini
at kt verður høvuðsevni í læraradøgunum í heyst
at skipað verður eftirútbúgving fyri allar lærarar innan kunningartøkni, og at fígging verður sett av til at førleikamenna lærararnar.

Mettur kostnaður er kr. 600.000 árliga í eitt trý ára skeið. Hetta svarar til at førleikamenna lærarar fólkaskúlans tveir dagar í sama skúlaári. Hædd er ikki tikin fyri vikarum hesar báðar dagar, av tí at ætlanin er, at skeiðini verða fyri øllum lærarum skúlans samstundis, men í størstu skúlunum verður helst neyðugt at nýta fleiri dagar.

# 9. Floksstødd

Ein fortreyt fyri at skapa trivnað og tær góðu relatiónirnar í flokkinum er, at lærarar hava tíð til einstaka næmingin. Hetta er galdandi fyri allar næmingar, at teir kenna seg bæði verða sæddar og hoyrdar. Tað er umráðandi, at fyriskipanirnar í fólkaskúlanum taka hædd fyri hesum, so at næmingarnir uppliva, at læringin bæði er spennandi og viðkomandi, og at í skúlanum er gott at vera, har atlit verða tikin at førleikum, tørvi og evnum hjá tí einstaka.

Øll skifti kunnu vera trupul, og í fólkaskúlanum hevur næmingurin ymisk skifti umframt, at búningartilgongdin eisini krevur sítt. Næmingarnir kenna ofta eitt stórt skifti frá dagstovni til skúla, har gerandisdagurin við skifti millum læring og leik gerst øðrvísi, og at næmingarnir skulu arbeiða við ásettum lærugreinum ávíst tímatal og ikki minst, at færri vaksin eru um næmingarnar. Síðani er skiftið frá grunddeild til miðdeild, har fleiri lærugreinir eru á tímatalvuni, landsroyndir verða skipaðar, og at undirvísingartilfarið broytist við færri einnýtisbókum og útfyllingaruppgávum, so at næmingarnir skulu megna nógv meira sjálvir. Til síðst er tað skiftið frá miðdeild til hádeild, har fyrireiking til próvtøkur fólkaskúlans byrja, torleikastøðið hækkar, og næmingarnir skulu taka støðu til víðari skúlagongd og arbeiði umframt, at tannáringaárini krevja sítt.

Tað er ein fortreyt fyri at náa tí einstaka, at menna læringina og felagsskapin í flokkinum, at flokkarnir ikki eru ov stórir, og at eyka lærаratímar eru í flokkunum eftir tørvi. Sjálvt um flokkar eru ymiskir, so er tað eisini í teimum vælvirkandi flokkunum torført hjá einum lærara við 23-26 næmingum at náa øllum næmingunum, ikki bara fakliga, men eisini við atliti at trivnaði og felagsskapi, tí tað er ov lítil tíð til hvønn einstakan. Hetta eru viðurskifti, sum eigur at verða bøtt um, so skjótt sum til ber við at lækka floksstøddina til 20-22 næmingar. Hetta kann ikki verða gjørt í einum, men byrjað eigur at verða við innskúlingini. Í mið- og hádeild eigur skúlin at meta um tørvin og seta inn við eyka lærarakreftum. Um tilflyting er, og næmingatalið hækkar í einstøkum flokkum, so eigur nýtt floksskifti at verða gjørt við størsta fyrivarni, tí tá ið 2-3 ár eru liðin, so hava næmingarnir funnið sítt tilhaldsstað, tað er teirra flokkur og vinir, og tí er umráðandi, at fyrstu flokkarnir ikki eru ov stórir, og at hugsað verður fyrst um tvílæraraskipan, áðrenn stig verða tikin til at býta flokkin í tveir

flokkar, men sjálvsagt veldst hetta eisini um, hvussu nógvir næmingar verða í flokkinum, og hvussu flokkurin er samansjóðaður.

Byrjanarundirvísingin setur serlig krøv til floksstødd og tvílæraraskipan, men tað eru eisini bæði í miðdeild og hádeild, at tørvur er á tvílæraraskipan ella eyka lærarartímum í flokkunum. Eitt annað, sum eisini ger seg galdandi, eru lærugreinir, har partar av undirvísingini eru uttandura í fjøruni, áum, í bø og haga, og sum krevja verkligar royndir. Hetta er serliga í náttúru og tøkni og alisfrøði og evnafrøði. Her eiga fyriskipanir at verða gjørdar, so at næmingarnir eins og í handaligu lærugreinunum verða býttir í bólkar við á leið 12 næmingum.

### 9.1. Floksstødd hevur týdning fyri úrtøkuna hjá næminginum og trivnaðin

Um hugt verður eftir kanningum úr øðrum londum, so sæst, at tað er ymiskt, hvørji tilmæli eru viðvíkjandi floksstødd. Sambært Hattie (2009) so verður úrtøkan hjá næmingunum ávirkað positivt í einum minni flokki, men munurin er so mikið lítil, at mælt verður ikki til at gera tær stóru íløgurnar, tí tað eru onnur viðurskifti, sum eru munabetri. Víst verður á, at ein orsøk til, at munurin er so lítil, er, at lærarar undirvísa á sama hátt í stórum sum í smáum flokkum og tí ikki gagnnýta møguleikarnar, ið eru at hava færri næmingar í flokkunum. Tá ið Hattie tosar um at minka um floksstøddina, so er talan um at broyta næmingatalið frá 25-30 næmingum til 15-20 næmingar. Hattie heldur, at munabetri átøk snúgva seg í stóran mun um læraran og undirvísingarhættir, so sum tignin hjá læraranum, formativar afturmeldingar, ella sum sagt er í Hattie (2012): *Lærarar mugu vera tilvitaðir um, hvat hvør einstakur næmingur í teirra flokki hugsar og veit, og lærarin má megna at gagnnýta hesa vitan um næmingarnar; umframt at hava nøktandi vitan og fatan av lærugreinini, so at teir kunnu veita meiningsfullar og hóskandi afturboðanir við tí úrsliti, at hvør næmingur ger framstig í førleikakrøvunum, sum lýst eru í námsætlanunum*. Hesi krøv til læraran krevja bæði hóskandi næmingatal, skipan av flokkinum og hóskandi útbúgving/eftirútbúgving.

Týdningurin, sum førleikin hjá lærarum hevur, er tó ikki nøkur nýggj vitan. Í árunum 1985-1990 varð ein stór kanning gjørd í Tennessee (USA), har kannað varð, hvørja ávirkan lutfallið millum næmingar og lærarar hevði á úrtøkuna og menningina hjá næmingunum. Kanningin varð gjørd í stórum parti av statinum, har tey kannaðu barnagarðsflokkar og 1.-3. flokk. Í smáum flokkum var lutfallið 13-17 næmingar fyri hvønn lærara, meðan í vanligum flokkum var lutfallið 22-25 næmingar fyri hvønn lærara, og vanligir flokkar við lærarastuðli høvdu eisini 22-25 næmingar saman við lærara og stuðli. Tað vísti seg, at í nógvum førum, men ikki øllum, har stóðu næmingarnir í smærru flokkunum seg betri í royndum. Tá hugt varð eftir lærarafórleikunum, vísti tað seg at vera heilt sannførandi, at ein

góður lærari fekk uppaftur meira burturúr, um hann arbeiddi við einum minni flokki, eisini tá ið samanborið varð við teir flokkar, har stuðul var inni í flokkinum (Word et al., 1990).

Á heimasíðuni hjá CPE, Center for Public Education, sum er stovnur undir NSBA, ið er felagsskapur fyri skúlastýri í USA, hava tey gjørt eina samanbering av nøkrum kanningum um floksstødd í skúlum, har arbeitt verður við at skipa smærri flokkar í innskúlingini. Kanningarnar ganga yvir fleiri ár fyri at vita, hvørji úrslitini ella ágóðarnir eru av at lækka næmingatalið í flokkunum, og samanborið verður við skúlar, ið halda fram við stórum flokkum. Málið er, at næmingarnir skulu fáa meira burturúr bæði fakliga og sosialt. Sum dømi verður víst á tvær av hesum kanningum, STAR prosjektið í Tennessee, sum byrjaði í 1985, har fyrsta stigið í kanningini er umrøtt omanfyri og SAGE prosjektið í Wisconsin, sum byrjaði í 1996.

Úrslitini í fyrsta stigi vóru m.a. sambært Olav Absalonsen í grein í Miðnámsriti í 2016*: „Eftir 4 árum var greitt, at smáir flokkar førdu til munandi meiri læring, og at fyrimunurin við smáum flokkum var dupult so stórur fyri børn í samfelagsligum minnilutum (Jayne Boyd-Zaharias). Eisini vísti kanningin, at gentur høvdu størri fyrimun av at vera í smáum flokkum enn dreingir. Nyttan av at hava ein hjálparlærara í einum vanligum flokki var einans 35% av nyttuni av at hava smáar flokkar við einum lærara í hvørjum (Frederick Mosteller*).“

Annað stigið í STAR byrjaði í 1989, har kannað varð, um teir fyrimunir, sum vórðu staðfestir á fyrsta stigi, stóðu við. Her vísti tað seg, at næmingar, sum byrjaðu skúlagongdina í smáum flokkum, og sum síðani fóru í størri flokkar, hildu fram at klára seg betur enn floksfelagar, sum byrjaðu skúlagongdina í størri flokkum. Triðja stigið í STAR var at geva teimum 17 fátækastu skúlaøkjunum í Tennessee smáar flokkar frá forskúla til triðja flokk. Eftir hetta fóru tey 17 skúlaøkini frá at vera langt undir miðal í lesing og støddfrøði til at vera oman fyri miðal av teimum 139 skúlaøkjunum í Tennessee (Absalonsen eftir Frederick Mosteller).

SAGE prosjektið nýtti 4 sløg av smáum floksstøddum:

- 15 næmingar við einum lærara
- 30 ella færri næmingar í einum flokki við tveimum lærarum
- Ein skúlastova við skilaveggi, har 15 næmingar við einum lærara vóru hvørjumegin veggin
- 30 næmingar við einum lærara, men við einum lærara afturat í lesing, máli, list og støddfrøði

SAGE kom til niðurstøður, ið líktust niðurstøðunum í STAR kanningini um at minka floksstøddirnar tey fyrstu skúlaárini. Næmingar í SAGE

flokkum fingu munandi betri úrslit í lesing, máli, støddfrøði og sum heild, enn næmingar í vanligum flokkum høvdu. Sjálvt um SAGE næmingar høvdu verri avrik undan kanningini, enn næmingarnir í størri flokkum, so høvdu SAGE næmingar munandi betri avrik eftir kanningina. Niðurstøðan var, at næmingar í minnu flokkunum gjørdu størri framstig enn næmingar í vanligum flokkum.

Síðan kanningina í Tennessee hava verið greiningar av, hvørt kanningarúrslitini vóru ein løtumynd, sum fánaði burtur aftur við árunum, ella um tað, at næmingar í 1.-3. flokki høvdu verið í smáum flokkum, var nóg mikið til, at tey eisini seinnu stóðu seg betri. Niðurstøðan er, at allir næmingar hava gagn av at vera í smáum flokkum í innskúlingini, og sæst hetta eisini aftur, tá ið tey koma í 8. flokk. Munurin millum besta og veikasta næmingin minkar tó ikki, men miðal fyri allan flokkin verður betri (Konstantopoulos & Chung, 2009).

Hesar kanningarnar eru úr USA, men seinni eru líknandi kanningar gjørdar í Evropiskum londum, har millum annað eisini danskir skúlar eru kannaðir, frá 2. til 8. flokk. Í donsku kanningini høvdu tey ikki møguleika á sama hátt sum í amerikansku kanningini at stýra næmingatalinum í flokkunum, men greiningarnar vísa tó, at størsta gagnið við smáum flokkum er í grund- og miðdeild, meðan ikki sama gagn sæst í hádeild. Danska kanningin vísir á, at úrtøkan ikki er so stór, og tí heldur Nandrup (2016), at ein eyka lærari kundi verið ein fíggjarliga skilabetri loysn heldur enn at minka flokkarnar.

Tað eru ikki serliga nógvar kanningar, ið á ein skipaðan og samanberandi hátt hava kannað ávirkanina, ið floksstødd hevur á úrtøkuna hjá næmingunum. Hetta var megin niðurstøðan í einari kanning, sum eitt danskt toymi kom til í einari greining av tí, sum er skrivað um spurningin. Aðrar niðurstøður vóru, at tað er serliga innan lesiførleika, at tað ger mun at minka floksstøddina, men tey vísa eisini á, at kostnaðurin stendur kanska ikki mát við øktu úrtøkuna, og at tað tí er týdningarmikið at kanna nærri sambandið millum floksstødd og úrtøku, og hvørja ávirkan floksstøddin hevur á, hvat lærarar og næmingar gera í flokshølinum fyri at gera av, hvussu peningurin best verður brúktur (Filges et al., 2018).

Viðvíkjandi tí fíggjarliga partinum, so er ein áhugaverd svensk kanning gjørd, har tey hava greinað almennar skrásetingar fyri nógv ár, m.a. skúladátur, kommunudátur, soldátardátur og lønardátur, og hesar greiningar vísa, at næmingar, sum hava gingið í smærri flokkum, oftari eru betri fyri, og at hesin fyrimunur stendur við, soleiðis at tey sum vaksin hagfrøðiliga kunnu væntast at hava 3,4% hægri inntøku, og harvið er niðurstøðan, at tað at minka floksstøddina frá 25 niður í 20 næmingar er ein íløga, sum loysir seg samfelagsliga (Fredriksson et al., 2012).

Ongar skipaðar føroyskar kanningar eru gjørdar um floksstødd, og hvørja úrtøku næmingarnir fáa. Hetta er tó eitt arbeiði, sum ber væl til at gera við støði í landsroyndum, PISA kanningum og próvtøkuúrslitum annars. Kanningar aðrastaðni siga, at næmingarnir í smærru flokkum (15-23 næmingar) fáa í miðal 0,5 próvtal hægri enn í flokkum, har næmingatalið er 24 ella hægri (Harryson, 2020).

Floksstøddin hevur eisini týdning fyri, hvussu nógvan pening tað almenna nýtir til skúlar og útbúgving. Tá ið avgerðir skulu takast um floksstødd, mugu hesi bæði atlit vigast upp móti hvørjum øðrum. Tað er lætt at rokna út, hvussu nógv meira fleiri og smáir flokkar kosta enn fáir og stórir. Men tað er ikki líka lætt at finna út av, hvussu nógv meira ella minni, næmingurin hevði fingið burturúr, um flokkurin, hann gongur í, hevði havt eina aðra stødd.

## 9.2. Ábendingar um meira happing í smærri flokkum

Í kanningunum um happing í fólkaskúlanum frá 2015 og 2019 verður víst á, at fleiri næmingar í teimum smærru skúlunum siga seg vera fyri happing, enn næmingar í teimum størru skúlunum. Hetta verður tó ikki sett beinleiðis í samband við floksstødd, hóast vit vita, at nógvir av teimum stóru flokkunum í føroysku fólkaskúlunum eru í teimum stóru skúlunum.

Í kanningini frá 2019 verður víst á, at tað eru viðurskifti so sum floksmentan, næmingaráð, arbeiðsfriður og samanhald, sum gera munin á stórum skúlum í mun til smærri skúlar, og víst verður á, at næmingar, sum ganga í stórum skúlum, hava fleiri møguleikar fyri at finna vinir og at luttaka í bólkum, har tey kenna seg heima (Kák et al., 2019). Hetta er í fullum samsvari við líknandi kanningar, sum m.a. Garandeau et al. (2019) framdu, har tey vísa á, at størri flokksstødd hevur víst seg at hava samband við færri hendingar við happing, bæði slíka sum næmingar siga er framd móti teimum, og sum tey siga, at tey hava framt móti øðrum, og har hinir næmingarnir siga, at happing er farin fram. Víst verður eisini á, at hetta er rættiliga samansett, krevur fleiri kanningar, men at smærri floksstøddir verja ikki móti ágangi frá hinum næmingunum.

## 9.3. Niðurstøða

Floksstøddin er eitt fyribrigdi, sum spælir upp á fleiri streingir. Samstundis sum kanningar vísa, at næmingarnir hava betri møguleika fyri at fáa meira burtur úr skúlagongdini, um teir ganga í einum minni flokki við 20 næmingum ella færri, so eru fleiri onnur atlit at taka, m.a. floksleiðsla, lærarafø rleikar og skúlamentan. Sostatt er niðurstøðan, at eitt átak at minka um floksstøddina sum eitt einstakt átak ger mun, men virknaðurin er munandi størri, um tað er partur av einari heildarbroyting, har dentur bæði verður lagdur á úrtøkuna hjá næminginum og trivnaðin.

Á fundi við politiska fylgibólkin var eisini komið inn á hesi viðurskifti, har m.a. varð víst á, at í ov stórum flokkum er vandi fyri, at ov nógv børn detta niður ímillum og tí fáa tørv á eyka hjálp. Tað er sera trupult hjá lærarunum at skapa eitt læriumhvørvi, har allir næmingar verða sæddir og stuðlaðir, og tað gongur út yvir trivnaðin. Vit síggja dagliga, at fleiri næmingar hava trupult við at koma í skúla, heilt niður í grunddeildina. Í stórum flokkum er minni tíð til einstaka barnið og at skapa góðar relatiónir, sum eru av alstórum týdningi fyri læring og trivnað hjá næmingunum.

Tað er trupult í stórum flokkum at skipa eina undirvísing, sum gevur næmingunum møguleika at undrast, samstarva og skapa. Flokslærarauppgávan er sera stór, og verður flokslæraraleikluturin tí ofta avbera krevjandi og tungur. Skjótt er til, at lærarar brenna út ella halda seg aftur. Og tíverri er hetta ein sannroynd, at lærarar velja flokslæraraarbeiðið frá, eitt arbeiði, sum er so umráðandi og lívsjáttandi, tá ið tað gongst væl.

## 9.4. Tilmæli II. Floksstødd

Mælt verður til:

- at § 20 verður broytt, soleiðis at floksstøddin við skúlaársbyrjan verður í tráð við námsfrøðiliga gransking, har 20 næmingar í flokkunum er best hóskandi fortreyt fyri námsfrøðiliga, trivnaðarliga og fakliga menning. Byrjað verður við broyttu floksstøddini í 1. flokki. Skipanin verður gjøgnumførd eftir níggju árum.
- at heimilað verður skúlaleiðaranum at taka støðu til, um nýtt floksbýti verður gjørt í innskúlingini, tá ið næmingatalið er hægri enn 20, ella sett verður inn við tvílæraraskipan.
- at játtanarskipanin verður broytt samsvarandi, so tað í 1.-3. flokki er 21. næmingurin, sum útloysir játtan til tveir flokkar.
- at verandi flokkar í mið- og hádeild halda fram óbroyttir til 9. flokk, men at tímar verða játtaðir til tveir flokkar, tá ið næmingatalið í hesum flokkum er 25 og fleiri.
- at móttøkuskúlar, sum taka ímóti næmingum í 7. ella. 8. flokki fremja floksbýti við grundarlag í 20 næmingum í flokkinum, men hædd verður samstundis tikin fyri hølisligu umstøðunum. Eru fleiri enn 20 næmingar í flokkunum, verður sett inn við tvílæraraskipan.
- at skúlaleiðarin við støði í hølisviðurskiftunum og í samráð við skúlamyndugleikarnar á staðnum tekur støðu til floksbýti og tvílæraraskipan í verandi flokkum í 2.-9. flokki.

## 9.5. Flokkatal og kostnaður

Útrokningin er grundað á næmingatølini skúlaárið 2022-23, har roknað verður við sjeyflokkaðum skúlum, sum eru skúlar, ið hava fleiri enn 114 næmingar í 1.-7. flokki og sostatt hava fult floksbýti. Umleið 80

% av næmingunum ganga í teimum sjey flokkaðu skúlunum. Galdandi tvílæraraskipan í 1. og 2. flokki og P-fak skipan (bólkastødd við 12 næmingum í handaverk og list) eru tiknar við í útrokningina. Kostnaðurin verður roknaður í mun til økta talið á lærarum. Meirútreiðslan er roknað sum munur á pultstímum í verandi skipan samanborið við pultstímar, tá ið næmingatalið í flokkunum er 22, 20 ella 18 næmingar og býtt við 24 tímum, sum er miðal undirvísingartímatal hjá lærarum. Hetta er økta læraratalið, sum verður faldað við kostnaðinum fyri eitt ársverk, sum er kr. 500.000.

**Talva 1. Verandi skipan og játtanargrundarlag**

| **Tímabýtið 2022-23** | | | **26 næmingar + eyka fyri fl. yvir 24 næm.** | | **Tímar** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Skúlar:** | **1.-9. fl.** | **10. fl.** | **Næmingar** | **Tímar** | **pr. næm.** |
| Skúlin á Fløtum | 32 | | 745 | 1.168 | 1,57 |
| Skúlin á Skúlatrøð | 28 | 3 | 678 | 1.072 | 1,58 |
| Eysturskúlin | 16 | 8 | 505 | 777 | 1,54 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 17 | | 387 | 621 | 1,61 |
| Runavíkar kommunuskúli | 20 | 2 | 421 | 751 | 1,78 |
| Skúlin á Argjahamri | 18 | | 386 | 648 | 1,68 |
| Hoyvíkar skúli | 17 | | 339 | 580 | 1,71 |
| Sankta Frans skúli | 14 | | 333 | 517 | 1,55 |
| Skúlin á Giljanesi | 16 | 1 | 281 | 541 | 1,92 |
| Fuglafjarðar skúli | 14 | 1 | 282 | 511 | 1,81 |
| Skúlin í Eysturkommunu | 14 | | 244 | 448 | 1,83 |
| Tvøroyrar skúli | 10 | 1 | 203 | 367 | 1,81 |
| Tofta skúli | 9 | 1 | 203 | 340 | 1,67 |
| Skúlin við Streymin | 11 | 1 | 197 | 399 | 2,02 |
| Vágs skúli | 9 | 1 | 215 | 344 | 1,60 |
| | 245 | 18 | 5419 | 9083 | 1,68 |

Tað er bara Tórshavn, sum hevur fleiri sjálvstøðugar sjeyflokkaðar skúlar, og sostatt í ávísan mun kann regulera innskrivingina. Í Tórshavn eru 6 sjeyflokkaðir skúlar, og er samlaða tímajáttanin í dag til hesar skúlar 4.311 tímar. Sum eitt hugsað dømi, har Tórshavn var eitt upptøkuøki, og næmingatalið í flokkunum var 24 næmingar sambært § 20 í fólkaskúlalógini, so hevði tímajáttanin verið 4.133 tímar, sum er ein lækking á 178 tímar í mun til í dag. Hetta svarar til 7, 42 størv, sum er á leið 3.7 mió. kr.

Flokkatalið hevði við eini floksstødd á 24 næmingar minkað við 5 flokkum frá 114 flokkum í dag til 109 flokkar. Kostnaðurin fyri hvønn flokk er ikki tann sami í grund-, mið- og hádeild, og tí verður roknað við kostnaðinum

fyri størv, heldur enn fyri flokk. Tað er rættiliga ymiskt frá skúla til skúla í hvørjum árgangum, flokkatalið økist, og er talan um økt flokkatal í 3.-9. flokki, so er eingin tvílæraraskipan í hesum árgangum. Tvílæraraskipanin er tann, sum útloysir flest eyka tímar í flokkunum, og er hon bara galdandi fyri 1. og 2. flokk, og tá ið næmingatalið er 18-26 næmingar í flokkunum.

### 9.6. Kostnaður í mun til flokkatal

Talvurnar niðan fyri vísa flokkatalið og øktan kostnað, tá ið tað eru ávikavist 22, 20 ella 18 næmingar í flokkunum. Tá eru tað ávikavist 23., 21. og 19. næmingurin, sum útloysa játtan til nýggjan flokk. Vit síggja, at flokkatalið fyri alt landið økist munandi, tá ið næmingatalið í hvørjum flokki lækkar. Hesi dømi vísa økta flokkatalið, um næmingatalið verður broytt í allari skipanini samstundis frá 1.-9. flokk. Hetta er tó ikki ætlanin, og heldur ikki møguligt hvørki fíggjarliga, starvsfólkaliga ella hølisliga, og eisini hava næmingar rætt at ganga í sínum heimaflokki til ávísan aldur. Tilmælið hjá arbeiðsbólkinum er, at byrjað verður við 1. flokki skúlaárið 2024-25, og so verða skipanin sett í verk ár fyri ár í níggju ár.

Í øllum dømunum verður eisini víst á kostnaðin, um Tórshavn var eitt innskrivingarøki. Henda samanbering er gjørd, tí tað er bara Tórshavn, sum hevur fleiri sjeyflokkaðar skúlar, har møgulig samskipan kundi verið gjørd, men Tórshavnar kommuna hevur eisini onnur atlit, sum hon skal taka fyrilit fyri, m.a. hvar næmingarnir búgva, og um teir hava systkin í skúlanum.

Í verandi skipan við í mesta lagi 26 næmingum í flokkunum,
er flokkatalið 245 flokkar.
Eru 22 næmingar í flokkunum frá 1.-9. flokk, økist flokkatalið við 51 flokkum
Eru 20 næmingar í flokkunum frá 1.-9. flokk, økist flokkatalið við 75 flokkum
Eru 18 næmingar í flokkunum frá 1.-9. flokk, økist flokkatalið við 101 flokki

**Talva 2. Kostnaður, tá ið 22 næmingar eru í flokkunum**

| **2022-23** | **22 næmingar** | | | **Økt flokka- og tímatal** | | | **Tímar** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skúlar | **flokkar 1-9** | **10. fl.** | **Tímar** | **1.-9. fl.** | **10. fl.** | **tímar** | **pr. næm.** |
| Skúlin á Fløtum | 38 | - | 1.293 | 6 | - | 125 | 0,74 |
| Skúlin á Skúlatrøð | 33 | 2 | 1.152 | 5 | - | 80 | 1,70 |
| Eystsurskúlin | 20 | 9 | 900 | 4 | 1 | 123 | 1,78 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 23 | - | 747 | 6 | - | 125 | 1,93 |
| Runavíkar kommunuskúli | 21 | 2 | 752 | 1 | - | 1 | 1,79 |
| Skúlin á Argjahamri | 23 | - | 735 | 5 | - | 87 | 1,90 |
| Hoyvíkar skúli | 20 | - | 640 | 3 | - | 60 | 1,89 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Sankta Frans skúli | 20 | - | 609 | 6 | - | 92 | 1,83 |
| Skúlin á Giljanesi | 18 | 1 | 587 | 2 | - | 46 | 2,09 |
| Fuglafjarðar skúli | 17 | 1 | 582 | 3 | - | 71 | 2,06 |
| Skúlin í Eysturkommunu | 14 | - | 448 | - | - | 0 | 1,83 |
| Tvøroyrar skúli | 11 | 1 | 393 | 1 | - | 26 | 1,94 |
| Tofta skúli | 12 | 1 | 426 | 3 | - | 86 | 2,10 |
| Skúlin við Streymin | 14 | 1 | 479 | 3 | - | 80 | 2,43 |
| Vágs skúli | 12 | 1 | 455 | 3 | - | 111 | 2,12 |
| Økt flokka- og tímatal | 296 | 19 | 10.198 | 51 | 1 | 1.115 | 1,88 |
| Kostnaður, um nækmingatalið verður 22 næm. í 1.- 9. fl. | | | | 23.2 mió. kr | | | |

Verður næmingatalið í flokkunum lækkað til 22 næmingar, so økist flokkatalið fyri alt landið við 51 flokkum, um skipanin varð sett í verk fyri allar flokkar samstundis. Pultstímatalið, sum er grundarlag undir kostnaðarmetingini, økist frá 9083 tímum í verandi skipan til 10.198 tímar.

Kostnaðurin at lækka næmingatalið til 22 næmingar er munurin á pultstímum millum verandi skipan og við 22 næmingum í flokkunum, 10.198 - 9.083=1115 tím/24 tím x 500.000. Samlaði kostnaðurin verður 23.2 mió. kr., um næmingatalið verður lækkað til 22 næmingar í 1.-9. flokki. Var broytingin sett í verk eftir níggju árum, hevði árligi kostnaðurin verið 2.6 mió. kr.

Um Tórshavn var eitt upptøkuøki, er sparingin í Havnini við í mesta lagi 22 næmingum í flokkunum: Tímatalið, um roknað verður við 22 næmingum í flokkunum eftir skipanini í dag, er 4.923 tímar, og er Tórshavn eitt upptøkuøki, so verður tímatalið 4.402. Hetta er ein lækking í tímatali á 521 tímar, sum umroknað til størv og kostnað er 10.86 mió. kr. Kostnaðurin at lækka til 22 næmingar í hvørjum flokki fyri alt landið er 23.2 mió. kr., men um Tórshavn verður gjørd til eitt upptøkuøki, so eru 10.86 mió. kr. at vinna, og tá hevði meirkostnaðurin verið 23.2-10.86=12.4 mió. kr.

**Talva 3. 20 næmingar í flokkunum**

| 2022-23 | | | 20 næmingar | Økt flokka- og tímatal | | | Tímar |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Skúlar** | **1.-9. fl.** | **10. fl.** | **Tímar** | **1.-9. fl.** | **10. fl** | **tímar** | **pr. næm.** |
| Skúlin á Fløtum | 42 | - | 1.403 | 10 | - | 235 | 1,88 |
| á Skúlatrøð | 37 | 2 | 1.269 | 9 | - | 197 | 1,87 |
| Eysturskúlin | 20 | 10 | 930 | 4 | 2 | 153 | 1,84 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 23 | - | 747 | 6 | - | 125 | 1,93 |
| Runavíkar skúli | 21 | 2 | 752 | 1 | - | 1 | 1,79 |
| Skúlin á Argjahamri | 25 | - | 758 | 7 | - | 110 | 1,96 |
| Hoyvíkar skúli | 22 | - | 702 | 5 | - | 122 | 2,07 |
| Sankta Frans skúli | 21 | - | 632 | 7 | - | 115 | 1,90 |
| Skúlin á Giljanesi | 18 | 1 | 587 | 2 | - | 46 | 2,09 |
| Fuglafjarðar skúli | 17 | 1 | 582 | 3 | - | 71 | 2,06 |
| Skúlin í Eystur-kommunu | 15 | - | 474 | 1 | - | 26 | 1,94 |
| Tvøroyrar skúli | 15 | 1 | 502 | 5 | - | 134 | 2,47 |
| Tofta skúli | 17 | 1 | 553 | 8 | - | 213 | 2,72 |
| Skúlin við Streymin | 14 | 1 | 479 | 3 | - | 80 | 2,43 |
| Vágs skúli | 13 | 1 | 483 | 4 | - | 139 | 2,24 |
| Økt flokka- og tímatal | 320 | 20 | 10.850 | 75 | 2 | 1.767 | 2,0 |
| Kostnaður, um næmingatalið verður 20 næm. í 1.-9.fl. | | | | 36. 813 mió. kr | | | |

Vit síggja í talvuni omanfyri, talva 3, at flokkatalið økist við 75 flokkum, um skipanin varð sett í verk í øllum flokkum samstundis. Tímatalið økist til 10.850 tímar frá 9083 tímum í verandi skipan, har tað kunnu vera 26 næmingar í flokkunum, áðrenn nýggjur flokkur verður skipaður.

Kostnaðurin at lækka næmingatalið til 20 næmingar er: Munurin á pultstímum millum verandi skipan og við 20 næmingum í flokkunum 10850 - 9083. Kostnaðurin er 1767/24 tím. x kr. 500.000, sum er 36.8 mió. kr. Var broytingin sett í verk eftir níggju árum, hevði árligi kostnaðurin verið 4.1 mió. kr.

Um Tórshavn var eitt upptøkuøki, er sparingin í Havnini við í mesta lagi 20 næmingum í flokkunum: Tímatalið, um roknað verður við 20 næmingum í flokkunum eftir skipanini í dag, er 5.171 tímar, og er Tórshavn eitt upptøkuøki, so verður tímatalið 4.671. Hetta er ein lækking í tímatali á 500 tímar, sum umroknað til størv og kostnað er 10.421mió. kr. Kostnaðurin at lækka til 20 næmingar í hvørjum flokki fyri alt landið er 36.821 mió. kr.,

men um Tórshavn verður gjørd til eitt upptøkuøki, so eru 10.421 mió. kr. at vinna, og tá hevði meirkostnaðurin verið 36.821-10.421=26.400 mió. kr.

Útrokning er eisini gjørd fyri 18 næmingar í flokkunum fyri at hava eitt samanberingargrundarlag, sum vísir, hvussu broytingin í kostnaði økist í mun til flokksstødd. Eisini tí at fleiri vísa á, at 18 næmingar er ein hóskandi flokksstødd serliga í byrjanarundirvísingini. Arbeiðsbólkurin mælir til flokksstødd á 20 næmingar og at seta inn við tvílæraraskipan og samlæring.

**Talva 4. 18 næmingar í flokkunum**

| 2022-23 | 18 Næmingar | | | Økt flokka- og tímatal | | | Tímar |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Skúlar** | **1.-9. fl.** | **10. fl.** | **Tímar** | **1.-9. fl.** | **10. fl.** | **tímar** | **pr. næm.** |
| Skúlin á Fløtum | 45 | - | 1.451 | 13 | - | 283 | 1,95 |
| á Skúlatrøð | 38 | 3 | 1.324 | 10 | 1 | 252 | 1,95 |
| Eysturskúlin | 22 | 11 | 1.011 | 6 | 3 | 234 | 2,00 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 25 | - | 796 | 8 | - | 174 | 2,06 |
| Runavíkar skúli | 28 | 2 | 942 | 8 | - | 191 | 2,24 |
| Skúlin á Argjahamri | 26 | - | 818 | 8 | - | 170 | 2,12 |
| Hoyvíkar skúli | 23 | - | 739 | 6 | - | 159 | 2,18 |
| Sankta Frans skúli | 21 | - | 632 | 7 | - | 115 | 1,90 |
| Skúlin á Giljanesi | 19 | 1 | 610 | 3 | - | 69 | 2,17 |
| Fuglafjarðar skúli | 18 | 2 | 649 | 4 | 1 | 138 | 2,30 |
| Skúlin í Eysturkommunu | 18 | - | 528 | 4 | - | 80 | 2,16 |
| Tvøroyrar skúli | 15 | 1 | 502 | 5 | - | 134 | 2,47 |
| Tofta skúli | 17 | 1 | 545 | 8 | - | 205 | 2,68 |
| Skúlin við Streymin | 14 | 1 | 479 | 3 | - | 80 | 2,43 |
| Vágs skúli | 17 | 1 | 584 | 8 | - | 240 | 2,72 |
| Økt flokka- og tímatal | 346 | 23 | 11.609 | 101 | 5 | 2.526 | 2,14 |
| Kostnaður, um næmingatalið verður 18 næm. í 1.-9.fl. | | | | 52.6 mió. kr | | | |

Sambært talvu 4, so økist flokkatalið við 101 flokki, um skipanin varð sett í verk í øllum flokkum samstundis. Tímatalið økist til 11.609 tímar frá 9083 tímum í verandi skipan, har tað kunnu vera 26 næmingar í flokkunum, áðrenn nýggjur flokkur verður skipaður.

Kostnaðurin at lækka næmingatalið til 18 næmingar er: Munurin á pultstímum millum verandi skipan og við 18 næmingunum í flokkunum er 11.609 - 9.083. Kostnaðurin er 2.526 tímar/24 tímum x 500.000, sum er 52.6 mió. kr. Var broytingin sett í verk eftir níggju árum, hevði árligi kostnaðurin verið 5.8 mió. kr.

Um Tórshavn var eitt upptøkuøki, er sparingin í Havn við í mesta lagi 18 næmingum í flokkunum: Tímatalið, um roknað verður við 18 næmingum í flokkunum eftir skipanini í dag, er 5.446 tímar, og er Tórshavn eitt upptøkuøki, so verður tímatalið 5.337 tímar. Hetta er ein lækking í tímatali á 109 tímar, sum umroknað til størv og kostnað er 2.3 mió. kr. Kostnaðurin at lækka til 18 næmingar í hvørjum flokki fyri alt landið er 52.6 mió. kr., men um Tórshavn verður gjørd til eitt upptøkuøki, so eru 2.3 mió. kr. at vinna, og tá hevði meirkostnaðurin verið 52.6-2.3=50.3 mió. kr.

**Talva 5. Samanumtøka flokkar og kostnaður**

| Floksstødd | Flokkar | Øking | Tímar | Øking | Kostnaður mió. kr. | Um árið mió. kr. |
|---|---:|---:|---:|---:|---:|---:|
| 26 næm | 245 | 00 | 9.083 | 00 | 00,00 | 00,00 |
| 22 næm | 296 | 51 | 10.198 | 1.115 | 23.2 | 2.6 |
| 20 næm | 320 | 24 | 10.851 | 1.768 | 36.8 | 4.1 |
| 18 næm | 346 | 26 | 11.609 | 2.526 | 52.6 | 5.8 |

# 10. Økt flokkatal og hølistørvur í skúlunum kring landið

Sum víst á omanfyri, so mælir arbeiðsbólkurin til, at floksstøddin í mesta lagi verður 20 næmingar, soleiðis at tímajáttan verður til tveir flokkar, tá ið næmingatalið er 21 næmingar, men at skúlin hevur ræði á, um flokkar verða býttir sundur, ella sett verður inn í flokkunum við tvílæraraskipan. Arbeiðsbólkurin hevur tó gjørt útrokningar, sum vísa hækkaða flokkatalið í skúlunum kring landið, um floksbýtið verður gjørt við 18, 19, 20, 21, 22, 23 ella 24 næmingum, har 24 næmingar er verandi áseting sambært § 20 í fólkaskúlalógini.

Hækkaða flokkatalið vísir samstundis hølistørvin í einstøku skúlunum, um tikið verður undir við tilmælinum um at broyta floksstøddina til 20 næmingar, sum í galdandi fólkaskúlalóg er 24 næmingar við skúlaársbyrjan sambært § 20 í fólkaskúlalógini, har ásett er, at við skúlaársbyrjan eigur næmingatalið vanliga ikki at fara upp um 24 næmingar í hvørjum flokkinum. Mælt verður til, at skipanin við í mesta lagi 20 næmingum í flokkunum verður sett í verk í stigum, so tað ganga níggju ár til fult flokkabýti verður gjøgnumført. Í summum førum fara skúlarnir helst at velja ikki at býta flokkar sundur, um næmingar koma afturat gjøgnum árini, men ístaðin at hava tvílæraraskipan og møguligt sundurbýti í ávísum lærugreinum.

Økta flokkatalið er ein vegleiðing hjá kommununum at meta seg eftir í sambandi við hølisviðurskiftini í skúlunum, bæði tá ið talan er um verandi skúlabygningar og nýggja skúlabyggging og eisini í sambandi við um- og uppíbygging í verandi skúlum.

Einstaka kommunan kennir best demografisku støðuna á staðnum við atliti at íbúgvatali, barnatali, tilflyting, fráflyting, arbeiðsplássum, staðseting í landinum, um tað m.a. er lætt at koma til og frá í sambandi við arbeiði og útbúgving, og um kommunan er eitt væl umtókt stað hjá fólki at búseta seg. Í sambandi við skúla verður serliga hugsað um barnafamiljur. Eysturoyartunnilin hevur m.a. skapt størri tørv á búseting kring Skálafjørðin og á Toftum, eisini stór arbeiðspláss í nærumhvørvinum gera, at tilflyting er til økið.

Talvurnar niðan fyri vísa bæði støðuna í Tórshavnar kommunu, sum hevur fleiri sjálvstøðugar skúlar, og einstøku skúlarnar í kommununum uttan fyri Havnina. Útrokningin er grundað á 7. flokkaðar skúlar, sum eru skúlar, sum hava fult flokkabýti í 1.-7. flokki. Eisini eru framhaldsskúlar, ið eru skúlar, ið hava 8.-10. flokk, tiknir við, sjálvt um teir ikki eru 7 flokkaðir.

## 10.1. Flokkatalið í skúlunum uttan fyri Tórshavn

Talvan niðan fyri vísir flokkatalið í skúlunum uttan fyri Tórshavn, um nægmingatalið í flokkunum hevði verið 18, 19, 20, 21, 22, 23 ella 24 næmingar. Vit síggja, at um tað eru 20 næmingar í flokkunum, so økjast flokkarnir við 37 flokkum, og um tað eru 22 næmingar í flokkunum, so økist talið við 22 flokkum. Arbeiðsbólkurin hevur valt at hava Kollafjarðar skúla saman við skúlunum uttan fyri Tórshavn, bæði tí at Kollafjarðar skúli ikki er ein sjey flokkaður skúli, og tí ikki er við í útrokningini fyri Tórshavn og landið sum heild, har roknað er við sjey flokkaðum skúlum, og tí at Kollafjarðar skúli kann samanberast við hinar skúlarnar uttan fyri Havnina, ið hava framhaldsdeild, men ikki eru sjey flokkaðir. Teir eru Sandoyar meginskúli, Sørvágs skúli, Stranda skúli og Hvalbiar skúli. Tað er tó Tórshavnar kommuna, ið tekur støðu til í sambandi við m.a. hølistørv, um næmingar í Tórshavn verða skrivaðir inn í skúlarnar, sum liggja í bygdunum uttan fyri Havnina. Hetta er avgerðin hjá Tórshavnar kommunu, men við regluligari busskoyring, sum er í Tórshavnar kommunu, hevði hetta møguliga borið til í eldru flokkunum.

**Talva 6. Samlað yvirlit yvir flokkatal í skúlunum uttan fyri Tórshavn**
Allar útrokningar eru gjørdar fyri 7 flokkaðar skúlar, og skúlar, sum hava framhaldsdeild, tí eru smærru skúlarnir í Tórshavnar kommunu og í kommununum uttan fyri Havnina ikki tiknir við. Næmingatølini eru frá verandi skúlaári, 2022-23, og næmingar í 10. flokki eru ikki tiknir við.

**Talva 6. Samlað yvirlit yvir flokkatal í skúlunum uttan fyri Tórshavn**

| 7 flokkaðir skúlar og skúlar, ið hava framhaldsdeild | | | | | | | | Miðal floksstødd | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Munur** | 56 | 43 | 37 | 28 | 22 | 17 | 6 | | 18,9 |
| **Flokkar tils.** | 214 | 201 | 195 | 186 | 180 | 175 | 164 | 158 | 2987 |
| **Floksstødd** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **Flokkar** | **Næm.** |
| **1. flokkur** | 22 | 19 | 19 | 18 | 18 | 17 | 16 | 16 | 304 |
| **2. flokkur** | 22 | 22 | 20 | 19 | 18 | 18 | 16 | 16 | 303 |
| **3. flokkur** | 23 | 21 | 21 | 19 | 19 | 18 | 18 | 18 | 319 |
| **4. flokkur** | 20 | 19 | 18 | 18 | 17 | 16 | 16 | 15 | 279 |
| **5. flokkur** | 23 | 22 | 21 | 20 | 20 | 19 | 17 | 16 | 312 |
| **6. flokkur** | 25 | 23 | 23 | 21 | 20 | 20 | 18 | 18 | 336 |
| **7. flokkur** | 23 | 22 | 22 | 22 | 20 | 19 | 18 | 17 | 315 |
| **8. flokkur** | 29 | 26 | 25 | 24 | 23 | 23 | 22 | 22 | 418 |
| **9. flokkur** | 27 | 27 | 26 | 25 | 25 | 25 | 23 | 20 | 401 |

Sum sæst í talvunum niðanfyri, so hevði største økingin í flokkatali verið á Skúlatrøð og í Tofta skúla við ávikavist 9 og 8 flokkum, tá ið næmingatalið í flokkunum verður 20 næmingar. Nakrir skúlar høvdu ikki havt tørv á at skipa eyka flokk, og ivasamt er, um nýggjur flokkur hevði verið skipaður í skúlum, har næmingatalið í flokkinum var millum 20 og 24 næmingar. Leiðslan hevði møguliga heldur valt tvílæraraskipan, tí ber ikki til at siga, at hækkaða flokkatalið júst krevur sama tal av flokshølum, men tað er ein ábending, sum kommunurnar kunnu miða seg eftir í sambandi við skúlabygging.

**Talva 7. Flokkar og hølistørvur á Skúlatrøð**

| á Skúlatrøð | | | | | | | | Miðal pr. flokk | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Munur** | 10 | 10 | 9 | 8 | 5 | 4 | 1 | | 22,9 |
| **flokkar tils.** | 38 | 38 | 37 | 36 | 33 | 32 | 29 | 28 | 641 |
| **Floksstødd** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **Flokkar nú** | **Næm. nú** |
| **1. flokkur** | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 3 | 3 | 71 |
| **2. flokkur** | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 3 | 3 | 72 |
| **3. flokkur** | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 3 | 3 | 3 | 69 |
| **4. flokkur** | 5 | 5 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 3 | 77 |
| **5. flokkur** | 4 | 4 | 4 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 62 |
| **6. flokkur** | 4 | 4 | 4 | 4 | 3 | 3 | 3 | **3** | 66 |
| **7. flokkur** | 4 | 4 | 4 | 4 | 3 | 3 | 3 | **3** | 64 |
| **8. flokkur** | 5 | 5 | 5 | 5 | 4 | 4 | 4 | **4** | 88 |
| **9. flokkur** | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 3 | **3** | 72 |

**Talva 8. Flokkar og hølistørvur í Fuglafjarðar skúla**

| Fuglafjarðar skúli | | | | | | | | Miðal pr. flokk | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Munur** | 4 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | | 18,8 |
| **flokkar tils.** | 18 | 17 | 17 | 17 | 17 | 16 | 16 | 14 | 263 |
| **Floksstødd** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **Flokkar nú** | **Næm. nú** |
| **1. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | 1 | 23 |
| **2. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 18 |
| **3. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 28 |
| **4. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 17 |
| **5. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 18 |
| **6. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | **2** | 28 |
| **7. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | **1** | 25 |
| **8. flokkur** | 4 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | **3** | 55 |
| **9. flokkur** | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | **1** | 51 |

**Talva 9. Flokkar og hølistørvur í Skúlanum í Eysturkommunu**

| Skúlin í Eysturkommunu | | | | | | | | Miðal pr. flokk | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Munur** | 4 | 2 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | | 17,4 |
| **flokkar tils.** | 18 | 16 | 15 | 14 | 14 | 14 | 14 | 14 | 244 |
| **Floksstødd** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **Flokkar nú** | **Næm. nú** |
| **1. flokkur** | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 37 |
| **2. flokkur** | 3 | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 39 |
| **3. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 31 |
| **4. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 31 |
| **5. flokkur** | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 37 |
| **6. flokkur** | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | **2** | 41 |
| **7. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | **2** | 28 |

**Talva 10. Flokkar og hølistørvur í Skúlanum við Streymin**

| Skúlin við Streymin | | | | | | | | Miðal pr. flokk | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Munur** | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 0 | | 17,0 |
| **flokkar tils.** | 14 | 14 | 14 | 14 | 14 | 14 | 11 | 11 | 187 |
| **Floksstødd** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **Flokkar nú** | **Næm. nú** |
| **1. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 13 |
| **2. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 3 |
| **3. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 17 |
| **4. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 13 |
| **5. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | 24 |
| **6. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | **1** | 24 |
| **7. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | **1** | 24 |
| **8. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | **2** | 36 |
| **9. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | **2** | 33 |

**Talva 11. Flokkar og hølistørvur í Runavíkar kommunuskúla**

| Runavíkar kommunuskúli | | | | | | | | Miðal pr. flokk | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Munur** | 8 | 3 | 1 | 1 | 1 | 1 | 0 | | 19,3 |
| **flokkar tils.** | 28 | 23 | 21 | 21 | 21 | 21 | 20 | 20 | 385 |
| **Floksstødd** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **Flokkar nú** | **Næm. nú** |
| **1. flokkur** | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | 3 | 3 | 3 | 37 |
| **2. flokkur** | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | 48 |
| **3. flokkur** | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 38 |
| **4. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 33 |
| **5. flokkur** | 3 | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 40 |
| **6. flokkur** | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | **2** | 37 |
| **7. flokkur** | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | **2** | 37 |
| **8. flokkur** | 4 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | **3** | 57 |
| **9. flokkur** | 4 | 4 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | **3** | 58 |

**Talva 12. Flokkar og hølistørvur í Tofta skúla**

| Tofta skúli | | | | | | | | Miðal pr. flokk | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Munur** | 8 | 8 | 8 | 5 | 3 | 2 | 1 | | 21,6 |
| **flokkar tils.** | 17 | 17 | 17 | 14 | 12 | 11 | 10 | 9 | 194 |
| **Floksstødd** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **Flokkar nú** | **Næm. nú** |
| **1. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 21 |
| **2. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 22 |
| **3. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 21 |
| **4. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 22 |
| **5. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 25 |
| **6. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 15 |
| **7. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | **1** | 23 |
| **8. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 21 |
| **9. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | **1** | 24 |

**Talva 13. Flokkar og hølistørvur í Vestmanna skúla**

| Vestmanna skúli | | | | | | | | Miðal pr. flokk | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Munur** | 2 | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | | 17,3 |
| **flokkar tils.** | 11 | 11 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 9 | 156 |
| **Floksstødd** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **Flokkar nú** | **Næm. nú** |
| **1. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 18 |
| **2. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 17 |
| **3. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 17 |
| **4. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 16 |
| **5. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 14 |
| **6. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 15 |
| **7. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 13 |
| **8. flokkur** | 2 | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 20 |
| **9. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | **1** | 26 |

**Talva 14. Flokkar og hølistørvur í Skúlanum á Giljanesi**

| Skúlin á Giljanesi | | | | | | | | Miðal pr. flokk | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Munur** | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | | 17,1 |
| **flokkar tils.** | 19 | 18 | 18 | 18 | 18 | 17 | 17 | 16 | 273 |
| **Floksstødd** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **Flokkar nú** | **Næm. nú** |
| **1. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 31 |
| **2. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 31 |
| **3. flokkur** | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 37 |
| **4. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | 2 | 23 |
| **5. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 34 |
| **6. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | **1** | 25 |
| **7. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | **2** | 31 |
| **8. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | **2** | 34 |
| **9. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | **2** | 27 |

**Talva 15. Flokkar og hølistørvur í Tvøroyrar skúla**

| Tvøroyrar skúli | | | | | | | | Miðal pr. flokk | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Munur** | 5 | 5 | 5 | 2 | 1 | 1 | 0 | | 19,1 |
| **flokkar tils.** | 15 | 15 | 15 | 12 | 11 | 11 | 10 | 10 | 191 |
| **Floksstødd** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **Flokkar nú** | **Næm. nú** |
| **1. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 18 |
| **2. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 21 |
| **3. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 21 |
| **4. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 18 |
| **5. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | 24 |
| **6. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | **2** | 28 |
| **7. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | 1 | **1** | 22 |
| **8. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 18 |
| **9. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | 11 | 3 | **1** | 21 |

**Talva 16. Flokkar og hølistørvur í Vágs skúla**

| Vágs skúli | | | | | | | | Miðal pr. flokk | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Munur** | 7 | 4 | 3 | 2 | 2 | 1 | 1 | | 19,0 |
| **flokkar tils.** | 17 | 14 | 13 | 12 | 12 | 11 | 11 | 10 | 190 |
| **Floksstødd** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **Flokkar nú** | **Næm. nú** |
| **1. flokkur** | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 19 |
| **2. flokkur** | 2 | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 20 |
| **3. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 26 |
| **4. flokkur** | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 19 |
| **5. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 23 |
| **6. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 21 |
| **7. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 18 |
| **8. flokkur** | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 19 |
| **9. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | **1** | 25 |

## Skúlar, ið ikki eru sjey flokkaðir, men sum hava framhaldsdeild

**Talva 17. Flokkar og hølistørvur í Sørvágs skúla**

| Sørvágs skúli | | | | | | | | | Miðal pr. flokk |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Munur** | 4 | 2 | 2 | 1 | 1 | 1 | 0 | | 16,8 |
| **flokkar tils.** | 13 | 11 | 11 | 10 | 10 | 10 | 9 | 9 | 151 |
| **Floksstødd** | 18 | 19 | 20 | 21 | 22 | 23 | 24 | **Flokkar nú** | **Næm. nú** |
| **1. flokkur** | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 19 |
| **2. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 21 |
| **3. flokkur** | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 19 |
| **4. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 13 |
| 5. flokkur | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 11 |
| 6. flokkur | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 13 |
| 7. flokkur | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 16 |
| 8. flokkur | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | **1** | 24 |
| 9. flokkur | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 15 |

**Talva 18. Flokkar og hølistørvur í Stranda skúla**

| Stranda skúli | **Stranda skúli er 6. flokkaður frá 1-7 fl** | | | | | | | | Miðal pr. flokk |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Munur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 0 | 0 | | 15,6 |
| **flokkar tils.** | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 9 | 9 | **9** | 140 |
| **Floksstødd** | 18 | 19 | 20 | 21 | 22 | 23 | 24 | **Flokkar nú** | Næm. nú |
| **1. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 11 |
| **2. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | **1** | 23 |
| **3. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 15 |
| **4. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 17 |
| **5. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 13 |
| **6. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 14 |
| **7. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 15 |
| **8. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 15 |
| **9. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 17 |

**Talva 19. Flokkar og hølistørvur í Sandoyar Meginskúla**

| Sandoyar Meginskúli | | | | | | | | | Miðal pr. flokk |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Munur** | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | | 15,8 |
| **flokkar tils.** | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 63 |
| **Floksstødd** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **Flokkar nú** | **Næm. nú** |
| **6. flokkur** | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 17 |
| **7. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 15 |
| **8. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 15 |
| **9. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 16 |

**Talva 20. Flokkar og hølistørvur í Kollafjarðar skúla**

| Kollafjarðar skúli | | | | | | | | Miðal pr. flokk | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Munur** | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | | 14,3 |
| **flokkar tils.** | 10 | 9 | 9 | 9 | 9 | 9 | 9 | 9 | 129 |
| **Floksstødd** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **Flokkar nú** | **Næm. nú** |
| **1. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 16 |
| **2. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 12 |
| **3. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 14 |
| **4. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 10 |
| **5. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 11 |
| **6. flokkur** | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 19 |
| **7. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 15 |
| **8. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 16 |
| **9. flokkur** | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | **1** | 16 |

**Talva 21. Flokkatal í sjeyflokkaðu skúlunum í Tórshavn**

| | 1 fl | 2 fl | 3 fl | 4 fl | 5 fl | 6 fl | 7 fl | 8 fl | 9 fl | Flokkar |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Eysturskúlin | 2 | 1 | 1 | 2 | 1 | 2 | 2 | 3 | 2 | 16 |
| Hoyvíkar skúli | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 2 | 2 | 17 |
| Sankta Frans | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | | | 14 |
| Argjahamar | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 18 |
| Skúlin á Fløtum | 3 | 4 | 3 | 3 | 2 | 3 | 3 | 5 | 6 | 32 |
| Løgmannabreyt | 1 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 17 |
| Flokkar íalt | 12 | 13 | 12 | 13 | 11 | 13 | 12 | 14 | 14 | 114 |

**Talva 22. Flokkar og hølistørvur í Tórshavn, um tað var felags innskriving**

| **Havnin í dag og samanløgd í ymsa floksstødd** | | | | | | | | Miðal pr. flokk | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Munur** | 30 | 23 | 16 | 10 | 5 | -1 | -5 | | 22,0 |
| **Flokkar** | 144 | 137 | 130 | 124 | 119 | 113 | 109 | **114** | 2510 |
| **Floksstødd** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | Flokkar | Næm. |
| **1. flokkur** | 16 | 15 | 14 | 13 | 13 | 12 | 12 | 12 | 273 |
| **2. flokkur** | 17 | 17 | 16 | 15 | 14 | 14 | 13 | 13 | 305 |
| **3. flokkur** | 14 | 13 | 13 | 12 | 12 | 11 | 11 | 12 | 247 |
| **4. flokkur** | 15 | 15 | 14 | 13 | 13 | 12 | 12 | 13 | 268 |
| **5. flokkur** | 15 | 14 | 13 | 13 | 12 | 12 | 11 | 11 | 254 |
| **6. flokkur** | 16 | 15 | 14 | 14 | 13 | 12 | 12 | 13 | 274 |
| **7. flokkur** | 16 | 15 | 14 | 14 | 13 | 12 | 12 | 12 | 276 |
| **8. flokkur** | 18 | 17 | 16 | 15 | 15 | 14 | 13 | 14 | 312 |
| **9. flokkur** | 17 | 16 | 16 | 15 | 14 | 14 | 13 | 14 | 301 |

**Talva 23. Flokkar og hølistørvur í Eysturskúlanum**

| Eysturskúlin | | | | | | | | Miðal | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Munur** | 6 | 4 | 4 | 4 | 4 | 2 | 2 | Flokkar | Næm. |
| **Flokkar tils.** | 22 | 20 | 20 | 20 | 20 | 18 | 18 | 16 | 320 |
| | | | | | | | | | Miðal 20,0 |
| **Floksstødd** | 18 | 19 | 20 | 21 | 22 | 23 | 24 | | |
| **1. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 36 |
| **2. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 26 |
| **3. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 25 |
| **4. flokkur** | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 38 |
| **5. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | 1 | 23 |
| **6. flokkur** | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 38 |
| **7. flokkur** | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | 2 | 46 |
| **8. flokkur** | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 53 |
| **9. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 35 |

**Talva 24. Flokkar og hølistørvur í Hoyvíkar skúla**

| **Munur** | 6 | 5 | 5 | 3 | 3 | 1 | 0 | Flokkar | Næm. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Flokkar tils.** | 23 | 22 | 22 | 20 | 20 | 18 | 17 | 17 | 339 |
| | | | | | | | | | Miðal 19,9 |
| **Floksstødd** | 18 | 19 | 20 | 21 | 22 | 23 | 24 | | |
| **1. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 36 |
| **2. flokkur** | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | 2 | 45 |
| **3. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 35 |
| **4. flokkur** | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 41 |
| **5. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 33 |
| **6. flokkur** | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | 2 | 46 |
| **7. flokkur** | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | 24 |
| **8. flokkur** | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 42 |
| **9. flokkur** | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 37 |

**Talva 25. Flokkar og hølistørvur í Sankta Frans skúla**

| **Munur** | 7 | 7 | 7 | 7 | 6 | 5 | 2 | Flokkar | Næm. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Flokkar** | 21 | 21 | 21 | 21 | 20 | 19 | 16 | 14 | 333 |
| | | | | | | | | | Miðal 23,8 |
| **Floksstødd** | 18 | 19 | 20 | 21 | 22 | 23 | 24 | | |
| **1. flokkur** | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 51 |
| **2. flokkur** | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | 48 |
| **3. flokkur** | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | 44 |
| **4. flokkur** | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 49 |
| **5. flokkur** | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | 48 |
| **6. flokkur** | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | 2 | 46 |
| **7. flokkur** | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | 47 |

**Talva 26. Flokkar og hølistørvur í skúlanum á Argjahamri**

| Munur | 8 | 6 | 6 | 6 | 5 | 3 | 1 | Flokkar | Næm. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Flokkar | 26 | 24 | 24 | 24 | 23 | 21 | 19 | 18 | 386 |
| | | | | | | | | | Miðal 21,4 |
| Floksstødd | 18 | 19 | 20 | 21 | 22 | 23 | 24 | | |
| 1. flokkur | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | 47 |
| 2. flokkur | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | 48 |
| 3. flokkur | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 37 |
| 4. flokkur | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 34 |
| 5. flokkur | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 49 |
| 6. flokkur | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | 43 |
| 7. flokkur | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | 2 | 46 |
| 8. flokkur | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | 2 | 45 |
| 9. flokkur | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 37 |

**Talva 27. Flokkar og hølistørvur í skúlanum á Fløtum**

| Skúlin á Fløtum | | | | | | | | | Miðal pr. flokk |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Munur | 13 | 12 | 10 | 9 | 6 | 6 | 1 | | 23,3 |
| Flokkar tils. | 45 | 44 | 42 | 41 | 38 | 38 | 33 | Flokkar | Næm. |
| Floksstødd | 18 | 19 | 20 | 21 | 22 | 23 | 24 | 32 | 745 |
| 1. flokkur | 5 | 5 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 3 | 77 |
| 2. flokkur | 6 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 4 | 4 | 93 |
| 3. flokkur | 4 | 4 | 4 | 4 | 3 | 3 | 3 | 3 | 66 |
| 4. flokkur | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 3 | 3 | 72 |
| 5. flokkur | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | 48 |
| 6. flokkur | 4 | 4 | 4 | 4 | 3 | 3 | 3 | 3 | 64 |
| 7. flokkur | 4 | 4 | 4 | 4 | 3 | 3 | 3 | 3 | 64 |
| 8. flokkur | 7 | 7 | 6 | 6 | 6 | 6 | 5 | 5 | 119 |
| 9. flokkur | 8 | 8 | 8 | 7 | 7 | 7 | 6 | 6 | 142 |

**Talva 28. Flokkar og hølistørvur í skúlanum við Løgmannabreyt**

| Munur | 8 | 7 | 6 | 6 | 6 | 5 | 5 | Flokkar | Næm. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Flokkar tils. | 25 | 24 | 23 | 23 | 23 | 22 | 22 | 17 | 387 |
| Floksstødd | 18 | 19 | 20 | 21 | 22 | 23 | 24 | | Miðal 22,8 |
| 1. flokkur | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 26 |
| 2. flokkur | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 | 2 | 45 |
| 3. flokkur | 3 | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 40 |
| 4. flokkur | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 34 |
| 5. flokkur | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 53 |
| 6. flokkur | 3 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 37 |
| 7. flokkur | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 49 |
| 8. flokkur | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 53 |
| 9. flokkur | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 2 | 50 |

# 11. Fjølbroytt læring og arbeiðshættir

Menningin stendur ikki í stað, og nýggj vitan er ein partur av gerandisdegnum. Skúlans uppgáva er tí ikki bara at tryggja, at næmingarnir ogna sær ávísa vitan, tí til tess er vitanin ov rúgvismikil og fjøltáttað, men at næmingarnir í nógv størri mun duga at gagnnýta sína vitan, meta um viðurskifti og seta vitanina í ein viðkomandi samanhang. Vitanin í ymsu lærugreinunum er eisini fortreyt fyri læring í øðrum lærugreinum, og tí er neyðugt, at samstarvað verður tvørtur um lærugreinar. Við at arbeiða tvørfakliga við evnum kunnu næmingarnir í størri mun læra at síggja samanhangir, at brúka ymsar arbeiðshættir og at yvirføra vitan. Eisini er sera umráðandi, at námsháttalag og arbeiðshættir verða umrøddir í námsætlanunum og í viðmerkingunum til námsætlanirnar.

Hetta er eisini endamálið við undirvísingini í fólkaskúlanum, sum ásett er bæði í endamálsorðingini, í § 5, stk. 1 um undirvísingarinnihald og arbeiðshættir og í § 21 um ráðleggingina av undirvísingini.

Tilmælið í parti 20 um tíma- og lærugreinabýtið er eisini gjørt við atliti at hesum viðurskiftum, so at fólkaskúlarnir hava betri fortreytir og umstøður at skapa møguleikar fyri, at lærarar kunnu fara í dýpdina í undirvísingini og nýta ymiskar arbeiðshættir, kannandi, verkligar og skapandi, soleiðis at styrkt verður bæði um samanhang og fjølbroytni í undirvísingini og skúladegnum hjá næmingunum. Eisini rørsla eigur at hava størri leiklut m.a. innan undirvísingarhættir.

Tvørgreinalig undirvísing, har samstarvað verður tvørtur um lærugreinamørk, er ein av fyritreytunum fyri at røkka hesi ætlan, soleiðis at evnis-, verkstaðar- og verkætlanararbeiði verður ein nátúrligur partur í undirvísingini. Í tilmælinum um tíma- og lærugreinabýtið verður økt um undirvísingarpartin innan skapandi lærugreinir so sum handaverk og list. Mett verður, at skúladagurin í dag ikki bara er ov drúgvur, men somuleiðis ov einsháttaður, at tað handaliga og verkliga fyllir ov lítið, og at verkætlanararbeiði má gerast ein fastur táttur í fólkaskúlanum.

Áherðsla eigur at verða løgd á námsháttalagið, at undirvísingin verður skipað við fjølbroyttum virksemi, har evnisarbeiði, verkætlanar- og verk-

staðararbeiði eru sjálvsagdir tættir, at næmingarnir luttaka í uttandura virksemi við kanningum og eygleiðingum og verkligum arbeiði. Fakhølini ella verkstøðini í skúlanum eiga at geva íblástur til fakliga, handaliga, listarliga og mentanarliga arbeiðið, og skúlabókasavnið eigur at verða ein natúrligur miðil, har næmingarnir leita sær vitan og bókmentaligar upplivingar. Harumframt eigur dentur at verða lagdur á at nýta evni og amboð í skapandi og listarligu lærugreinunum og evni í gerandisdegnum sum mál, vekt og gjaldoyra sum amboð, har tey eru viðkomandi at lýsa evni og spurningar í fakligu læringini. Eisini eigur dentur at verða lagdur á rørslu, har næmingarnir hava ymiskar venjingar umframt svimjing.

Neyðugt er at veita lærarum eftirútbúgving innan bæði námshættir og undirvísingarskipan, umframt at hetta eigur at vera sjálvsagdur partur í læraraútbúgvingini. Av tí at arbeiðshættir og at skipa undirvísing eru partar av lærarayrkinum sum heild, hóast tað kunnu verða ymsir arbeiðshættir, sum eyðkenna einstøku lærugreinina, so verður mælt til, at skeið verða fyriskipað í skúlunum kring landið. Smærri skúlar verða knýttir at einum størri skúla í økinum, har undirvísingarligt samstarv er frammanundan t.d. um framhaldsdeild. Eisini kunnu skeið verða skipað fyri lærarum í smærru skúlunum, sum ofta hava serligar undirvísingarstøður við samanløgdum flokkum. Um skeiðini verða skipað í skúlunum, har allir lærararnir luttaka, verður ikki tørvur á vikartímum, men at næmingarnir fáa frí úr skúla. Hetta má verða gjørt eftir einari skipan og í samstarvi við skúlastýrini og kommunurnar, so at næmingarnir missa sum minst av undirvísing, og at yngstu næmingarnir kunnu fara í frítíðarskúla. Talan verður um 1-2 dagar um árið í 2 til 3 ár, so at lærarar fáa møguleika at royna og eftirmeta ymsar arbeiðshættir.

## 11.1. Tilmæli III. Fjølbroyttir arbeiðshættir

Mælt verður til:

- at ásetingarnar um verkætlanararbeiði, evniskunnadi undirvísing og verkstaðarundirvísing verða nágreinaðar í lógini.
- at § 5. stk. 1, § 9, stk. 2 og § 11. stk. 4 verða orðað soleiðis, at tað er greitt, at talan er um evnis-verkætlanar- og verkstaðarundirvísing, har skapandi og kannandi arbeiðslag er ein partur í mun til lærugrein og læring.
- at neyðug fyriskipan verður gjørd viðvíkjandi eftirútbúgving innan evnis-, verkstaðar- og verkætlanararbeiði, har dentur verður lagdur á kannandi-, verkligar-, og skapandi námshættir. Mettur kostnaður er kr. 200.000 í eitt trý ára skeið ella í fýra ár við 100.000-100.000-200.000-200.000.
- at rørsla eisini verður ein partur av skúladegnum.

# 12. Eftirútbúgving

Tað er sera umráðandi, at fólkaskúlin hevur vælútbúgvin starvsfólk innan lærugreinir og serlig fakøki, ið eru knýtt at undirvísingini og virksemi skúlans sum heild. Tørvurin á eftirútbúgving hevur valla nakrantíð verið størri enn nú, bæði tí at gransking og undirvísingarligar greiningar vísa á nýggjar arbeiðshættir og námsfrøði, og at okkum vantar eina regluliga eftirútbúgving innan fleiri øki. Serliga tøkniliga menningin seinastu árini hevur elvt til, at førleikakrøvini broytast munandi skjótari enn bara fyri fáum árum síðani. Eisini tilvitanin og tørvurin á bæði inklusjónsfremjandi átøkum, trivnaðararbeiði og fjølbroyttum námsháttum seta krøv og eru fortreytir fyri at røkja starv sum fólkaskúlalærari. Sostatt er stórur tørvur bæði á fakligum, námsfrøðiligum og sosialum førleikum.

Eingin áseting er í fólkaskúlalógini um eftirútbúgving og fakliga menning hjá lærarum, sjálvt um hetta er at kalla ein fortreyt fyri at røkja lærarastarvið. Hinvegin so er ásett í § 55a í fólkaskúlalógini, at skúlaleiðarar antin skulu hava nomið ella nema sær góðkenda leiðsluútbúgving. Fólkaskúlin hevði í mong ár eina eftirútbúgvingarskipan bæði við skeiðsvirksemi, drúgvari eftirútbúgvingum og árskeiðum. Umframt at Landsmiðstøðin, nú Nám hevur havt styttri skeið bæði innan námsfrøði, undirvísingarmiðlar og kunningartøkni.

Eftirútbúgving hjá fólkaskúlalærarum er ásett í rundskrivi nr. 1 um eftir- og framhaldsútbúgving av lærarum fólkaskúlans frá 9. juni 1992. Rundskrivið hevur heimild í § 25, stk. 2 í løgtingslóg nr. 69 um læraraútbúgving frá 28. mai 1980. Henda lóg fór úr gildi 17. mai 2012, men samstundis varð ásett í § 2 stk. 2 í løgtingslóg nr. 51 frá 8. mai 2012 um broyting í Løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya, at fyriskipanir, ið ásettar eru við heimild í Ll. nr. 69 frá 28. mai 1980 um læraraútbúgving, verða verandi í gildi, til tær verða broyttar ella settar úr gildi við heimild í lógini fyri Fróðskaparsetur Føroya.

Í 6. tátti í nevndu løgtingslóg um læraraútbúgving verður m.a. sagt, at víðari útbúgving av lærarum fólkaskúlans kann fara fram á útbúgvingarstovnum í Føroyum, í Danmark og í øðrum londum. Harumframt er víst á skipan viðvíkjandi vikarútreiðslum, at lærarar, ið luttaka í eftirútbúgving, kunnu

fáa vikarútreiðslurnar afturgoldnar eftir reglum, sum landsstýrið ásetur, og at landsstýrið ásetur reglur um, í hvørjum vavi tímatal í víðari útbúgving verður roknað upp í skylduga tímatalið hjá lærarum.

Henda áseting og árlig játtan til økið gjørdi, at árskeið vórðu skipað regluliga við m.a. fýra árskeiðum á DLH og 8-10 í Føroyum. Lærarar fingu eisini farloyvi við løn at taka árskeið í Noregi og Onglandi og styttri skeið í týskum í Týsklandi. Í juni 1988 var Rundskriv um eftirútbúgving av lærarum fólkaskúlans lýst við heimild í nevndu løgtingslóg um læraraútbúgving, og sama árið var eisini reglugerð gjørd fyri leiðaran av eftirútbúgvingini. Rundskriv og reglugerð vórðu endurskoðað í 1992, tá ið rundskriv um eftir- og framhaldsútbúgving av lærarum fólkaskúlans og reglugerðin fyri námsfrøðiliga leiðaran av eftir- og framhaldsútbúgvingini av lærarum fólkaskúlans vórðu sett í gildi frá 1. juli 1992. Eftirútbúgvingin fekk tá eina fasta skipan, sum hevur virkað til fyri fáum árum síðani, men tá námsfrøðiligi leiðarin fór úr starvi á sumri 1997, so var fyrisitingin av eftirútbúgvingini løgd til undirvísingarleiðara í táverandi Landsskúlafyrisitingini.

## 12.1. Nakrar ásetingar í rundskrivinum, sum hava myndað eftirútbúgvingina

| Endamál | Innihald | Skipan |
|---|---|---|
| at eftirútbúgva lærarar og onnur, ið eru yrkisliga javnsett við teir<br>at geva lærarum høvi til framhaldsútbúgving við atliti at virksemi skúlans<br>at granska og at menna vísindaliga gransking | at skipa styttri og longri skeið, sum kunnu setast saman til árskeið<br>at bjóða lærarum at taka cand.ped. útbúgving innan øki, sum læraraskúlin og Fróðskaparsetrið skipa í samstarvi við aðrar útbúgvingarstovnar<br>at farið verður undir serútbúgvingar sum leiðslu, serlæraraútbúgving, skúlabókavarðaútbúgving og vegleiðaraútbúgving | Eftir- og framhaldsútbúgving kann verða skipað sum partur av virkseminum hjá Føroya Læraraskúla og Fróðskaparsetri Føroya, øðrum útbúgvingarstovnum ella skeiðum, sum eftirútbúgvingin sjálv skipar fyri.<br>Ein ráðleggingarnevnd við 5 limum kannar tørvin og skipar skeiðsvirksemið samsvarandi fíggjarliga karminum |

Tá ið fólkaskúlalógin var til viðgerðar í 1997 vísti meirilutin í løgtinginum m.a. á: „*Uppskotið til nýggja fólkaskúlalóg setur munandi størri krøv til undirvísingarførleikan hjá lærarum. Tað má tí metast at vera ein fortreyt, skal lógin virka til fulnar, at lærarum fólkaskúlans fer at standa eftirútbúgving í boði.*“ Landsskúlafyrisitingin, sum greinaði økið, metti, at meirkostnaðurin til eftirútbúgving av lærarum fór at kosta 22 vikarpartar árliga, ið var ein hækking frá 14 til 22 vikarpartar, og sum tá svaraði til 1.8 mió. kr.

Eftirútbúgvingin mentist eisini nógv eftir aldamótið, men seinastu árini er

stígur komin í, serliga viðvíkjandi drúgvari eftirútbúgvingum fyri lærarar, tó var námsfrøðilig leiðsluútbúgving skipað árini 2017-2020, sum serliga var ætlað verandi skúlaleiðarum, og sum samstundis er tann seinasta drúgva eftirútbúgvingin innan fólkaskúlaøkið.

Eftirútbúgvingin verður í dag ikki skipað sambært umrødda rundskrivi. Skipanin er broytt soleiðis, at øll styttri skeiðini liggja í Námi, og drúgvari eftirútbúgvingar hava antin verið skipaðar í samstarvi við Námsvísindadeildina ella danskan útbúgvingarstovn m.a. UCC. Eisini hevur verið umrøtt at skipa ein eftirútbúgvingardepil, har málið skuldi verða, at øll starvsfólk í skúlum og stovnum, sum Barna- og útbúgvingarmálaráðið varðar av, í framtíðini skulu hava møguleika at eftirútbúgva seg á einum og sama staði.

Fólkaskúlaráðið handaði í desember 2012 táverandi landsstýrismanni álitið, Førleikamenning – tørvur og skipan. Í álitinum verður lýstur tørvur á eftirútbúgvingum innan ymisk øki og eisini, hvussu eftirútbúgvingin framyvir kundu verið skipað, har MMR, nú BÚMR hevur yvirskipaðu ábyrgdina at tryggja eftirútbúgvingartilboð og samstarv við útbúgvingarveitarar, at Nám skipar styttri skeið og átøk í samstarvi við skúlarnar sum faklig lesing, floksleiðsla, KT skeið, verkætlanararbeiði og samstarvandi læring, og at Námsvísindadeildin skipar útbúgvingar á diplom, bachelor, master- og kandidat stigi, linjulestur, námsfrøðilig skeið og útbúgvingar innan ymisk fak- og serøki.

Nám hevur í mong ár havt eina regluliga eftirútbúgvingarskipan, sum í høvuðsheitum er skipað við styttri skeiðum, men eisini styttri útbúgvingum sum Akt- læraraútbúgving. Nám hevur eisini røkt samskipandi uppgávuna hjá ráðleggingarnevndini at gera yvirlit yvir tað skeiðsvirksemi, sum verður sett í verk, og hvørjar ætlanir liggja fyri framman. Virksemi hjá Námi er heimilað í løgtingslóg nr. 52 um at útvega undirvísingarmiðlar, har ásett er í § 2, stk. 2, at undirvísingarmiðlar fata m.a. um útgávur, undirvísingarportal, KT-samskiftisskipan, miðlasavn, skeiðsvirksemi og ráðgeving.

Í samgonguskjalinum millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn verður áherðsla løgd á eftirútbúgving innan fólkaskúlaøkið, har tilskilað er, at Nám skal uppraðfestast, og at eftirútbúgvingarleistur verður skipaður fyri starvsbólkar skúlans.

## 12.2. Eftirútbúgvingartørvur

Tørvur er á eini skipaðari tilgongd, har eftirútbúgvingarnar verða bodnar út við jøvnum millumbili. Tað vanta eftirútbúgvingar innan fleiri øki í fólkaskúlanum, umframt eftirútbúgving innan fjølbroytta læring, trivnað og sosialan felagsskap. Tað eru 20 ár síðani, at skúlabókavarðar tóku prógv og 19 ár síðani Kt-varða útbúgving var skipað, 12 ár síðani lesivegleiðarar vórðu útbúnir, 10 ár síðani serlærarar vóru útbúnir, 7 ár síðani orðblindalærarar

vórðu útbúnir, 5 ár síðani støddfrøðivegleiðarar og Akt- lærarar vórðu útbúnir og góð 2 ár síðani leiðsluútbúgvingin í námsfrøðiligari leiðslu endaði. Sjálvt um tørvur er útbúgving innan fleiri øki, so ber ikki til at seta allar útbúgvingar í verk samstundis, hvørki fíggjarliga ella viðvíkjandi luttøku. Mælt verður til at fylgja tí raðfesting, sum er gjørd niðanfyri, so at tær útbúgvingar, sum hava bíðað longst, fyrst verða settar í verk, men samstundis er eisini tørvur á nýggjum útbúgvingum, serliga innan samlærin, handverk og list og fjølbroyttar námshættir.

Allar útbúgvingar eru ikki eins umfatandi, og tí ber til at skipa Akt –útbúgving og skeið fyri SSP lærarum samstundis sum ein drúgvari útbúgving verður sett í verk. Eykaprógv í føroyskum verður skipað regluliga, og er heldur ikki so umfatandi. Eisini eiga skeið í leiðslu at verða skipað, um ikki kann verða farið í holt við eina leiðsluútbúgving.

Dentur eigur at verða lagdur á at menna undirvísing og samlaða virksemi fólkaskúlans, har fakliga læringin, námsfrøði og námsfrøðilig háttaløg, trivnaður, samstarv og sosialur felagsskapur samvirka, so okkara unga ættarlið, sum er Føroya framtíð, fær eina dygdargóða undirvísing, sum gevur áræði, trivnað og virkisfýsni og brynjar tann unga til framtíðina bæði við atliti at velja útbúgvingar- og arbeiðsleið.

### 12.3. Tilmæli IV. Raðfesting, eftirútbúgving og drúgvari skeið

Mælt verður til hesa raðfesting:

| Eftirútbúgvingar | Skeið |
|---|---|
| 1. Skúlabókavarðaútbúgving | 1. Akt-lærarautbúgving, drúgvari skeið |
| 2. KT- varðaútbúgving | 2. List- og handaverk, skeið |
| 3. Lesivegleiðaraútbúgving | 3. CO-teaching og tvílæraraskipan, skeið |
| 4. Samstarvandi læring (CO-teaching) | 4. Skeið fyri SSP-lærarar |
| 5. Serlæraraútbúgving | 5. Persónlig leiðslumenning, skeið |
| 6. Flokslæraraútbúgving | 6. Verkætlanarar,- verkstaðarundirvísing og evniskunnandi undirvísing, skeið |
| 7. Orðblindalæraraútbúgving | 7. Rørsla og heilsa, skeið |
| 8. Leiðsluútbúgving | 8. KT- didaktikkur, skeið |
| 9. Skúlavegleiðararútbúgving | 9. Eykapróv í føroyskum, regluliga skeið |
| 10. Náttúrvísind, náttúruvegleiðari | |
| 11. støddfrøðivegleiðari | |

### 12.4. Kostnaðarmeting

Gjørd er ikki ein samlað kostnaðarmeting, men dømi um kostnað fyri eina drúgvari eftirútbúgving, 60 ects. Kostnaðurin hjá Fróðskaparsetrinum fyri hvørt ects er umleið kr. 1.500,00, men hevur varierað nakað. Fyri námsfrøðiligu leiðsluútbúgvingina var kostnaðurin kr. 1000,00 fyri hvørt ects, so avtala má verða gjørd við Fróðskaparsetrið um kostnað, serliga tí

at mælt verður til, at Námsvísindadeildin á Fróðskaparsetrinum stendur fyri øllum drúgvaru eftirútbúgvingunum innan fólkaskúlan.

Lærarar hava higartil tikið eftirútbúgving sum part av sínum lærarayrki, og hava fingið ávísan niðurskurð í tímatalinum, so teir kunnu nýta ein dag um vikuna til lesnaðin og luttøku á skeiðsdøgum. Niðurskurðurin hevur sum meginregla verið 6 tímar um vikuna, men í onkrum útbúgvingum 5 t/v. Drúgvaru útbúgvingarnar hava verið skipaðar í eitt trý ára skeið, so at tey lesandi hava havt umstøður at samskipa lesnað og arbeiði. Hetta hevur eisini gjørt, at tað hevur verið rættiliga lítið fráfall í eftirútbúgvingunum.

Kostnaðurin fatar í høvuðsheitum um tríggjar partar: skeiðsgjald, lækkað tímatal og ferðaendurgjald. Niðan fyri er víst dømi um, hvat ein útbúgving, ið er 60 ects, kostar, um hon verður normerað til 2, 2, 5 ella 3 ár. Roknað verður við einum skeiðsgjaldi, sum er kr. 1500, 00 pr. ects, og einum niðurskurði, sum er 5 tímar um vikuna. Skeiðskostnaðurin er tann sami, um útbúgvingin verður framd eftir tveimum ella trimum árum. Meirkostnaðurin at leingja útbúgvingina til 3 ár stavar frá tímaniðurskurði og ferðing. Tímaniðurskurðurin verður roknaður í klokkutímum um árið, har pultstímarnir verða umroknaðir til klokkutímar. Í ársverkinum hjá lærarum, sum er 1800 tímar, er skipanin, at ein undirvísingartími fatar um undirvísing (45 min.), fyrireiking (30 min.) og fríkorter (10 min.). Tá ið talan er um eftirútbúgving, so fellur fríkorterið burtur, og undirvísingartímin er sostatt 75 min. Árliga vikutalið til undirvísing er 38,6 vikur.

## 12.5. Tímaniðurskurður umroknaður til klokkutímar

| Undirvísingartímar/vikuna | Tímar um árið | Klokkutímar um árið |
|---|---|---|
| 4 tímar | 4x38,6x75/60 | 193,00 |
| 5 tímar | 5x38,6x75/60 | 241,25 |
| 6 tímar | 6x38,6x75/60 | 289,50 |

Kostnaðurin fyri tímaniðurskurð er: luttakarar x klokkutímar/1800 x 500.000, sum er árslønin. Kostnaðurin verður síðani býttur millum heyst 5/12 og vár 7/12.

**Talva 29. Kostnaður fyri útbúgving, sum er 60 ects, 25 luttakarar og niðurskurður 5t/v**

| Lestrar hálvár | 3 ár | 2,5 ár | 2 ár | Skeiðsgj. 3 ár | Skeiðsgj 2,5 ár | Skeiðsgj. 2 ár | Niður skurður | Ferðing | Kostnaður 2,5 ár |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Heyst | 10 | 10 | 15 | 375.000 | 375.000 | 562.500 | 698.061,34 | 25.000 | 1.098.061,34 |
| Vár | 10 | 10 | 15 | 375.000 | 375.000 | 562.500 | 977.285,88 | 35.000 | 1.387.285,88 |
| Heyst | 10 | 15 | 15 | 375.000 | 562.500 | 562.500 | 698.061,34 | 25.000 | 1.285.561,34 |
| Vár | 10 | 10 | 15 | 375.000 | 375.000 | 562.500 | 977.285,88 | 35.000 | 1.387.285,88 |
| Heyst | 5 | 15 | | 187.500 | 562.500 | | 698.061.34 | 25.000 | 1.285.561,34 |
| Vár | 15 | | | 562.500 | | | 977.285,88 | 35.000 | |
| Íalt | 60 | 60 | 60 | 2.250.000 | 2.250.000 | 2.250.000 | | | 6.443.755,78 |

Tørvurin á eftirútbúgving er stórur, og tí verður mælt til, at lestrartíðin fyri drúgvaru útbúgvingarnar verður 2,5 ár, ístaðin fyri 3 ár, sum hevur verið tað vanliga fyri útbúgvingar, sum fata um 60 ects. Samlaði kostnaðurin fyri hesar útbúgvingar verður skeiðsgjald kr. 2.250.000, tímaniðurskurður 4.1 mió. kr. umframt ferðaendurgjald umleið kr. 145.000, sum er tilsamans kr. 6.5 mió. kr.

Skeiðsdagar í skúlunum kring landið í fjølbroyttum undirvísingarháttum, Kt skeið og samlæring fara væntandi at kosta 1 mió. kr. um árið í eitt 3 ára skeið. Harumframt er tørvur á AKT og SSP skeiðum og at menna flokslæraraarbeiðið. Miðal árligi kostnaðurin bæði til útbúgvingar og skeið er mettur til tilsamans á leið 4.5 mió. kr. árliga, har 1 mió. er til skeiðsvirksemi innan kt, ymsar arbeiðshættir, handaverk og list og samlæring, og 3.5 mió. kr eru til drúgvari eftirútbúgvingar, flokslæraraútbúgving og styttri útbúgvíngar sum Akt og SSP.

## 12.6. Tilmæli V. Eftirútbúgving skipan og játtan

Mælt verður til:

at eftirútbúgvingarskipan, har eftirútbúgvingar verða bodnar út við jøvnum millumbili

at eftirútbúgvingarnevnd verður sett at samskipa, fyrireika og gera kostnaðarmeting fyri eitt 10 ára skeið, býtt í 2 og 3 ára virksemisskeið.

at árlig játtan verður ásett á fíggjarlógini til eftirútbúgvingar, skeið og styttri útbúgvingar, 4.5 mió. kr. árliga

at námsvísindadeildin skipar fyri eftirútbúgvingum á diplom, bachelor og masterstigi

at nám skipar fyri styttri eftirútbúgvingum sum Akt og SSP og fyri skeiðsvirksemi

at drúgvaru eftirútbúgvingar á 60 ects verða skipaðar í fimm lestrarhálvur, og at tímaniðurskurðurin verður 5 tímar um vikuna.

# 13. Handaverk og list

Handaligu og listarligu lærugreinirnar fata um sang, tónleik, tilevning, handarbeiði, smíð og heimkunnleika. Kravda tímatalið í 1.-7. flokki er 25 tímar tilsamans. Um vit samanbera tímatalið við t.d. Danmark, so er kravda tímatalið í somu lærugreinum 32 tímar og í Finnlandi 35 tímar. Um vit samanbera handaverk og list og ítrótt, so er ítróttur kravd lærugrein í 1.-9. flokki, har tímatalið í 1.-7. flokki er 13 tímar, meðan tímarnir í handaverk og list skulu býtast millum tær 5 lærugreinirnar í handaverk og list, so har er ikki nógv í part til hvørja lærugrein. Sostatt er eyðsæð, at handaligu og listaligu lærugreinirnar hava ikki serliga høga raðfesting í verandi tíma- og lærugreinabýti.

Fólkaskúlin byggir á eina heildarfatan, har næmingurin bæði mennir og fær nýtt sínar mongu gávur. Hann skal hava upplivingar, nýta sítt hugflog, menna hugin at læra og búnast bæði sum einstaklingur og sum partur av einum felagsskapi, skal duga at gera eina sjálvstøðuga meting og virka í einum demokratiskum samfelagi við denti á felagsskap, samavgerð og samábyrgd. Talan er um eina heildarmenning, og tí er so umráðandi, at upplivingar og kunnleiki á listarliga og skapandi økinum verða raðfestar.

Arbeiði í skapandi og listarligu lærugreinunum gevur næmingunum møguleika at ogna sær førleikar, at hugsavna seg um evnið og at nýta sítt hugflog og ikki minst, so eru hetta førleikar, sum tey kunnu nýta í aðrari fakligari læring. Eisini ogna næmingar sær í handaligu lærugreinunum bæði bindindi, hegni til sjálvstøðugt arbeiði og førleika at arbeiða saman við øðrum, og hetta er serliga, um næmingarnir kunnu velja tær handaligu ella listarligu lærugreinir, sum tey hava serligan áhuga fyri. Tað er tí umráðandi í handaverki og list, at næmingarnir fáa innlit í allar lærugreinapartarnar, men at tey eisini sleppa at velja millum greinarnar.

Listarligu og skapandi lærugreinirnar hava stóra ávirkan á bæði læring, menning og trivnað hjá einstaka næminginum. Umframt tað ogna næmingarnir sær góðar læri- og arbeiðsvanar. Henda læriúrtøka kann ikki altíð mátast á sama hátt sum tann fakliga úrtøkan, tí tað júst snýr seg um at skapa, brúka hugflogið og at fordjúpa seg í evnum og tilgongdum,

sum eru sprotnar úr teirra egna áhuga, forvitni og undran, og sum ber við sær, at næmingarnir fáa kensluna av at eydnast og duga.

Kanningar vísa, at næmingar í estetiskum læritilgongdum læra um egna mentan og siðaarv, menna sína sjálvsfatan og fáa eina kenslu av at hoyra til í einum felagsskapi. Næmingarnir menna ein kreativan hugsanarhátt, læra at hugsa bæði grundandi og kritiskt, umframt at tey mennast sosialt og kensluliga[3]. Hetta eru alt førleikar, sum eru umráðandi í dagsins samfelagi.

Listaliga fakøkið stuðlar eisini læringini í bókligu lærugreinunum. Kanningar vísa, at skúlar, ið raðfesta handaligu og tónlistarligu lærugreinarnar og fáa tað listaliga rótfest í øðrum lærugreinum, klára seg betri til royndir í bókligu lærugreinunum. *„We find that a substantial increase in arts educational experiences has remarkable impacts on students' academic, social and emotional outcomes.* " … *„Students who received more arts education experiences are more interested in how other people feel and more likely to want to help people who are treated badly.* "[4]. Sambært hesum, vísir kanningin, at tað er stórt samsvar millum, hvussu næmingarnir trívast, læra og mennast, og hvussu listaliga fakøkið verður raðfest.

## 13.1 Tilmæli VI. Handaverk og list

Mælt verður til:

at tímatalið í handaverk og list verður hækkað

at skipað verður fyri eftirútbúgving innan økið, sum í fyrsta lagi verða skeið, ið nám fyriskipar.

at virkað verður fyri, at øllum næmingum í hádeild stendur í boði at velja eina handaliga ella listarliga lærugrein.

Mettur kostnaður at skipa útbúgving í handaverk og list er kr. 200.000 árliga í 3 skúlaár ella í 4 ár, 100.000 í tvey ár og 200.000 í tvey ár.

3 Road Map for Arts Education the World Conference on Arts Education: Building Creative Capacities for the 21st Century Lisbon, 6-9 March 2006

4 Daniel H. Bowen, Ph.D. and Brian Kisida, Ph.D. Investigating Causal Effects of Arts Education Experiences: Experimental Evidence from Houston's Arts Access Initiative. Feb 2019.

# 14. Námsætlanir

Ein avleiðing av ætlaðu broytingunum í fólkaskúlalógini er, at samstundis verður tørvur á broyting í námsætlanunum. Samanhangur eigur at verða millum námsætlanararbeiðið og ætlaðu broytingarnar í fólkaskúlalógini. Nám fór í 2020 undir arbeiðið at dagføra allar námsætlanir frá fólkaskúla til endan á miðnámi, og málið var at gera hesar dagføringar i einum fimm ára skeiði, men hetta letur seg ikki gera fíggjarliga og starvsfólkaliga, tí at talan er um eitt sera stórt tal av námsætlanum, sum eisini fata um miðnám og yrkisútbúgvingar. Samanhangur er ímillum námsætlanirnar í fólkaskúla og á miðnámi, og tí mugu námsætlanirnar broytast í eini heildarskipan og ikki bara innan annað økið.

Neyðugt er, at arbeiðsbólkar verða settir at endurskoða og dagføra einstøku námsætlanirnar frá lægsta stigi í fólkaskúlanum til hægsta stig á miðnámi, og at tað samstundis verða gjørdar leiðbeiningar til einstøku lærugreinarnar. Hetta arbeiðið skal eisini fevna um námsætlanir og leiðbeiningar til kravdar verkætlanir og kravd undirvísingarevni, sum m.a. eru:

- Kravd undirvísingarevni í fólkaskúlanum:
  - o Ferðslulæra
  - o Kvæði og dansur (námsætlan ikki tøk)
  - o Heilsukunnleiki og seksualupplýsing (námsætlan ikki tøk)
  - o Útbúgvingar- og vinnulívskunning (námsætlan ikki tøk)
- Kravd verkætlan í 9. flokki
- Harumframt vanta námsætlanir í fleiri vallærugreinum

Í arbeiðinum at gera leiðbeiningar og dagføringar í einstøku námsætlanunum er sera týdningarmikið, at tætt samstarv er við lærarar, sum hava serligt innlit í lærugreinina, og sum skulu útinna dygdargóðu undirvísingina, sum námsætlanirnar lýsa og tey mál, sum ásett verða, at skúlarnir skulu náa í undirvísingini. Lærarar bæði í fólkaskúla og á miðnámi hava gjørt vart við, at tørvur er á ítøkiligum leiðbeiningum til einstøku námsætlanirnar.

Arbeiðsbólkarnir, sum arbeiða við námsætlanunum, eiga at verða mannaðir við umboðum fyri lærarar í lærugreinini, umboðum fyri Námsvísindadeildina og starvsfólki í Námi. Umframt viðkomandi tilfar og eftirmetingar skulu bólkarnir eisini grunda sítt arbeiði á fólkaskúlalógina. Arbeiðið verður gjørt av einum verkætlanarbólki í Námi. Afturat sær hevur verkætlanarbólkurin

lærugreinaráðgevar og umboð fyri Próvstovuna. Restin av bólkinum kemur at virka sum ein tilvísingarbólkur, sum fylgir arbeiðinum og kemur við tilmælum.

Mett verður, at kostnaðurin er eitt ársverk á kr. 600.000 umframt fundarsamsýningar, kr 50.000 til fylgibólkar **í** hvørjari lærugrein. Ella tilsamans 1. mio. kr. um árið afturat verandi skipan.

### 14.1. Tilmæli VII. Námsætlanir

Mælt verður til, at:

at arbeiðsbólkar verða settir at endurskoða og dagføra einstøku námsætlarnirnar frá 1. flokki fólkaskúlans til hægsta stig í miðnámi

at arbeiðsbólkarnir samstundis gera leiðbeinandi tilfar til einstøku námsætlanirnar

at arbeiðið verður gjørt innan fimm ár.

Talan er um 35 námsætlanir til fólkaskúlan, 45 til miðnám og 24 til yrkisnám.

# 15. Tvílæraraskipan

Tvílæraraskipanin er ikki eitt nýtt námsfrøðiligt átak. Fyrstu greinarnar um tvílæraraskipanir eru skrivaðar í Amerika og Canada seinast í sjeyti- og áttatiárunum. Vanligt var, at ein lærari undirvísti í einum flokki í ávísari lærugrein ein skúlatíma. Tvílæraraskipanin ger upp við hesa námsfrøðiligu hugsanina, og fyri at fáa eina fjølbroytta og inkluderandi undirvísing, so tekur tvílæraraskipanin støði í einari sameining av undirvísing, har meir enn ein lærari er í flokkinum, og har undirvísingin verður skipað í felag millum lærararnar, bæði fyrireiking, fremjing og felags meginreglur.

Tvílæraraskipanin er ein skipan, har tveir lærarar saman og samstundis arbeiða í sama skúlaflokki. Skipanin kann samanberast við samlæring, co-teaching. Tvílæraraskipanin, ið eisini hevur fingið undirtøku í Evropa og Skandinavia, er grundað á ta inkluderandi hugsjónina, at í skúlanum skal undirvísingin vera so fjølbroytt og nærverandi, at hon skal røkka øllum næmingunum í einum flokki.

Tvílæraraskipanin, ella partvís tvílæraraskipan við tveimum lærarum, tá ið næmingatalið í flokkunum er 18 næmingar og fleiri, hevur verið brúkt í føroyska fólkaskúlanum sum serstøk skipan í 1. og 2. flokki í meira enn 12 ár. Skipanin er tó bara galdandi í 1. og 2. flokki, har tímar til tvílæraraskipanina verða játtaðir eftir einum ávísum frymli, sum víst niðanfyri. Játtanargrundarlagið undir tvílæraraskipanini er, at eyka tímar verða játtaðir, tá ið tað eru 18 til 26 næmingar í flokkunum, og er hetta bara galdandi í 1. og 2. flokki. Kravda tímatalið í hesum flokkum er ávikavist 24 og 26 tímar, og flokkar, sum hava eitt lægri næmingatal enn 18 næmingar, eru ikki umfataðir av tvílæraraskipanini. Hetta hevur skapt ávísa misnøgd, tí í smærru skúlum, sum hava samanlagdar flokkar, og tað er skipanin í flestu bygdaskúlum, har kann næmingatalið í samanløgdum flokkum verða 18 og fleiri, men teir fáa ikki ágóða av tvílæraraskipanini. Vit hava eitt oyggjaland, og tí má politiska skipanin taka støðu til, hvussu smáu skúlarnir verða skipaðir, so at vit sum land tryggja, at næmingarnir í útjaðaranum hava somu undirvísingar- og menningarmøguleikar í fólkaskúlanum sum næmingar í størru skúlunum.

**Talva 30. Galdandi tvílæraraskipan**

| Næmingatal | Tímatal 1. fl. | Eyka tímar | Tímatal 2. fl. | **Eyka tímar** |
|---|---|---|---|---|
| 18 | 29 | 5 | 29 | 3 |
| 19 | 30 | 6 | 30 | 4 |
| 20 | 32 | 8 | 32 | 6 |
| 21 | 34 | 10 | 34 | 8 |
| 22 | 35 | 11 | 35 | 9 |
| 23 | 37 | 13 | 37 | 11 |
| 24 | 38 | 14 | 38 | 12 |
| 25 | 40 | 16 | 40 | 14 |
| 26 | 42 | 18 | 42 | 16 |

Í tvílæraraskipanini verða tveir lærarar settir at undirvísa í sama flokki í somu lærugrein sama undirvísingartíma. Lærararnir samstarva um at fyrireika undirvísingina, og báðir lærararnir samstarva um at fremja og eftirmeta undirvísingina. Arbeiðið í flokkinum er ein felags uppgáva og felags ábyrgd, so at tað mennir allar partar.

Endamálið við tvílæraraskipanini er at fáa eina vælskipaða undirvísing, sum kann taka atlit til hvønn einstakan næming, og at hvør næmingur er partur av einum sosialum og fakligum felagsskapi. Tað eigur at økja um trivnaðin og læringina, at fleiri vaksin eru í flokkinum, soleiðis at styrkt samband er millum lærarar og næmingar, og við hesum skuldi fortreytirnar fyri at læra og trívast verið munandi betri.

Læriúrtøkan hjá næmingunum eigur at økjast, um rætt verður fyriskipað og lagt til rættis. Í tvílæraraskipanini hava lærararnir eisini betri møguleikar at næmingalaga undirvísingina, so allir næmingarnir verða inkluderaðir í felagsskapinum í flokkinum. Tvílæraraskipanin gevur eisini lærarunum betri møguleikar at arbeiða øðrvísi og at samstarva tvørgreinaliga, so at næmingarnir gerast meira hugbundir, virknir og luttakandi í undirvísingini.

Fyrimunir við tvílæraraskipanini fyri næmingin eru:
- Fleiri fakfólk í flokkinum
- Betri og tættari relatión millum vaksin og barn
- Møguleiki fyri at arbeiða tvørgreinaliga
- Lættari at røkka einstaka næminginum
- Lættari at arbeiða stuðlandi í flokkinum

Fyrimunir fyri lærararnar eru:
- Felags fakligt og sosialt endamál
- Samstarv um fyrireiking og eftirmeting
- Felags uppgáva og ábyrgd

- Faklig og sosial relatión
- „Sparring“ um námsfrøði og háttalag

Karmar um tvílæraraskipanina:
At lærararnir fáa møguleika at nýta øðrvísi arbeiðshættir
At lærararnir eru javnsettir í samstarvinum
At lærarar hava greiðar reglur og mannagongdir at skipa arbeiðið
At skúlaleiðslan er kveikjandi og stuðlar arbeiðinum

## 15.1. Samlæring (Co teaching) og tvílæraraskipan

Samlæring kann í ein ávísan mun samanberast við tvílæraraskipanina, sum vit kenna frá innskúlingini, sí omanfyri og í skúlaflokkum, har tvey starvsfólk eru knýtt at flokkinum part av skúladegnum. Sostatt eru partar av samlæring ikki heilt fremmandir.

Samlæring hevur sum endamál at styrkja inklusjónina í vanliga flokkinum. Samlæring hevur eins og tvílæraraskipanin sín uppruna í Amerika, har lærarin, serlærarin og granskarin Marilyn Friend skrivaði sína fyrstu grein um co teaching seinast í sjeyti árunum. Hetta hugtak hevur vunnið fram, eisini her hjá okkum, serliga tí at her verður hugsað um undirvísingarhættir, sum sameina sernámsfrøði og námsfrøði í arbeiðinum at skapa eitt inkluderandi umhvørvi.

Í 1995 síggja vit fyrstu allýsingina av samlæring, sum sigur, at samlæring er, tá ið„*Tvey ella fleiri professionell starvsfólk útvega týðandi undirvísing til ymiskligan ella blandaðan næmingabólk í einum einstøkum fysiskum rúmi.*“

Í 2003 gjørdi Wendy Murawski, sum er master í serundirvísing og ph.d. í serundirvísing við serligum denti á samlæring og gransking, hetta meira ítøkiligt við at siga, at co-teaching krevur hesi trý stigini: *co-ráðlegging, co-undirvísing og co-eftirmeting.*

Bæði sum fakpersónar og menniskju eru vit sera ymisk og hava ymiskar arbeiðshættir, fakligar førleikar, hugsanir, tol, normar o.s.fr., og rúm skal vera fyri øllum hesum. Hetta er ein av avbjóðingunum í arbeiðnum við samlæring. Fortreytin fyri, at samlæring kann setast í verk og eydnast, er, at leiðsla skúlans hevur møguleika fyri og gevur rúm og tíð til at fáa gjøgnumarbeitt henda arbeiðshátt, og at starvsfólkini hava neyðugu førleikarnar og vitan til at fremja samlæring.

Krøvini til tey, sum arbeiða við samlæring, eru, at tað:
– krevur tvey javnsett ella javnverd fakfólk
– krevur virðing og álit
– krevur javnt arbeiðsbýti
– krevur, at starvsfólkini geva hvørjum øðrum konstruktivan kritikk

Undirvísingarhættirnir kunnu setast upp í seks ymiskar arbeiðshættir:
- ein undirvísir og ein er hjálpari
- ein undirvísir og ein eygleiðir
- statiónsundirvísing (at skipa eina næmingalagaða, differentieraða undirvísing)
- toymisundirvísing
- paralellundirvísing
- alternativ undirvísing

Mailyn Friend vísur á, at tað er neyðugt at menna eitt tætt fleirfakligt samstarv ímillum professionell við ymiskari vitan og førleikum. Hetta er fyritreytin fyri, at allir næmingar fáa optimala læri- og menningarmøguleikar innan fyri somu fysisku karmar.

Um samlæring skal eydnast, so er sera týdningarmikið, at leiðslan gongur á odda og áhaldandi er við í arbeiðinum at leiða og skapa eina samarbeiðsmentan um undirvísingina. Hetta er grundarlagið, sum bygt verður á, um tvílæraraskipan og samlæring skulu eydnast, og at tað ikki eru einstakir lærarar, eldsálir, sum royna at seta skipanina í verk, men at samlæring er eitt felags mál í skúlanum. Tað er samstundis umráðandi, at leiðslan fær játtan og møguleika at tryggja lærarunum førleikamenning, so at teir kunnu taka skeið ella eftirútbúgving og førleikamenna seg til henda arbeiðsháttin.

**Talva 31. Kostnaður at víðka galdandi tvílæraraskipan**

| **15.4 Tvílæraraskipan kostnaður** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Skúlar | Tímar 2022/23 | Tímar og tvíl. 1-7 | Hækking í tvílær.tím | Tvílærat. 1-9 | Hækking tvílær.tím |
| Skúlin á Fløtum | 1.168 | 1.306 | 138 | 1.438 | 270 |
| Skúlin á Skúlatrøð | 1.072 | 1.222 | 150 | 1.296 | 224 |
| Eysturskúlin | 777 | 841 | 64 | 852 | 75 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 621 | 702 | 81 | 763 | 142 |
| Runavíkar kommunuskúli | 751 | 787 | 36 | 841 | 90 |
| Skúlin á Argjahamri | 648 | 722 | 74 | 750 | 102 |
| Hoyvíkar skúli | 580 | 633 | 53 | 655 | 75 |
| Sankta Frans skúli | 517 | 631 | 114 | 631 | 114 |
| Skúlin á Giljanesi | 541 | 575 | 34 | 570 | 29 |
| Fuglafjarðar skúli | 511 | 515 | 4 | 554 | 43 |
| Skúlin í Eysturkommunu | 448 | 456 | 8 | 456 | 9 |
| Tvøroyrar skúli | 367 | 392 | 25 | 403 | 36 |
| Tofta skúli | 340 | 380 | 40 | 400 | 60 |
| Skúlin við Streymin | 399 | 432 | 33 | 438 | 39 |
| Vágs skúli | 344 | 385 | 41 | 404 | 60 |
| t/v | 9.084 | 9.979 | 895 | 10.451 | 1.369 |
| Tús. Kr. | | | 18.646 | | 28.475 |

Tvílæraraskipanin, sum er galdandi fyri 1. og 2. flokk, kostar á leið 10. mió. kr. Um sama skipan varð sett í verk fyri 3. flokk eisini, so hevði eyka kostnaðurin verið umleið 3 mió.kr. Tímar til tvílæraraskipan verða játtaðir skúlunum, tá ið tað eru 18-26 næmingar í flokkunum. Tað eru sostatt teir størru skúlarnir, sum fáa ágóða av tvílæraraskipanini. Talva 31 vísir kostnaðin, um tvílæraraskipanin varð víðkað til at fata um ávikavist 1.-7. flokk og 1.-9. flokk. Kostnaðurin at seta galdandi skipan í verk í 1.-7. flokki er umleið 18.646 mió. kr. og 28.475 mió. kr., um tvílæraraskipanin varð sett í verk í 1.-9. flokki. Um skipanin varð sett í gildi í 6 ár, hevði árligi kostnaðurin verið umleið 3 mió. kr.

## 15.2. Tvílæraraskipan, tá ið fleiri enn 12 næmingar eru í flokkunum

Tilmæli hjá arbeiðsbólkinum er, at ávís tvílæraraskipan verður sett í verk, tá ið tað eru fleiri enn 12 næmingar í flokkunum. Samstundis verður mælt til, at næmingatalið verður lækkað til 20 næmingar. Niðan fyri er útrokning gjørd um eina tillagaða tvílæraraskipan, sum tekur støði í útrokningarháttinum í galdandi tvílæraraskipan, har byrjað verður við 5 tímum í 1. flokki og 3 tímum í 2. flokki, tá ið 18 næmingar eru í flokkinum, og samstundis verður kravda tímatalið, sum árgangurin hevur, drigið frá.

Í døminum um eina tillagaða tvílæraraskipan verður byrjað við 2 tímum í fyrsta flokki og einum tíma í øðrum flokki, tá ið 13 næmingar eru í flokkunum, og samstundis verður tímatalið, sum flokkurin hevur drigið frá, 24 tímar í 1. flokki og 26 tímar í 2. flokki. Sum sæst í talvu 32, so fáa hinir flokkarnir ongan eyka tíma við hesi skipan, tá ið tað eru 13 næmingar í flokkinum og t.d. í 7. flokki, sum hevur 33 tímar, er frádrátturin so mikið stórur, at tvílæraraskipanin slær ikki út fyrr enn við 16. næminginum.

Dømið vísir kostnaðin, um ein tillagað tvílæraraskipan varð sett í verk, tá ið tað eru 13-20 næmingar í flokkunum, samstundis sum floksstøddin varð lækkað til 20 næmingar. Samanborið verður eisini við verandi tvílæraraskipan, tá ið 18-26 næmingar eru í flokkunum, og tá ið 20 næmingar eru í flokkunum.

**Talva 32. Dømi um eina tillagaða tvílæraraskipan**

| | 1. flokki | | 2. flokki | | 3. flokki | | 4. flokki | | 5. flokki | | 6. flokki | | 7. flokki | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| næm | tímar | eyka | tímar | eyka | tímar | eyka | tímar | eyka | tímar | eyka | tímar | eyka | tímar | eyka |
| 13 | 24 | 2 | 26 | 1 | 28 | 0 | 30 | 0 | 31 | 0 | 31 | 0 | 33 | 0 |
| 14 | 24 | 3 | 26 | 2 | 28 | 1 | 30 | 0 | 31 | 0 | 31 | 0 | 33 | 0 |
| 15 | 24 | 5 | 26 | 4 | 28 | 3 | 30 | 2 | 31 | 1 | 31 | 1 | 33 | 0 |
| 16 | 24 | 6 | 26 | 5 | 28 | 4 | 30 | 3 | 31 | 2 | 31 | 2 | 33 | 1 |
| 17 | 24 | 7 | 26 | 6 | 28 | 5 | 30 | 4 | 31 | 3 | 31 | 3 | 33 | 2 |
| 18 | 24 | **8** | 26 | 7 | 28 | **6** | 30 | **5** | 31 | **4** | 31 | **4** | 33 | **3** |
| 19 | 24 | **9** | 26 | **8** | 28 | 7 | 30 | **6** | 31 | **5** | 31 | **5** | 33 | **4** |
| 20 | 24 | **10** | 26 | **9** | 28 | **8** | 30 | 7 | 31 | 7 | 31 | 7 | 33 | **6** |
| Tím | | 50 | | 42 | | 34 | | 27 | | 22 | | 22 | | 16 |

Útrokningarfrymilin, sum nýttur verður, er (næmingar x sats, sum er 2,2 – tímtalið í árganginum)/2.
Dømi: 4 fl., ið hevur 17 næmingar, (17x2,2-30 tímar)/2 = 3,7. Tað vil siga, at skúlin fær 4 tímar eyka til ein flokk við 17 næmingum, so samlaða tímatalið í 4. flokki hevði verið 30 + 4 =34 tímar.

**Talva 33. Kostnaður. Tillagað tvílæraraskipan og floksstødd 20 næmingar**

| | Galdandi tvílæraraskipan | | Tvílæraraskipan 13-20 næmingar | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Tvílærar-skipan 18-26 næm. | 20 næm. og galdandi tvílærara-skipan | **20 næm. og broytt tví-læraraskipan í 1.-3. fl.** | **20 næm og broytt tví-læraraskipan í 1.-6. fl.** | 20 næm og broytt tví-læraraskipan í 1.-7. fl. |
| T/V | 9.083 | 10.850 | **11.076** | **11.438** | 11.469 |
| Munur tím. | | 1.767 | **1.993** | **2.355** | 2.386 |
| Kostnaður | | 36.813 | **41.521** | **49.063** | 49.7008 |
| Munur | | | **4.708** | **12.250** | 120.896 |

Kostnaðurin at broyta floksstødd til 20 næmingar, samstundis sum ein tillagað tvílæraraskipan verður sett í verk í 1.-6. fl., tá ið tað eru 13-20 næmingar í flokkunum, er á leið 49 mió. kr. í mun til verandi skipan. Økta tímajáttanin er 11.438-9083=2.355 tímar. Umroknað til størv er kostnaðurin 49 mió. kr. Her er at leggja til merkis, at skipanin fatar bæði um at lækka næmingatalið til 20 næmingar í flokkunum og eina tillagaða tvílæraraskipan, tá ið tað eru 13-20 næmingar í flokkunum.

Sum víst á í útrokningini at lækka floksstøddina í kap. 9, í paratinum 9.6, talva 3, er økti kostnaðurin 36,8 mió. kr. at lækka næmingatalið til 20 næmingar í 1.-9. flokk. Kostnaðurin fyri hvørt floksstigið er 36.8/9, sum er 4.0 mió. kr. um árið í níggju ár.

Kostnaðurin at seta eina tillagaða tvílæraraskipan í verk í 1.-6. flokki er 12.3 mió. kr., sum er 49.0-36.8 mió. kr. Árligi kostnaðurin í seks ár er 2.0 mió. kr. um árið.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at broytingarnar verða settar í verk eftir 9 árum, og at byrjað verður skúlaárið 2024-25. Árligi kostnaðurin fyri bæði at lækka floksstødd og seta eina tillagaða tvílæraraskipan í verk hevði verið umleið 6 mó. kr. árliga næstu seks árini.

Arbeiðsbólkurin heldur, at ein tillagað tvílæraraskipanin hevði verið ein hjálp saman við lækkaða næmingatalinum, men sum sæst í talvu 32, so ger tillagaða tvílæraraskipanin mest mun í grunddeild, 1.-3. fl., og tá ið tað eru 16-20 næmingar í flokkunum. Í miðdeild, 4.-6. fl., munar skipanin mest, tá ið tað eru 18- 20 næmingar í flokkunum. Skipanin kann tillagast, eisini við atliti at, um valt verður at seta mest inn í grunddeild í 1.-3. flokki

ella at víðka verandi skipan, sum hevði kostað umleið 3 mió. kr. um árið næstu 6 ella 9 árini.

Í teimum granskingarverkætlanum, sum arbeiðsbólkurin hevur víst á og umrøtt, verður serligur dentur lagdur á byrjanarundirvísingina, 1.-3. flokk, har úrslitini vísa, at tað eru átøk í hesum árum, sum gera størstan munin fyri læring og trivnað, og sum kunnu síggjast aftur alla skúlatíðina og eisini seinni í lívinum. Hetta eru eisini royndir í okkara egna skúla, at byrjanarundirvísingin er so ómetaliga umráðandi fyri bæði trivnað og motivatión hjá næmingunum. Tilknýti til lærarar og hinar næmingarnar, og at undirvísingin er viðkomandi og fjølbroytt.

## 15.3. Tilmæli VIII. Tvílæraraskipan og samlæring

Mælt verður til:

at 3. flokkur frá skúlaárinum 2024-25 verður partur av tvílæraraskipanini, sum er galdandi í 1. og 2. árgangi, so at øll grunddeildin er skipað eftir sama leisti

at víðka tvílæraraskipanina líðandi, so at hon verður galdandi fyri bæði grunddeild og miðdeild

at skipanin verður broytt, so at skúlaleiðslur fáa møguleika at raðfesta samlæring og tvílæraraskipan í verki, fyri at kveikja og stuðla undir eina sameinda undirvísing

at karmar og greiðar mannagongdir verða gjørdar, og at lærarar fáa umstøður at fyrireika, fremja og eftirmeta undirvísingina í felag

at lærarar fáa møguleika at menna og ogna sær viðkomandi fakligar førleikar, sum eru neyðugir fyri at implementera henda arbeiðshátt: Mett játtan til skeið innan samlæring kr. 200.000 í eitt 5 ára skeið og fyrireiking kr. 50.000 skúlaárið 2023-24

at eyka tímar verða játtaðir, tá ið næmingatalið er 13-20 næmingar í flokkunum, og at hetta eisini verður galdandi í samanløgdum flokkum

# 16. Játtanarskipan í fólkaskúlanum og skúlastødd

Vit hava í Føroyum framvegis nógvar smáar skúlar, sjálvt um talið á skúlum er lækkað. Tað eru 40 Fólkaskúlar, tríggir frískúlar umframt Skúlin á Trøðni og Lopfjølin. Harumframt eru 10 serflokkatilboð og 11 forskúlar. Næmingatalið í fólkaskúlanum, íroknað serflokkar og Lopfjølina, sum eru knýtt at einum fólkaskúla, er 6896. Í Skúlanum á Trøðni eru 59 næmingar, og í frískúlunum eru 158 næmingar, so samlaða næmingatalið er 7113. Í forskúlunum er næmingatalið tilsamans 242 næmingar. Næmingatalið í forskúlunum verður ikki talt við í næmingatalið í skúlunum[5]. Kommunurnar seta forskúlar á stovn eftir tilsøgn frá landsstýrismanninum og ásettum reglum og rinda allan kostnaðin.[6]




Sum sæst í talvuni omanfyri, so er talið á skúlum seinastu 15 árini lækkað við 21 skúlum frá 61 skúlum skúlaárið 2007-08 til 40 skúlar í verandi skúlaári. Vit síggja eisini, at helvtin av skúlunum hava færri enn 100 næmingar. Tann størsti av hesum hevur 82 næmingar. Hesir skúlarnir eru ikki sjeyflokkaðir, og heldur ikki teir minstu skúlarnir í næsta bólkinum (100 – 199 næmingar), og hava tí samanlagdar flokkar í mun til næmingatalið.

5 UVS, Næmingahagtøl skúlaárið 2022/23

6 § 4, stk. 4 í løgtingslóg um fólkaskúlan

Í teimum minstu skúlunum eru allir næmingar saman, men teir yngstu næmingarnir hava styttri skúladag, og í øðrum eitt sindur størri skúlum verða ofta tveir og viðhvørt tríggir flokkar lagdir saman.

Sum víst á, so eru tað umleið 20% av næmingunum, sum ganga í smærru skúlunum, sum ikki eru sjeyflokkaðir, og tí hava eina aðra játtanarskipan, enn galdandi er fyri sjeyflokkaðu skúlarnar.

Smærru skúlarnir eru ikki við í teimum útrokningum, sum gjørdar eru í hesum tilmæli, og teir hava eisini eina aðra játtanarskipan enn ta, sum greitt verður frá í 16.1.

## 16.1 Grundarlagið undir tímajáttanini

Játtanarskipanin var ikki eitt sjálvstøðugt evni, sum arbeiðsbólkurin skuldi umrøða, men av tí at játtanarskipanin er grundarlagið undir tí tímajáttan, sum landið veitir skúlunum til at skipa ymsu undirvísingarligu uppgávurnar, so var sera ofta nomið við ta játtanarskipan, sum er galdandi í dag. Víst varð samstundis á, at hetta er eitt evni, sum átti at verið lýst og viðgjørt nærri við atliti at verandi skipan og fyrrverandi skipanini, har tímar vórðu játtaðir til hvønn næming. Møguliga hevði borið til at funnið eitt betri og meira gjøgnumskygt játtanargrundarlag, sum var ein millumloysn millum hesar báðar skipanir.

Mælt verður tí til, at játtanarskipanin antin verður eitt evni í framhaldandi arbeiðinum við broytingum í fólkaskúlalógini saman við pkt. 4. og 5 og øðrum evnum, sum eru ásett í samgonguskjalinum, ella at játtanarskipanin verður viðgjørd í einum sjálvstøðugum arbeiðsbólki.

Verandi játtanarskipanin er bygd á flokshugtakið, har tímar fyrst og fremst verða játtaðir til hvønn flokk við atliti at kravda tímatalinum í hvørjum flokki.

**Kravda tímatalið í hvørjum flokki**

1. flokki 24 tímar
2. flokki 26 tímar
3. flokki 28 tímar
4. flokki 30 tímar
5. flokki. 31 tímar
6. flokki 31 tímar
7. flokki 33 tímar
8. flokki 37/39 tímar
9. flokki 37/39 tímar

Harumframt eru nógvar aðrar skipanir, sum hava ávísa tímajáttan:

- Tvílæraraskipan, har eyka tímar verða játtaðir í 1. og 2. flokki, tá ið næmingatalið í flokkinum er 18-26 næmingar.
- Eyka tímar í handaverk og list, har játtað verður til næmingabólkar við 12 næmingum og í svimjing, tá ið 15 næmingar eru í bólkinum
- Tá ið fleiri enn 24 næmingar eru í flokkinum, verða játtaðir eyka tímar í flokkum, har tað eru 25 og 26 næmingar

- Til serligan tørv verður játtað 24% av tillutaða tímatalinum hjá skúlanum, sum verður lagt afturat tímajáttanini til vanligu undirvísingina
- Til vikartímar verða 2% tikin av tillutaða tímatalinum, eingin eyka játtan

Harumframt er tímaniðurskurður til hesi øki:

1. Førleikatovur
2. Uppgávurætting í 7.-10. flokki
3. Verkætlanaruppgávu í 9. og 10. flokki
4. Flokslæraraarbeiði
5. Eftirútbúgving
6. Skúlavegleiðing og starvsvenjing
7. Skúlabókavørð
8. Kt-vørð
9. Leiðslu
10. Savnsrøkt
11. Skrivara í námsfrøðiliga ráðnum
12. Álitisfólk

## 16.1. Dømi um tímajáttan í miðalstórum sjeyflokkaðum skúla

| Árgangir 2022/23 | | | | | | | | | | Flokkar | | | Næmingatal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. fl. | 2. fl. | 3. fl. | 4. fl. | 5. fl. | 6. fl. | 7. fl. | 8. fl. | 9. fl. | 10. fl. | ser. | 1.-9. | 10. fl. | íalt 2022/2023 |
| 20 | 23 | 22 | 22 | 24 | 15 | 20 | 20 | 25 | 10 | | 9 | 1 | 201 |

**Játtanin til flokkarnar er:**

1. flokkur 24 tímar um vikuna + 8 tímar til tvílæraraskipan
2. flokkur 26 tímar um vikuna + 11 tímar til tvílæraraskipan
3. flokkur 28 tímar um vikuna
4. flokkur 30 tímar um vikuna
5. flokkur 31 tímar um vikuna
6. flokkur 31 tímar um vikuna
7. flokkur 33 tímar um vikuna
8. flokkur 37 tímar um vikuna
9. flokkur 37 tímar um vikuna
10. flokkur 30 tímar um vikuna

Samanlagt gevur hetta eitt árligt pultstímatal áljóðandi 326 tímar íroknað tvílæraraskipanina í 1. og 2. flokki. Umframt sjálva pultstímajáttanina, fær skúlin eisini serliga játtan, um næmingatalið fer upp um 24 næmingar í flokkinum. Tað ger tað í 9. fl., og fær skúlin 5 tímar eyka um vikuna. Harumframt eru serligar fyriskipanir við bólkastødd í handaverki og list, har játtanin er grundað á bólkar á 12 næmingar.

Eisini fær skúlin eina miðfirrað játtan á 24% av næmingatalinum, sum er ætlað til m.a. sernámsfrøðilig átøk. Í nevnda skúla eru fleiri børn, sum koma undir skipanina „føroyskt sum annaðmál," og er játtanin til føroyskt sum annaðmál hetta skúlaárið 10 tímar um vikuna. Við øllum hesum serligu fyriskipanum, endar samlaða pultstímatalið í hesum skúla skúlaárið 2022/23 á 405 pultstímum. Samlaða játtanin til skúlan er góðar 35.000 klokkutímar. Av hesum eru 405 pultstímar, sum roknaðir til klokkutímar eru 22.000 klokkutímar, og svarar tað til sløk 63% av samlaðu játtanini til skúlan.

Aðrir partar av játtanini koma frá nógvum ymiskum viðurskiftum, so sum Førleikastovu, leiðslutíð, tíð til ráðlegging og fundarvirksemi. Alt í alt liggja á leið 37% av samlaðu játtanini til skúlan tískil í øðrum virksemi enn í pultstímatalinum, sum er undirvísingartímatalið.

# 17. Flokslæraraskipanin

Ásett er í § 21, stk. 5 í fólkaskúlalógini, at í hvørjum flokki verður settur ein flokslærari at loysa serstakar uppgávur í flokkinum. Flokslærarin hevur ein sera týðandi leiklut bæði viðvíkjandi samskipan, trivnaði og læring. Flokslæraraarbeiðið er ásett í kunngerð og fevnir rættiliga breitt. Flokslærarin skal fylgja við og hava eftirlit við arbeiðinum og trivnaðinum bæði hjá einstaka næminginum og flokkinum. Hann hevur ábyrgd av at samskipa arbeiðið saman við flokstoyminum og taka hond um trivnaðin hjá einstaka næminginum. Hann er umboðsfólk floksins í samskiftinum og samstarvinum við leiðslu, lærarar og foreldur og skal javnan og í minsta lagi tvær ferðir um árið kunna heimini um fakliga førleikan, arbeiðsgongdina og trivnaðin hjá barni teirra. Hann skal boða foreldrum frá, um hann er varugur við, at barn teirra mistrívist ella hevur trupulleikar í skúlanum. Somuleiðis hevur einstaki næmingurin rætt til at fáa ráð og vegleiðing um faklig og trivnaðarlig viðurskifti frá flokslæraranum.

Tað eru bæði børn og ung, sum hava avbjóðingar, og sum hava ilt við at fóta sær, tí er so umráðandi at tikið verður hond um barnið, so tíðliga sum til ber. Eitt barn, sum mistrívist, hevur truplari við at finna vinir, at luttaka í felagsskapinum og at hugsavna seg um læringina. Sjálvsvirði, tryggleiki og felagsskapur hava stóran týdning í menningini, og her er flokslærarin lyklapersónurin, sum kann gera stóran mun í lívinum hjá einstaka næminginum og somuleiðis í arbeiðinum at menna sosiala felagsskapin og vinalagið í flokkinum.

Flokslæraraarbeiðið krevur bæði fakligan førleika, innlit og tíð at samansjóða, seta karmarnar, menna felagsskapin, samstarva og seta fyriskipanir í verk, so eingin kennir seg uttanfyri og ikki minst at taka sær av og fáa hjálp til næmingar, sum hava serligar avbjóðingar. Tað eru so nógv ymisk viðurskifti, sum kunnu vera orsøk til, at børn ikki trívast bæði sosialar og fakligar avbjóðingar, eisini angist, stúran og hendingar í lívinum hjá barninum og familjuni. Harumframt kunnu tað verða ymisk menningarórógv, m.a. ADHD ella autisma, sum gera, at børn hava ilt við at hugsavna seg og at luttaka í einum størri felagsskapi. Relatiónir millum næming og lærara og millum næmingar sínámillum hava ávirkan á trivnaðin, og serliga hevur happing stór árin, sum kunnu fylgja næminginum alt lívið. Flokslæraraarbeiðið er serliga krevjandi í flokkum, har avbjóðingar eru bæði

trivnaðarliga og fakliga. Neyðugt er at seta fyriskipanir í verk at menna flokslæraraarbeiðið, sum er eitt sera týðandi virkisøki í fólkaskúlanum.

### 17.1. Tímajáttan til flokslæraraarbeiðið

Tíðin, sum flokslærarin í dag fær til at røkja flokslæraraarbeiðið, er:
1. flokkur: 4 tímar til hvønn næming um árið. Er flokkurin 20 næm., so fær flokslærarin 80 tímar til flokslæraraarbeiðið, og hetta munar ikki nóg nógv, um talan er um flokk, har fleiri næmingar hava avbjóðingar, ella har trivnaðurin ikki er góður.
2.-10. flokkur: 3 tímar til hvønn næming um árið. Er flokkurin 20 næmingar, so verða 60 tímar um árið tillutaðir til flokslæraraarbeiðið.

### 17.2. Flokslæraraarbeiðið kostnaður

| Kostnaður í verandi skipan | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Flokkar** | **Tímar um árið** | **Næmingatal** | **Tímar íalt** | **Ársverk** | **Kostnaður** |
| 1. fl. | 4 | 705 | 2820 | 1,57 | 7f83.333,33 |
| 2.-10. fl. | 3 | 5963 | 17.889 | 9, 94 | 4.969.166,66 |
| Tilsamans | | 6668. | 20709 | 11, 51 | 5.752.499,99 |
| | | | | | |
| Kostnaður sambært tilmælinum | | | | | |
| 1.-3. fl. | 6 | 2143 | 12858 | 7,14 | 3.571.666,66 |
| 2.-6. fl. | 5 | 2054 | 10270 | 5,71 | 2.852.777, 77 |
| 8.-10.fl. | 4 | 2491 | 9964 | 5,54 | 2.767.777,77 |
| Tilsamans | | 6688 | 33092 | 18,39 | 9.192.222,22 |
| Meirkostnaður | | | 12.383 | 6,88 | 3.439.722,23 |

### 17.3. Tilmæli IX. Flokslæraraarbeiðið

Mælt verður til
at veita flokslærarum eftirútbúgving at røkja flokslæraraarbeiðið, har dentur verður lagdur á m.a. relatiónskompetansu, samskifti, samstarv, sosialan felagsskap og fyriskipan.
at hækka tímaniðurskurðin til flokslæraraarbeiðið soleiðis:
Grunddeild, 1.-3. fl.: 6 tímar til hvønn næming
Miðdeild, 4.-6. fl.: 5 tímar til hvønn næming
Hádeild, 7.-9. fl.: 4 tímar til hvønn næming

Kostnaðurin at hækka tímatalið er umleið 3.5 mió.kr.
Kostnaður at skipa eftirútbúgving verður umleið 1.5 mió. kr, sum svarar til 20 ects ella 0.75 mió. kr, sum svarar til 10 ects.

# 18. Skúlaárið

Í Føroyum ganga næmingarnir meira í skúla enn í flestu av okkara grannalondum. Hetta er bæði galdandi fyri skúladagatalið og árliga undirvísingartímatalið. Í mun til hini Norðurlondini, so er tað bara í Danmark, at næmingarnir í fólkaskúlanum hava fleiri undirvísingardagar enn í Føroyum, hóast tað, so er kravda undirvísingartímatalið í Danmark lægri. Harumframt hava danir eina skipan við tillagaðari undirvísing, sum kann fata um lektiuhálp, tvílæraraskipan og onnur átøk, men sum í nógvum skúlum er umskipað til stuðul í flokkunum. Niðanfyri er yvirlit yvir skúladagatalið í Norðurlondum og samanbering millum undirvísingartímatalið.

## 18.1. Árliga skúladagatalið í Norðurlondum

Mest vanliga skúladagatalið í Evropa liggur millum 170-190 dagar[7]. Í Norðurlondun er skúladagatalið frá 178 til 200 dagar við undantaki í Grønlandi. Niðanfyri er yvirlit yvir skúladagatalið í Norðurlondum [8].

| | |
|---|---|
| Føroyar | 193 dagar |
| Áland | 190 dagar. Í mesta lagi 190 dagar, harav kunnu vera 3 frídagar. |
| Grønland | 200-240 dagar |
| Ísland | 180 dagar |
| Danmark | 200 dagar |
| Svøríki | 190 dagar, í mesta lagi 190 og í minsta lagi 178 dagar |
| Noreg | 190 dagar |
| Finnland | 190 dagar, harav kunnu vera upp til tríggir frídagar. Skúlaárið 2022-23 er 187 dagar. |

Skúladagatalið í Føroyum hevur í mong ár verið 198 dagar, men 1. august 2019 varð dagatalið stytt eina viku til 193 dagar. Lærararnir hava framvegis 198 dagar, har teir nýta eina viku til at eftirmeta farna skúlaárið og at fyrireika næsta skúlaárið.

7 The Organisation of School Time in Europe 2021-22, Published by EACEA, Education and Youth Policy Analysis

8 Upplýsingarnar eru frá Info Norden við tilvísing til undirvísingarmálaráðini í Norðurlondum

Hetta kravdi ikki lógarbroyting, men broyting í rundskrivinum um árliga skúladagatalið, tí ásett er í § 18, stk. 1 og 2 í fólkaskúlalógini, at landsstýrismaðurin ásetur árliga talið á skúladøgum, skipar tað árliga talið á frídøgum og frítíðum, og nær summarfrítíðin byrjar.

Eftir at skúlaárið hjá næmingunum varð stytt við einari viku til 193 skúladagar í 2019, hava tað m.a. verið foreldur og Felagið heim og skúli, ið hava gjørt vart við, at summarfrítíðin hjá næmingunum er rættiliga drúgv og hava eisini víst á, at tað kann verða trupult hjá barnafamiljum at skipa frítíðina, so at foreldur og børn hava feriu samstundis, og í hvussu er meginpartin av summarfrítíðini. Feriutíðin á flestu arbeiðsplássum er 5-6 vikur árliga, og tí kunnu longri samanhangandi frítíðir vera ein avbjóðing hjá foreldrum.

Somuleiðis hevur verið víst á, at tíðarskeiðið millum jól og páskir er rættiliga drúgt, og at næmingarnir áttu at havt vetrarferiu, soleiðis sum skipanin er í flestu av okkara grannalondum. Fyrispurningar eru eisini komnir um vetrarferiu og um at flyta nakrar frídagar frá summarfrítíðini til tíðina millum jól og páskir.

Hugsanirnar um vetrarferiu og longdu summarfrítíðina eru ymiskar og sambært skúladagatalinum í Norðurlondum, so liggja vit í hægra endanum, sjálvt um skúlaárið er stytt eina viku. Evnið er nevnt á fundum, men arbeiðsbólkurin hevur ikki viðgjørt broytingar í frítíðarskipanini hjá skúlunum, og um frítíðir og frídagar í fólkaskúlanum skulu ásetast í lógini, ella skipanin skal halda fram, sum er, har landsstýrmaðurin ásetur árliga talið á skúladøgum, og nær summarfrítíðin byrjar. Orsøkin eru m.a., at hetta ikki er beinleiðis partur av arbeiðssetninginum, at skipanin í skúlaárinum uttan iva fer at verða viðgjørd í sambandi við avtaluna um arbeiðsdagar hjá lærarum eftir seinasta skúladag, og at í samgonguskjalinum hjá landsstýrinum er ásett, at frítíðarskipanin fer at verða viðgjørd saman við avvarðandi pørtum.

Hetta er eitt mál, sum verður tikið til viðgerðar komandi skúlaár í sambandi við, at semjan millum táverandi Mentamálaráðið og Føroya Lærarafelag frá 1. juni 2019 um arbeiðsdagar hjá lærarum eftir síðsta skúladag skal endurskoðast. Ásett er í semjuni, at avtalupartarnir skulu í seinasta lagi 1. mai 2024 taka avgerð um, hvørt skipanin skal enda 31. juli 2024, verða longd ávíst tíðarskeið ella sett í verk sum ein skipan, ið partarnir eru samdir um.

Avtalan var partur av skipanini at leingja summarfrítíðina hjá næmingunum. Í sambandi við, at landsstýrismaðurin ásetti árliga skúladagatalið hjá næmingunum at vera 193 dagar, varð samstundis avtala gjørd um, at fimm arbeiðsdagar verða tøkir hjá skúlaleiðarum og lærarum til ráðlegging og námsfrøðiliga menning. Avtalan er, at leiðsla og lærarar skúlans nýta fimm dagar, har næmingarnir ikki eru í skúla, til fakliga og námsfrøðiliga menning, eftirmeting og ráðlegging.

Harumframt hevur landsstýrið í samgonguskjalinum sett sær sum mál saman við avvarðandi pørtum at endurskoða skúlafrítíðina. Sostatt verður frítíðarskipanin eitt mál, sum fer at verða viðgjørt í næstum.

# 19. Lærugreinaskipanin og drúgvi skúladagurin

Í fólkaskúlanum er meginparturin av undirvísingini grundaður á kravdar lærugreinir. Tað er bara í 8. og 9. flokki, at næmingarnir hava møguleika at velja vallærugreinir. Hetta valið er tó rættiliga avmarkað, av tí at kravdu lærugreinirnar fata um 30 undirvísingartímar um vikuna í 8. og 9. flokki. Harumframt skulu skúlarnir bjóða týskt og alis- og evnafrøði, og tað eru nógvir næmingar, ið velja báðar hesar lærugreinir ella aðra fyri at tryggja sær atgongd á ávísum breytum í miðnámi. Alis- og evnafrøði hevur 3 tímar um vikuna og týskt 4 tímar, so tímatalið um vikuna verður tá rættiliga høgt millum 33 og 37 tímar, so at lítil rúmd er í skúladegnum til aðrar vallærugreinir.

Kravdu lærugreinirnar í fólkaskúlanum í 1.-9. flokki eru skipaðar í tríggjar høvuðspartar, sum umframt ítrótt eru: hugvísindaligar lærugreinir, náttúru-vísindaligar lærugreinir og handaverk og list. Lærugreinaskipanin er ásett í § 5, stk. 2 í fólkaskúlalógini.

Næmingarnir hava eina rættiliga drúgva skúlaviku, langar skúladagar, har bókligu lærugreinirnar fylla nógv, umframt at næmingatalið í nógvum flokkum er høgt. Hetta eru viðurskifti, sum neyðugt er at hyggja nærri eftir og tillaga. Tað er ein sannroynd, sum bæði lærarar og leiðarar vísa á, at næmingarnir eru rættiliga móðir, tá ið komið er til bæði 7. og 8. undirvísingartíma, at ivasamt er, hvat teir fáa burturúr síðstu undir-vísingartímunum.

Samanbera vit við onnur viðurskifti sum ítrótt, so eru royndirnar, at tað nyttar ikki at venja meira enn eitt vist, tí ovurvenjing viðførir ikki betri íðkanarførleika. Einaferð er málið fult, og næmingurin megnar ikki at taka ímóti meira læring sama dag. Hóast hetta, so hava vit seinastu árini bara lagt afturat undirvísingartíðini hjá næmingunum og liggja fremst á hesum øki í Norðurlondum. Samanberandi kanningar vísa tó ikki, at fakligi førleikin er samsvarandi høga vikutímatalinum, so tað er einki at ivast í, at tal av tímum ikki er ekvivalent við meira læring.

## 19.1. Kravdar lærugreinir í 1.-9. flokki

| Hugvísindaligar lærugreinir | Náttúruvísindaligar lærugreinir | Handaverk, list og ítróttur |
|---|---|---|
| Kristnikunnleiki 1.-9. fl. | Støddfrøði 1.-9. fl. | Tónleikur 1.-7. fl. |
| Føroyskt 1.-9. fl. | Heimstaðarlæra 1.-3. fl. | Tilevning 1.-7. fl. |
| Danskt 3.-9. fl. | Náttúra og tøkni 4.-6. fl. | Handarbeiði 1.-7. fl. |
| Enskt 4.-9. fl. | Alis-/evnafrøði 7. fl. | Smíð 1.-7. fl. |
| Søga 4.-9. fl. | Landalæra 7.-9. fl. | Heimkunnleiki 1.-7. fl. |
| Samfelagsfrøði 7.-9. fl. | Lívfrøði 7.-9. fl. | Ítróttur 1.-9. fl. |

## 19.2. Tíma- og lærugreinabýtið í fólkaskúlanum

| Lærugrein | | 1. fl. | 2. fl. | 3. fl. | 4. fl. | 5. fl. | 6. fl. | 7. fl. | 8. fl. | 9. fl. | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Hugvísindaligar lærugreinir 144 tímar = 54,6% | | | | | | | | | | | |
| 1 | Kristnikunnleiki | 1 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 2 | 2 | 16 |
| 2 | Føroyskt | 11 | 11 | 9 | 6 | 6 | 6 | 5 | 5 | 5 | 64 |
| 3 | Danskt | | | 3 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 27 |
| 4 | Enskt | | | | 2 | 3 | 4 | 4 | 4 | 4 | 21 |
| 5 | Søga/samtíð | | | | 1 | 2 | 1 | 2 | 2 | 2 | 10 |
| 6 | Samfelagsfrøði | | | | | | | 2 | 2 | 2 | 6 |
| Náttúruvísindaliga lærugreinir 78 tímar = 29,5% | | | | | | | | | | | |
| 7 | Støddfrøði | 7 | 7 | 6 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 50 |
| 8 | Heimstaðarlæra<br>Náttúra og tøkni | 2 | 2 | 2 | 3 | 3 | 3 | | | | 15 |
| 9 | Landalæra | | | | | | | 1 | 2 | 2 | 5 |
| 10 | Lívfrøði | | | | | | | 2 | 2 | 2 | 6 |
| 11 | Alis/evnafrøði | | | | | | | 2 | | | 2 |
| Ítróttur 17 tímar = 6,4% | | | | | | | | | | | |
| **12** | Ítróttur | **1** | **2** | **2** | **2** | **2** | **2** | **2** | **2** | 2 | 17 |
| Handaverk og list 25 tímar= 9,5% | | | | | | | | | | | |
| 13 | Tónleikur, tilevning, handarbeiði, smíð og heimkunnleiki | | | | | | | | | | 25 |
| | | 2 | 2 | 4 | 5 | 4 | 4 | 3 | | | |
| Vallærugreinir | | | | | | | | | | | |
| | Týskt/annað mál | | | | | | | | 4 | 4 | 8 |
| | Alis og evnafrøði | | | | | | | | 3 | 3 | 6 |
| | Aðrar vallærugr. | | | | | | | | 2 | 2 | 4 |
| Minsta tímatal | | **24** | **26** | **28** | **30** | **31** | **31** | **33** | **30** | **30** | **263/264** |
| Íroknað vallærugr. | | **24** | **26** | **28** | **30** | **31** | **31** | **33** | **37/39** | **37/39** | 277/81 |

### 19.3. Samanberingar

Samanborið er tímatalið, ið føroysk børn eru í skúla við tímatalið, ið børn í øðrum Norðurlondum eru í skúla. Samanberingar eru millum Føroyar og Danmark, Føroyar og Finnland og samanbering í OECD frágreiðing frá 2021 um Norðurlond, har vit hava lagt Føroyar afturat. Hesi tøl vísa, at føroysk skúlabørn hava longstu skúlavikuna í Norðurlondum, og hóast vit hava 9 ára undirvísingarskyldu, so er samlaða tímatalið í føroyska fólkaskúlanum hægri enn í teimum londum, sum hava 10 ára undirvísingarskyldu.

## 19.4. Samanberingar millum Føroyar og Danmark

| | Lærugrein | 1.fl. | 2. fl. | 3. fl. | 4. fl. | 5. fl. | 6. fl. | 7. fl. | 8. fl. | 9. fl. | Tils |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Hugvísindaligar lærugreinir | | | | | | | | | | |
| 1 | Kristnikunnleiki | 1 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 2 | 2 | 16 |
| 2 | føroyskt | 11 | 11 | 9 | 6 | 6 | 6 | 5 | 5 | 5 | 64 |
| 3 | Danskt | | | 3 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 27 |
| 4 | Enskt | | | | 2 | 3 | 4 | 4 | 4 | 4 | 21 |
| 5 | Søga/samtíð | | | | 1 | 2 | 1 | 2 | 2 | 2 | 10 |
| 6 | Samfelagsfrøði | | | | | | | 2 | 2 | 2 | 6 |
| | **Náttúruvísindaliga lærugreinir** | | | | | | | | | | |
| 7 | Støddfrøði | 7 | 7 | 6 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 50 |
| 8 | Heimstaðarlæra<br>Náttúra og tøkni | 2 | 2 | 2 | 3 | 3 | 3 | | | | 15 |
| 9 | Landalæra | | | | | | | 1 | 2 | 2 | 5 |
| 10 | Lívfrøði | | | | | | | 2 | 2 | 2 | 6 |
| 11 | Alis/evnafrøði | | | | | | | 2 | | | 2 |
| | **Handaverk og list** | | | | | | | | | | |
| 12 | Ítróttur | 1 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 17 |
| 13 | Tónleikur, tilevning, handarbeiði, smíð og heimkunnleiki | | | | | | | | | | 25 |
| | | 2 | 2 | 4 | 5 | 4 | 4 | 3 | | | |
| | **Vallærugreinir, ikki kravdar** | | | | | | | | | | |
| 14 | Valfak, ikki krav | | | | | | | | 7 | 7 | 14 |
| 15 | Týskt/a. fr. mál | | | | | | | | 4 | 4 | |
| 16 | Alis-/evnafrøði | | | | | | | | 3 | 3 | |
| | Aðrar vallærugr. | | | | | | | | 2 | 2 | |
| **Minsta tímatal** | | 24 | 26 | 28 | 30 | 31 | 31 | 33 | 30 | 30 | 264 |
| **Íroknað vallærugr.** | | 24 | 26 | 28 | 30 | 31 | 31 | 33 | 37 | 37 | 278 |

Nakrar smærri broytingar eru seinastu árini gjørdar í tíma- og lærugreinabýtinum í Danmark, har samlaða tímatalið er hækkað frá 263 tímum til 266 tímar ella helst 265, tí at í yvirlitinum er kristni lagt afturat bæði í 7. og 8.flokki, hóast skipanin er, at næmingar, sum ganga til konfirmantafyrireiking hava ikki kristni, og tímatalið verður lækkað við 30 undirvísingartímum. Í donsku fólkaskúlalógini er eisini ein møguleiki sambært § 16 d, stk. 2 at flyta 30 tímar frá 8. flokki til 7. flokk, um konfirmantaundirvísingin er í 8. flokki, so kravda tímatalið í 7. og 8. fl. kann variera við einum tíma um vikuna og má tí takast við fyrivarni. T.d. hevur 9. flokkur ein tíma afturat í søgu og 2. flokkur ein tíma afturat í donskum. Tímatalið í 3. fl. er økt

| | Lærugrein | 1.fl. | 2. fl. | 3. fl. | 4. fl. | 5. fl. | 6. fl. | 7. fl. | 8. fl. | 9. fl. | Tils |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Hugvísindaligar lærugreinir | | | | | | | | | | |
| 1 | Kristnikunnleiki | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 2 | | 1 | 1 | 10 |
| 2 | Danskt | 11 | 11 | 8 | 7 | 7 | 7 | 7 | 7 | 7 | 72 |
| 3 | Enskt | 1 | 1 | 2 | 2 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 21 |
| 4 | Týskt/a.fr. mál | | | | | 2 | 2 | 3 | 3 | 3 | 13 |
| 5 | Søga | | | 1 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 13 |
| 6 | Samfelagsfrøði | | | | | | | | 2 | 2 | 4 |
| **Náttúruvísindaliga lærugreinir** | | | | | | | | | | | |
| 7 | Støddfrøði | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 45 |
| 8 | Náttúra og tøkni | 1 | 2 | 2 | 3 | 2 | 2 | | | | 12 |
| 9 | Landalæra | | | | | | | 2 | 1 | 1 | 4 |
| 10 | Lívfrøði | | | | | | | 2 | 2 | 1 | 5 |
| 11 | Alis/evnafrøði | | | | | | | 2 | 2 | 3 | 7 |
| **Handaverk og list** | | | | | | | | | | | |
| 12 | Ítróttur | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 18 |
| 13 | Tónleikur | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | | | | 11 |
| 14 | Myndlist | 1 | 2 | 2 | 2 | 1 | 1 | | | | 9 |
| 15 | Handaverk, snið-geving, matkunn | | | 2 | 3 | 4 | 4 | 2 | | | 16 |
| **Vallærugreinir** | | | | | | | | | | | |
| 16 | Valfak | | | | | | | 2 | 2 | 2 | 6 |
| **tímatal um árið** | | 25 | 26 | 27 | 29 | 31 | 31 | 33 | 32 | 32 | 266 |
| **Styðjandi undirvísing** | | **12** | **11** | **10** | **15** | **13** | **13** | **13,6** | **14,7** | **14,6** | **117** |
| **Undirvísingartíð íalt** | | 37 | 37 | 37 | 44 | 44 | 44 | 46,6 | 46,6 | 46,6 | 383 |

við einum tíma, har 2 tímar eru lagdir afturat í handaverk, sniðgeving og heimkunnleika, samstundis sum tímatalið í donskum er lækkað við einum tíma. Umskipanin, sum er gjørd, er, at tímatalið í flokkunum nú er: 25-26-27-29-31-31-33-32-32[9].

Undirvísingartímatalið í Føroyum og Danmark kann tykjast rættiliga líkt, men Føroyar hava yvirvág. Kravda tímatalið í Danmark, íroknað vallærugreinir, er 266 tímar, og í Føroyum íroknað vallæugreinir er tað millum 272 og

9 https://www.uvm.dk/folkeskolen/fag-timetal-og-overgange/timetal

278, alt eftir valinum hjá næmingunum. Rættiliga stórir munir eru eisini innan lærugreinir, serliga í móðurmálinum og í handaverk og list. Vit hava 64 tímar í føroyskum, og danir hava 72 tímar í donskum, vit hava 25 tímar í handaverk- og list, og danir hava 36 tímar í samsvarandi lærugreinum.

## 19.5. Samanberingar millum Føroyar – Finnland

| | Lærugrein | 1.fl. | 2. fl. | 3. fl. | 4. fl. | 5. fl. | 6. fl. | 7. fl. | 8. fl. | 9. fl. | Tils |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Hugvísindaligar lærugreinir | | | | | | | | | | |
| 1 | Kristnikunnleiki | 1 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 1 | 2 | 2 | 16 |
| 2 | føroyskt | 11 | 11 | 9 | 6 | 6 | 6 | 5 | 5 | 5 | 64 |
| 3 | Danskt | | | 3 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 27 |
| 4 | Enskt | | | | 2 | 3 | 4 | 4 | 4 | 4 | 21 |
| 5 | Søga/samtíð | | | | 1 | 2 | 1 | 2 | 2 | 2 | 10 |
| 6 | Samfelagsfrøði | | | | | | | 2 | 2 | 2 | 6 |
| | **Náttúruvísindaliga lærugreinir** | | | | | | | | | | |
| 7 | Støddfrøði | 7 | 7 | 6 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 50 |
| 8 | Heimstaðarlæra Náttúra og tøkni | 2 | 2 | 2 | 3 | 3 | 3 | | | | 15 |
| 9 | Landalæra | | | | | | | 1 | 2 | 2 | 5 |
| 10 | Lívfrøði | | | | | | | 2 | 2 | 2 | 6 |
| 11 | Alis/evnafrøði | | | | | | | 2 | | | 2 |
| | **Handaverk og list** | | | | | | | | | | |
| 12 | Ítróttur | 1 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 17 |
| 13 | Tónleikur, tilevning, handarbeiði, smíð og heimkunnleiki | | | | | | | | | | 25 |
| | | 2 | 2 | 4 | 5 | 4 | 4 | 3 | | | |
| | **Vallærugreinir, ikki kravdar** | | | | | | | | | | |
| 14 | Valfak, ikki krav | | | | | | | | 7 | 7 | 14 |
| 15 | Týskt/a. fr. mál | | | | | | | | 4 | 4 | |
| 16 | Alis-/evnafrøði | | | | | | | | 3 | 3 | |
| | Aðrar vallærugr. | | | | | | | | 2 | 2 | |
| **Minsta tímatal** | | 24 | 26 | 28 | 30 | 31 | 31 | 33 | 30 | 30 | 264 |
| **Íroknað vallærugr.** | | 24 | 26 | 28 | 30 | 31 | 31 | 33 | 37 | 37 | 278 |

Undirvísingartølini í Finnlandi eru frá 2019. Tær broytingar, sum eru gjørdar síðani sambært teimum upplýsingum, vit hava fingið, eru, at 1. fl. hevur 20 tímar ístaðin fyri 19 tímar, og 7. fl. hevur 29 tímar, ístaðin fyri 30, so samlaða tímatalið er tað sama 224 tímar, sum eru býttir soleiðis millum flokkarnar í 1.-9. flokki: 20-20-22-24-25-25-29-29-30.[10]

10 https://www.oph.fi/sv

| SUBJECT / GRADES | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 | 8 | 9 | Tot. | Føroyar |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | | | | | |
| Mother tongue and literature | 7 | 7 | 5 | 5 | 4 | 4 | 3 | 3 | 4 | 42 | 64 |
| A1-language, 1. foreign language | | 1 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 3 | 16 | 21 |
| 2nd mother tongue, Swedish | | | | | | 2 | 1 | 2 | 1 | 6 | 27 |
| Mathematics | 3 | 3 | 4 | 4 | 4 | 3 | 3 | 4 | 4 | 32 | 50 |
| Environmental studies | 2 | 2 | 2 | 3 | 3 | 2 | | | | 14 | 15 |
| Biology and Geography | | | | | | | 2 | 2 | 3 | 7 | 11 |
| Physics and Chemistry | | | | | | | 2 | 3 | 2 | 7 | 8 |
| Health education | | | | | | | 1 | 1 | 1 | 3 | |
| Religion/ Ethics | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 2 | 1 | 1 | 1 | 10 | 16 |
| History and Civics | | | | 1 | 2 | 2 | 2 | 2 | 3 | 12 | 10 |
| Music | 1 | 1 | 2 | 2 | 1 | 1 | 2 | | | 10 | 25 |
| Visual art | 1 | 1 | 2 | 2 | 1 | 1 | 2 | | | 10 | |
| Handicraft | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 2 | 3 | | | 15 | |
| Physical education | 2 | 2 | 2 | 2 | 3 | 2 | 2 | 2 | 3 | 20 | 17 |
| Optional subjects in arts | | | | | | 6[1] | | | 5[2] | 11 | |
| Domestic science | | | | | | | 3 | | | 3 | |
| Student counselling | | | | | | | 0,5 | 1 | 1 | 2,5 | |
| ICT | | | | | | | 0,5 | | | | |
| Optional subjects | | | | | 2 | 2 | 0 | 6 | 4 | 14 | 7/9 |
| A2-language, optional language | | | | | 2 | 2 | 2 | 3 | 3 | 12 | |
| Lessons /week | 19 | 20 | 22 | 24 | 25 | 25 | 30 | 29 | 30 | 224 | |
| | | | | | | | | | | | |
| Føroyar | 24 | 26 | 28 | 30 | 31 | 31 | 33 | 30 | 30 | | 263 |

Tað er rættiliga stórur munur á kravda tímatalinum í Føroyum og Finnlandi í yngru flokkunum í grund- og miðdeild, meðan munurin minkar í hádeild. Somuleiðis er rættiliga stórur munur á samlaða vikutímatalinum, sum í Finnlandi er 224 tímar og í Føroyum 264. Sera stóru munur er í málsligu lærugreinunum, har finnar hava 42 tímar í móðurmálinum, og vit hava 64. Í teirra næsta móðurmáli, svenskum, hava finnar 6 tímar, og til samanberingar hava vit 27 tímar í donskum. Í fyrsta fremmandamáli hava finnar 16 tímar og vit 21 tímar.

Í Føroyum eru vallærugreinir sum alis-og evnafrøði, týskt og aðrar vallærugreinir ikki taldar við í kravda tímatalið. Í Finnlandi verður onnur vallærugreinin, 2. fremmandamál og valfak roknað við í kravda tímatalið í 5. -9. flokki, meðan vallærugreinin list ikki er roknað við í kravda tímatalið, men telur 11 tímar. Harumframt eru tónleikur, visuell list og handverk kravdar lærugreinir 1.-7. flokki.

## 19.6. OECD frágreiðing frá 2021[11] – Samanberingar millum Norðurlond

| | Fólkaskúli – grunddeild – og miðdeild, 1.-6. flokkur | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Land | Flokkar í barnaskúla | Byrjanar-aldur | Miðal dagar um árið | Miðal kravdir tímar per ár | Ikki kravdir tímar |
| Danmark | 7 | 6 | 200 | 1000 | 0 |
| Finnland | 6 | 7 | 189 | 660 | 33 |
| Ísland | 7 | 6 | 170 | 729 | |
| Noreg | 7 | 6 | 190 | 753 | |
| Svøríki | 6 | 7 | 178 | 714 | |
| Føroyar | 6 | 7 | 193 | 1094 | 0 |
| Fø,uppsk. | 6 | 7 | 193 | 1062 | 0 |

| | | Fólkaskúli – Hádeild, 7-9 flokkur | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Land | Kravdir flokkar í hádeild | Aldur tá hádeild byrjar | Miðal dagatal um árið | Miðal kravdir tímar um árið | Ikki kravdir tímar FO bert í 8. og 9. fl. |
| Danmark | 3 | 13 | 200 | 1200 | |
| Finnland | 3 | 13 | 189 | 808 | 87 |
| Ísland | 3 | 13 | 170 | 839 | |
| Noreg | 3 | 13 | 190 | 874 | |
| Svøríki | 3 | 13 | 178 | 869 | |
| Føroyar | 3 | 13 | 193 | 1197 | 270 |
| Fø,uppsk | 3 | 13 | 193 | 1235 | 0 |

11 Norðurlendsku tølini eru frá OECD (2021), *Education at a Glance 2021: OECD Indicators*, OECD Publishing, Paris, https://doi.org/10.1787/b35a14e5-en.

| Land | Ár kravd skúla-gongd | Kravdir tímar um vikuna | | Kravt tímatal tils. | Tímatal og valfak | Umroknað tímar um vikuna |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | **Grund og miðdeild** | **Hádeild** | | | |
| Danmark | 10 | 25 | 30 | 10600 | 10600 | 27 |
| Finnland | 9 | 17 | 21 | 6385 | 6840 | 20 |
| Ísland | 10 | 21 | 25 | 7616 | 7616 | 20 |
| Noreg | 10 | 20 | 23 | 7894 | 7894 | 20 |
| Svøríki | 9 | 20 | 24 | 6890 | 6890 | 20 |
| Føroyar | 9 | 28 | 31 | 10152 | 10692 | 31 |
| Før Nýtt uppskot | 9 | 28 | 32 | 10075 | 10075 | 29 |

## 19.7. Tilmæli X og XI. Broytingar í kravda vikutímatalinum

X. Mælt verður til:

at broytingar verða gjørdar í § 19, stk. 2, so at kravda tímatalið í hvørjum undirvísingarparti verður lækkað soleiðis:

Grunddeild, 1.-3. flokkur: 25 tímar
Miðdeild, 4.-6. flokkur: 30 tímar
Hádeild, 7.-9. flokkur: 32 tímar

XI. Mælt verður til:

at ásetingin í § 18, stk. 2 um dagligu undirvísingartíðina verður broytt soleiðis, at undirvísingartíðin í mesta lagi verður:

1) í forskúla, 1., 2., og 3. flokki, fimm tímar um dagin
2) í 4., 5. og 6. flokki, 6 tímar um dagin og
3) í 7., 8. og 9. flokki, 7 tímar um dagin.

# 20. Broytingar í tíma- og lærugreinabýtinum

Sum víst á í yvirlitinum í tíma- og lærugreinabýtinum, so er býtið millum lærugreinapartarnar í føroyska fólkaskúlanum ógvuliga ójavnt millum ymsu fakøkini, har mállærugreinir eiga størsta partin av undirvísingartímatalinum, 54,6%, meðan náttúruvísindaligi parturin er 29, 5%, ítróttur 6,4% og handaverk og list 9,5%. Ein orsøk er, at vit hava nógvar tímar í málsligu lærugreinunum. Vit hava eitt mál meira, har danskt er kravd lærugrein frá 3. flokki, og sum ásett í § 1 í heimastyrislógini, so skulu vit læra danskt til lítar, og tí hevur lærugreinum fleiri tímar enn næsta fremmandamál í hinum Norðurlondum, vit sambera okkum við.

Arbeiðsbólkurin hevur gjørt eina umraðfesting, har roynt verður at fáa eitt javnari býti, serliga millum hugvísindaligu- og náttúruvísindaligu lærugreinarnar. Eisini er annað fakbýti gjørt enn í galdandi fólkaskúlalóg, har mentan og samfelag er ein bólkur og somuleiðis likamlig og skapandi læring.

Áherðsla er løgd á frælsi hjá skúlunum at kunna raðfesta innan teir fýra lærugreinapartarnar. Samstundis sum mælt verður til, at leiðsla skúlans saman við læraratoyminum virkar fyri, at møguligt verður at røkka málunum í námsætlanunum innan fyri ásetta vikutímatalið. Leiðsla og toymi gera lærugreinabýtið í t.d. mállærugreinunum, har málini verða nádd, og undirvísingin verður skipað eftir tørvi og evnum, ið verða viðgjørd í ávísa flokkinum. Mett verður, at í ávísum lærugreinum fylla námsætlanirnar ov nógv og eru ov stýrandi niður í smálutir, har tað eru ov nógv einstøk mál, ið skulu náast. Hetta kann forða fyri arbeiðinum við sjálvvaldum evnum, evniskunnandi undirvísing og fjølbroyttum arbeiðshættum. Hetta er eitt mál, ið eigur at verða viðgjørt í sambandi við, at námsætlanirnar verða endurskoðaðar, eisini mugu krøvini í námsætlanunum lagast til broytta tímatalið.

Á vári 2019 vórðu broytingar gjørdar í § 19, stk. 3 í fólkaskúlalógini, soleiðis at skúlar fingu møguleika at flyta 2 tímar av kravda undirvísingartímatal-inum í hvørjum flokki til at menna sang og tónleik og aðrar lærugreinir

innan handaverk og list, til vallærugreinir og at seta inn í flokkum við eyka lærаратímum. Afturmeldingarnar eru, at skúlaleiðarar eru sum heild væl nøgdir við henda møguleika, sum gevur teimum ávíst frælsi at leggja til rættis í mun til tørvin í einstaka flokkinum. Skúlaleiðarar halda tó, at skipanin er ov stirvin, m.a. tí at teir ikki kunnu umskipa tímar í føroyskum, sum er tann lærugreinin, ið hevur hægsta tímatalið. Leiðslurnar ynskja at fáa størri frælsi at leggja til rættis í egnum skúla.

Arbeiðsbólkurin heldur, at ein gongd leið er at raðfesta tíma- og lærugreinabýtið í prosentstigum í lærugreinabólkunum, sum fer at geva einstaka skúlanum størri frælsi og ábyrgd at skipa tímatalið í lærugreinum, so tað styðjar undir bæði fakliga og trivnaðarliga tørvin í einstaka flokkinum.

Broytta tíma- og lærugreinabýtið eigur at skapa betri fortreytir, umstøður og møguleikar fyri, at lærarar kunnu fara í dýpdina í undirvísingini við fleiri arbeiðshættum, ið eru kannandi, verkligir ella skapandi, so at skúladagurin bæði verður meira samanhangandi- og fjølbroyttur. Tvørgreinalig undirvísing er fortreyt fyri at røkka hesi ætlan at samstarva tvørtur um lærugreinamørk, soleiðis at samanhangur er millum lærugreinar, og sum skuldi givið næmingunum betri innlit og fatan av, hvussu viðurskifti eru tengd hvørt at øðrum m.a. í náttúruni og líviumstøðum.

## 20.1. Alis- og evnafrøði

Í verandi fólkaskúlaskipan er alis- og evnafrøði bara kravd lærugrein í 7. flokki. Arbeiðsbólkurin heldur ikki, at hetta er ein nøktandi skipan, bæði tá ið hugsað verður um okkara egna umhvørvi og vinnulív, sum í stóran mun er knýtt at aling og fiskiskapi og teimum avbjóðingum sum eru viðvíkjandi orku, dálking og burðardygd. Innan náttúruvísindi er alis- og evnafrøði grundarlagið undir bæði lívfrøði og landalæru, og tí eigur vitanin innan alis- og evnafrøði at koma øllum næmingum til góðar.

At gera royndir, savna data og talviðgerð er eisini partur av alis- og evnafrøði, sum tí við fyrimuni kann samstarva við støddfrøði.

Skipanin eigur eisini at verða broytt viðvíkjandi næmingatalinum, soleiðis at tað í mesta lagi eru 12 næmingar í hvørjum flokki, tá ið royndir verða gjørdar. Tað sama eigur at verða galdandi í náttúru og tøkni, serliga tí har eru nógvar kanningar, sum verða gjørdar úti í náttúruni, í bø og haga, í fjøruni og í áum og vøtnum.

## 20.2. Týskt

Í mun til tímatalið í hvørjum árgangi sambært § 19, stk. 2 í fólkaskúlalógini, hava limirnir í bólkinum verið samdir um, at tað í núverandi skipan eru ov nógvir undirvísingartímar á tímatalvuni, serliga í hádeild. Skúladagurin er langur í hádeild, har næmingar kunnu hava 37-39 undirvísingartímar um vikuna, um tey hava valt týskt og alis-/evnafrøði, so hava tey 37 t/v,

og velja tey eina vallærugrein afturat, so er tímatalið 39 t/v, umframt heimaarbeiði og frítíðarlív. Um næmingarnir velja bæði týskt og alis -/ evnafrøði, so viðførir tað m.a., at næmingarnir ikki hava rúmd og tíð til aðrar áhugaverdar vallærugreinar.

Sum heild metir arbeiðsbólkurin, at skúladagurin í dag er ov langur við ov nógvum bókligum lærugreinum og innihaldi, og at ov nógvir tímar eru í málsligum lærugreinum í okkara skúlaskipan samanborið við hini Norðurlondini, og eisini er samlaða undirvísingartímatalið í føroyska fólkaskúlanum nakað hægri enn í okkara grannalondum. Við at minka um samlaða undirvísingartímatalið, verður samstundis størri rásarúm at vaksa um lærаratíðina til hvønn einstakan næming. Tilmælið hjá arbeiðsbólkinum er tí, at lækka næmingatalið til 20 næmingar og seta inn við ávísari tvílæraraskipan, tá ið næmingatalið er 13-20 næmingar í flokkunum.

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt, hvørt tað er uppgávan hjá fólkaskúlanum at tryggja, at næmingar lúka serkrøv í miðnámi, ella um henda uppgávan ikki liggur betur hjá miðnámi. Fólkaskúlin hevur eina stóra uppgávu í sær sjálvum, har skúlin í samstarvi við foreldrini skal skipa eina heildarmenning fyri einstaka næmingin bæði við atliti at fakligu læringini, trivnaði, sosialum førleikum og almennum dannilsi, so næmingurin er fyrireikaður til víðari útbúgving og arbeiði. Fólkaskúlin skal hava sínar karmar, og so má miðnám rætta seg til hesar og gera egnar fyriskipanir, so at allir næmingar, ið hava áhuga og førleika til tess kunnu søkja inn á eina miðnámsútbúgving. Hetta kann samanberast við, at latín áður var eitt krav til málsligu deild í miðnámi, men tey, sum byrjaðu, kundu byrja skúlaárið við at taka eykatímar í latíni og fara upp til roynd.

Ein líknandi mannagongd við t.d. fyrireikingarflokki á miðnámi í týskum kann framyvir nýtast. Samanumtikið mælir arbeiðsbólkurin til, at týskt í fólkaskúlanum ikki skal verða førleikagevandi sum upptøkukrav til miðnám. Arbeiðsbólkurin metir ikki, at næmingar so tíðliga sum í 7. flokki skulu velja seg inn á sína lívsleið við at velja týskt ella aðra lærugrein, ætlaðar ávísari lestararleið, sum longu í fólkaskúlanum fer at avmarka teirra møguleikar víðari fram á yrkis- ella lestrarleið. Við at avtaka hetta valið, kunnu vit samstundis taka eitt óneyðugt trýst av herðunum hjá næmingunum.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at týskt í framhaldsdeildini framyvir verður skipað sum valfak á jøvnum føti við aðrar vallærugreinir við tveimum undirvísingartímum um vikuna, har kravið um at hava havt týskt sum upptøkukrav til miðnám, verður tikið burtur.

## 20.3. Tilmæli XII, XIII og XIV. Broytingar í tíma- og lærugreinabýtinum

XII. Mælt verður til:

at tíma- og lærugreinabýtið verður skipað prosentstigum í hesi fýra fakøki:
Mállærugreinir: føroyskt, danskt og enskt
Náttúruvísindi: støddfrøði, heimstaðarlæra, náttúra og tøkni, alisfrøði, evnafrøði og lívfrøði
Mentan og samfelag: kristnikunnleiki, søga og samtíð, samfelagsfrøði og landalæra
Likamlig og skapandi læring: ítróttur, sangur, tónleikur, tilevning, handarbeiði, smíð og heimkunnleiki.
Í hádeild: ítróttur og vallærugreinir innan handaverk og list og týskt, har týskt verður partur av vallærugreinunum við 2 t/v.

XIII. Mælt verður til:

at undirvísingarpartarnir verða ásettir í § 5 ella § 19 í lógini, og at lærugreinabýtið verður gjørt fyri hvønn undirvísingarpart.
Undirvísingarpartarnir fevna um:
a) grunddeild, sum er 1.-3. flokkur
b) miðdeild, sum er 4.-6. flokkur og
c) hádeild, sum er 7.-9. flokkur.

XIV. Mælt verður til:

at alis- og evnafrøði verður kravd lærugrein í hádeild, 7.-9. flokki.
at ásett verður bólkastødd við í mesta lagi 12 næmingum í sambandi við náttúru og tøkni og alis- og evnafrøði eftir somu skipan sum í handaligu og verkligu lærugreinunum.

## 20.4 Tilmæli XV. Tíma- og lærugreinabýtið í grunddeild 1.-3. flokkur

| **Lærugreinar** | **Tímar 1. fl.** | **Tímar 2. fl.** | **Tímar 3. fl.** | **Broyting tímar** | **í %** | **í %** | **í %** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Mállærugreinar (føroyskt og danskt** | **9** | **9** | **9** | **-7** | 36 | 36 | 36 |
| Náttúruvísindi (støddfrøði og heimstaðarlæra) | 9 | 9 | 9 | **+ 1** | 36 | 36 | 36 |
| Mentan og samfelag (kristnikunnleiki) | 2 | 2 | 2 | **+ 1** | 8 | 8 | 8 |
| Likamlig og skapandi læring (ítróttur, handaverk og list) | 5 | 5 | 5 | **+ 2** | 20 | 20 | 20 |
| **Tilsamans** | **25** | **25** | **25** | **- 3** | **100** | **100** | **100** |

Í uppskotinum um broytt tíma- og lærugreinabýti í grunddeild, samanborið við verandi tíma- og lærugreinabýtið, er tímatalið í móðurmállærugreinum lækkað við 7 tímum, náttúruvísindi er hækkað við einum tíma, mentan og samfelag er hækkað við einum tíma og ítróttur og handaverk og list er hækkað við 2 tímum. Samstundis er skúladagurin styttur í 2. og 3. flokki við einum tíma í 2. flokki og trimum tímum í triðja flokki, meðan tímatalið í 1. flokki er økt við einum tíma. Mælt verður til, at tímatalið í grunddeild verður 25 tímar um vikuna.

Her kunnu sjálvsagt tillagingar gerast m.a. í mállærugreinum, har 3. flokkur kundi havt 10 tímar, tí at danskt byrjar í triðja flokki, og samstundis kundi tímatalið í náttúruvísindi verið lækkað við einum tíma í 3. flokki. Landsstýrið hevur í samgonguskjalinum sett sær sum mál at styrkja føroyska málið. Royndirnar eru tó, at hóast tímatalið í føroyskum er hækkað nógv og telur umleið helvtina av tímunum í 1. flokki og somuleiðis í 2. flokki, umframt at føroyskt verður nýtt í øllum lærugreinum uttan fremmandamáli, so sæst hetta ikki í nóg stóran mun aftur í kanningum, sum gjørdar eru bæði viðvíkjandi lesiáhuga og í lands- og pisaroyndum. Vit eiga at verja um okkara móðurmál, og har hevur byrjanarundirvísingin stóran týdning, og at hon er námsfrøðiliga kveikjandi. Heldur ikki er neyðugt at hækka tímatalið í fyrsta flokki, men uppskotið er, at hava sama tímatal í øllum trimum flokkunum í grunddeildini.

## 20.5. Tilmæli XVI. Tíma- og lærugreinabýtið í miðdeild, 4.-6. flokkur

| Lærugreinar | Tímar 4. fl. | Tímar 5. fl. | Tímar 6. fl. | Broyting Tímar | í % | í % | í % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Mállærugreinar (føroyskt, danskt og enskt)** | 10 | 10 | 10 | - 9 | 33,3 | 33,3 | 33,3 |
| **Náttúruvísindi (støddfrøði, náttúra og tøkni )** | 8 | 8 | 8 | 0 | 26,7 | 26,7 | 26,7 |
| **Mentan og samfelag (søga, samtíð og kristnikunnleiki)** | 5 | 5 | 5 | + 5 | 16,7 | 16,7 | 16,7 |
| **Likamlig og skapandi læring (ítróttur, handaverk og list)** | 7 | 7 | 7 | **+ 2** | 23,3 | 23,3 | 23,3 |
| **Tilsamans** | **30** | **30** | 30 | - 2 | 100 | 100 | 100 |

Í uppskotinum um broytt tíma- og lærugreinabýti í miðdeild, samanborið við verandi tíma- og lærugreinabýtið, er tímatalið í mállærugreinum lækkað við 9 tímum, í náttúruvísindi er eingin broyting í tímatalinum, mentan og samfelag er hækkað við 5 tímum og ítróttur og handaverk og list er hækkað við 2 tímum. Samstundis er skúladagurin styttur í 5. flokki og 6. flokki við einum tíma, meðan tímatalið í 4. flokki er tað sama, 30 tímar um vikuna.

Her kunnu sjálvsagt tillagingar gerast m.a. í mállærugreinum, har 4. og 5. flokkur kundu havt 11 tímar, tí at enskt byrjar í 4. flokki, og samstundis kundi tímatalið í mentan og samfelag verið lækkað við einum tíma í samsvarandi flokkum. Uppskotið er at hava sama tímatal í øllum lærugreinapørtunum í miðdeild og eisini í hinum deildunum, men hetta kann sjálvsagt broytast. Mælt verður til ikki at hækka dagliga undirvísingartímatalið, sum er rættiliga høgt frammanundan, eisini samanborið við hini Norðurlondini.

## 20.6 Tilmæli XVII. Tíma- og lærugreinabýtið í hádeild, 7.-9. flokkur

| **Lærugreinar** | **Tímar 7. fl.** | **Tímar 8. fl.** | **Tímar 9. fl.** | **Broyting Tímar** | í % | í % | í % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Mállærugreinar (føroyskt, danskt og enskt)** | **10** | **10** | **10** | - 9 | 31,2 | 31,2 | 31,2 |
| **Náttúruvísindi (støddfrøði, landalæra, lívfrøði og alis/ evnafrøði)** | **10** | **10** | **10** | + 2 | 31,2 | 31,2 | 31,2 |
| **Mentan og samfelag (søga, samtíð, kristni og samfelagsfrøði)** | **6** | **6** | **6** | **+ 1** | 18,8 | 18,8 | 18,8 |
| Likamlig og skapandi læring (ítróttur, vallærugreinir, handaverk, list og týskt) | 6 | 6 | 6 | - 5 | 18,8 | 18,8 | 18,8 |
| **Tilsamans** | **32** | **32** | **32** | - 11 | 100 | 100 | 100 |

Í uppskotinum um broytt tíma- og lærugreinabýti í hádeild er tímatalið í mállærugreinum lækkað við 9 tímum, í náttúruvísindi er tímatalið hækkað við tveimum tímum, mentan og samfelag er hækkað við 1 tíma og likamlig og skapandi læra er lækkað við 5 tímum. Viðvíkjandi seinasta bólkinum, likamlig og skapandi læra, so kann tað vera misvísandi at siga, at tímatalið er lækkað við 5 tímum, tí at kravda tímatalið í verandi skipan er 9 tímar, 2 tímar í ítrótti í hvørjum flokki og 3 tímar í handaverk og list í 7. flokki, so

um bara var hugt eftir hesum lærugreinum, so var talan um eina hækking við 9 tímum. Veruleikin í skúlunum er tó ein annar, tí at næmingarnir í 8. og 9. flokki hava eisini vallærugreinir, sum tó ikki eru kravdar, men flestu næmingar velja alis-/evnafrøði og týskt, sum hava tilsamans 7 tímar í hvørjum flokkinum, 3 tímar í alis-/evnafrøði og 4 tímar í týskum, so í veruleikanum er tímatalið í hesum bólki 23 (9 +14). Næmingar, ið ikki velja báðar hesar lærugreinir, velja ofta aðrar vallærugreinir, so tímatalið, sum verður játtað skúlunum til undirvísingina í 8. og 9. flokki, er 37 tímar um vikuna.

Í uppskotinum verður mælt til, at alis- og evnafrøði verður kravd lærugrein í 8. og 9. flokki, og at týskt framvegis er vallærugrein, men ikki við 4 tímum um vikuna. Her kunnu sjálvsagt tillagingar gerast eins og víst er á í tíma- og lærugreinabýtunum fyri grund- og miðdeild. Tað er serliga í hádeild, at tímatalið er høgt, og har fráboðanir eru um skúlamøði, skúladagarnir eru ov langir, og ofta er ov nógv av tí sama. Mælt verður tí til, at skúladagurin verður styttur til 32 tímar um vikuna. Hetta er ein tími minni í 7. flokki og 5 tímar færri í 8. og 9. flokki, tá ið vallærugreinirnar verða taldar við.

# 21. Fíggjarligar samanberingar

Niðan fyri eru fíggjarligar samanberingar í Norðurlondum, um hvat skúlaverkið kostar, serliga fólka- og miðnámsskúlar. Føroysku tølini eru frá Hagstovuni, og hini norðurlendsku tølini eru frá OECD. Umrokningar eru gjørdar fyri at fáa føroysku hagtølini at samsvara við yvirlitið hjá OECD.

## 21.1. Kostnaður, føroyska skúlaverkið

Hagstovan hevur skrásetingar, sum vísa kostnaðin í skúlaverkinum, har eisini sæst, hvør parturin er hjá ávikavist landi og kommunum, og at land og kommunur rinda allan kostnaðin, meðan ríkisfyrisitingin og sosialir trygdargrunnar ikki eru partar av at fíggja føroyska skúlaverkið.

Greiningin hjá Hagstovuni er grundað á Eurostat system of accounts, sum ikki heilt tekur hædd fyri skipanini í Norðurlondum við „upper" og „lower secondary school" (ESA, 2010, s. 72), men brúkar hesa bólkingina, sí talva 34:

**Talva 34. Heiti á útbúgvingum á føroyskum og enskum**

| Føroyskt | Enskt |
|---|---|
| 9 Útbúgving | 9 Education |
| 9.1 Forskúli og barnaskúli | 9.1 Pre-primary and primary education |
| 9.2 Framhaldsskúli og miðnám | 9.2 Secondary education |
| 9.3 Miðallong framhaldsútbúgving | 9.3 Post-secondary non-tertiary education |
| 9.4 Fróðskaparsetur og hægri útbúgving | 9.4 Tertiary education |
| 9.5 Útbúgving, ikki flokkað eftir stigi | 9.5 Education not definable by level |
| 9.6 Stuðulstænastur til útbúgving | 9.6 Subsidiary services to education |
| 9.7 Gransking og menning innan útbúgving | 9.7 research and Development Education |
| 9.8 Útbúgving i.a.n. | 9.8 Education n.e.c. |

Markið millum barnaskúla, framhaldsdeild og miðnám er ikki heilt greitt, tí í summum skúlum verður 7. flokkur roknaður í barnaskúlan, og í

øðrum skúlum í hádeild. Harumframt verður hádeild/framhaldsdeild í altjóða flokkingini roknað saman við miðnámi. Fyri at samanbera við altjóða tøl hava vit í hesum yvirliti valt at leggja øll tølini fyri barnaskúla, framhaldsdeild og miðnám saman, og samanbera tey við samsvarandi tøl í Norðurlondum.

Í hagtølunum hjá Hagstovuni, talva 35, sæst, at kostnaðurin er broytiligur ár frá ári. Hetta hevur t.d. samband við skúlabygging, og stórar skúlabyggingar kunnu tí hava stóra ávirkan á eindarkostnaðin, serstakliga í einum so lítlum samfelagi sum tí føroyska. Valt verður tí at nýta eitt miðaltal fyri árini 2018-2021, tá ið eindarkostnaðurin fyri hvønn næming verður roknaður.
.

**Talva 35. Eindarkostnaður í fólka- og miðnámsskúlum**

| Forskúlar, fólkaskúli og miðnám | | |
|---|---|---|
| Ár | íalt (mió. kr.) | næmingatøl |
| 2018 | 1.240 | 9.635 |
| 2019 | 1.141 | 9.600 |
| 2020 | 1.221 | 9.706 |
| 2021 | 1.019 | 9.784 |
| **íalt** | **4.621** | **38.725** |
| **Miðaltal hvørt ár** | **1.155** | **9.681** |
| **Kostnaður fyri hvønn næming um árið í kr.** | **119.329 kr.** | |

OECD gevur út eina bókarøð, Education at a glance, og fyri 2021 er ein kapittul um, hvussu nógv fíggjarlig orka verður nýtt til hvønn næming, og her sæst, at vit brúka lutfalsliga nógv til hvønn næming. Vit liggja á hædd við Noreg, Ísland og Svøríki og eitt sindur hægri enn Danmark og Finnland, sí talvu 36.

**Talva 36. Samanbering, næmingakostnaður í Norðurlondum**

| Miðal fyri forskúlar, fólkaskúlan og miðnám | |
|---|---|
| Noreg | 121.169 |
| Føroyar | 119.329 |
| Ísland | 112.584 |
| Svøríki | 100.809 |

| | |
|---|---|
| Danmark | 89.289 |
| Finnland | 85.007 |
| EU-22 lond | 80.193 |

Úr ”Education at a Glance 2021”. Tølini frá hinum Norðurlondum eru frá 2018, meðan føroysku tølini eru miðaltøl fyri árini 2018-2021.

Í mun til BTÚ brúka Føroyar miðalnógv til útbúgving, sum sæst í talvu 37. Vit liggja ájavnt við Svøríki.

**Talva 37. BTÚ í mun til útbúgving**

| **Partur av BTÚ, sum verður brúkt til útbúgving** | |
|---|---|
| **Land** | **%-**partur (miðal er 6,29%) |
| Finnland | 5,71% |
| Svøríki | 6,67% |
| Ísland | 7,70% |
| Noreg | 4,96% |
| Danmark | 6,04% |
| Føroyar | 6,64% |

Tølini frá Hagstovuni kunnu eisini brúkast til at hyggja eftir, hvussu býtið av almennu útreiðslunum til útbúgving er í mun til útbúgvingarsløg. Her vísir tað seg, at tað er rættiliga ymiskt, hvat ymsu Norðurlondini leggja dent á. Lutfallið í Føroyum líkist nógv tí í Danmark, men stóri munurin sæst serliga í bólkinum, Fróðskaparsetur og hægri útbúgving, har Føroyar brúka munandi minni enn hini Norðurlondini, sí talvu 38. Í talvu 39 er ein útgreinað lýsing.

**Talva 38. Almenna nýtslan, ið verður nýtt til útbúgving**



**Talva 39. Almenna nýtslan til útbúgving, greinað eftir útbúgvingarstigi**

| 2021 | Forskúli og barnaskuli | Framhaldsskúli og miðnám | Miðallong framhalds-útbúgving | Fróðskaparsetur og hægri útbúgving | Útbúgving, ikki flokkað eftir stigi | Stuðulstænastur til útbúgving | Gransking og menning innan útbúgving | Útbúgving i.a.n. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Danmark | 46% | 24% | 0% | 24% | 2% | 1% | 1% | 2% |
| Finnland | 22% | 43% | 0% | 29% | 4% | 0% | 0% | 1% |
| Ísland | 45% | 29% | 0% | 20% | 1% | 3% | 0% | 2% |
| Noreg | 44% | 20% | 0% | 22% | 8% | 4% | 1% | 2% |
| Svøríki | 62% | 15% | 0% | 17% | 3% | 0% | 0% | 2% |
| Føroyar | 41% | 25% | 4% | 11% | 4% | 2% | 0% | 12% |

Talva 39 vísir %-partin av almennu útreiðslunum til útbúgving, greinað eftir útbúgvingarstigi. Tað, sum kanska serliga er vert at leggja til merkis, er, at Føroyar hava ein rættiliga stóran bólk, sum inniheldur meira ólýstar útbúgvingar, nevndur Útbúgving i.a.n. Í henda bólk verður nógv ymist bólkað, sí t.d. https://unstats.un.org/unsd/classifications/Econ/Detail/EN/27/8549

Søguliga gongdin vísir, at útbúgvingarskipanin sum heild hevur fingið millum 7-8% av BTÚ, og grafurin niðanfyri vísir, at beint eftir Pisahvøkkin í 2006 blivu gjørd átøk, serliga í fólkaskúlanum, men tey fjaraðu rættiliga skjótt burtur aftur, sí talvu 40.

**Talva 40. Partur av BTÚ, sum Føroyar nýta til skúlaverkið**




## 21.2. Raðfesting av almennu játtanina til skúlaverkið

Av Norðurlondum brúka Noreg, Finnland og Danmark minni til útbúgvingarverkið enn vit, tá ið samanborið verður við %-part av BTÚ. Hetta er áhugavert, tí eitt lítið samfelag kann væntast at hava lutfalsliga dýrari skipan enn eitt størri samfelag, soleiðis sum vit síggja í Íslandi.

Sambært hagtølunum líkjast vit ikki rættiliga hinum Norðurlondunum. Bæði Noreg og Finnland liggja lægri enn vit, tá ið talan er um %-part av BTÚ til fólkaskúlan og miðnám, men hóast hetta, so eru Føroyar lægst, tá hugt verður eftir samlaðu útreiðslunum til tey siðbundnu útbúgvingarstigini. Í staðin verður ein stórur partur brúktur til útbúgvingar, sum ikki eru lýstar serliga væl.

## 21.3. Tilmæli XVIII. BTÚ og hagtøl

Mælt verður til:

at tryggja, at hægri prosentpartur av BTÚ verður brúktur sum játtanargrundarlag til føroyska skúlaverkið, herímillum fólkaskúlan.

at hagtøl verða fingin til vega, so vit kunnu samanbera okkara játtanarskipan við hini Norðurlondini og lond, sum eru við í OECD samanberingum.

# Keldur


Absalonsen, Olav(2016). *Hvussu nóvir næmingar skulu vera í einum flokki?* Grein í Miðnámsrit, https://www.glasir.fo/greinar/hvussu-nogvir-naemingar-skuulu-vera-i-einum-flokki/

Acta Didactica Norden, Stavelie, Hanne (2021).Vol.15, Nr.2, Art.6. *A-skole eller B. skole? Målstyring og lærerprofesjonalitet i Osloskolen*, torileg+stavelie. final - A og B - skúlar í Oslo.pdf

Astra (2023). *Masseeksperiment. Årets eksperiment 2023*. https://masseeksperiment.dk/

Biskupstø, Olga, Kák Katrin a, Mýri, Martha (2015) *Happing í fólkaskúlanum - ein spurnakanning.www.BUMR.fo.*

Bowen, Daniel H. Ph.D. and Brian Kisida, Ph.D. *Investigating Causal Effects of Arts Education.*

Experiences: Experimental Evidence from Houston's Arts Access Initiative. Feb 2019.

Brodal, Per og Lunde, Charlotte. *Hjerneforsker og psykiater mener, at skolen har feilet. „Lek og læring i et nerveperspektiv.* " https://edition.pagesuite.com/popovers/dynamic_article_popover.aspx?artguid=378197cd-1ced-4664-8cee-ad7d134d0ec2&fbclid=IwAR0zvzwCGvOGDtaKKemxdBBeD9H7EARIHp-wqqL0tNjtiHx23gXFaPsm8_c

BUTM (2022) *KL´s Børn og Unge Topmøde 2022. Kvalitet for børn med særlige behov*, temamoede-5-kvalitet-for-boern-med-saerlige-behov.pdf.

BUTM (2022) *KL´s Børn og Unge Topmøde 2022. Velfærdsaftale på skoleområdet*, temamoede-10-runde-2 - Esbjerg og Holbæk.pdf

Danmark er ét ud af blot fire lande i OECD, der ikke har krav om løbende kompetenceudvikling af lærere, viser den internationale undersøgelse Education at a Glance, *Danmark skiller sig ud: I de fleste lande er lærerefteruddannelse et krav (folkeskolen.dk)*

Egelund, Niels et.al. (2006). *Pisa Føroyar 2006- Førleikin hjá næmingum í 9. Flokki í Føroyum á vári 2006*, www.nam.fo .

EMU (2022). *Hvad lærere og ressourcepersoner bør være opmærksomme på i forbindelse med tilrettelæggelse, gennemførelse og evaluering af en undervisning med anvendelse af co-teaching*. https://emu.dk/grundskole/corona-gode-raad-til-undervisning/co-teaching

ESA (2014). European Commission, Eurostat, *European system of accounts : ESA 2010*, Publications Office, https://data.europa.eu/doi/10.2785/16644

European Education and Culture Executive Agency, 2021. *The Organisation of School Time in Europe- Primar and General Secondary Education 2021/22*.
Fibæk, Per (2018). *„Læringsmålstyring er døende“*, https://www.folkeskolen.dk/arbejdsliv-dannelse- faelles-mal/professor-per-fibaek-laeringsmalstyring-er-doende/782254 .
Filges, T., Sonne-Schmidt, C. S., & Nielsen, B. C. V. (2018). *Small class sizes for improving student achievement in primary and secondary schools: a systematic review* (Campell Systematic Review, Issue. T. C. Collaboration.
Fólkaskúlaráðið (2012). *Førleikamenning, tørvur og skipan*, www.BUMR.fo .
Fólkaskúlaráðið (2021). *Tilmæli um tíma- og lærugreinabýtið*, www.BUMR.fo .
Folkeskolen (2023). *Mange skoler bruger ekstra frihedsgrader til at fjerne store dele af den under- støttende undervisning*, https://www.folkeskolen.dk/folkeskolereform-skolepolitik-christiansborg-understottende-undervisning/mange-skoler-bruger-ekstra-frihedsgrader-til-at-fjerne-store-dele-af-den-understottende-undervisning/4701856?SNSubscribed=true&mtm_campaign=-Lektier+skal+fylde+p%C3%A5+ny+l%C3%A6reruddannelse&mtm_source=folkeskolen-nyhedsbrev.
Folkeskolen(2022). *Danmark skiller sig ud: I de fleste lande er lærerefteruddannelse et krav*.
Fredriksson, P., Öckert, B., & Oosterbeek, H. (2012). Long-Term Effects of Class Size *. *The Quarterly Journal of Economics*, *128*(1), 249-285. https://doi.org/10.1093/qje/qjs048
Føroya landsstýri (2019). *Samgonguskjal millum Sambandsflokkin, Fólkaflokkin og Miðflokkin*, www.lms.fo.
Føroya landsstýri (2022). *Saman eru vit sterk. Samgonguskjal millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn,* www.lms.fo
Garandeau, C. F., Yanagida, T., Vermande, M. M., Strohmeier, D., & Salmivalli, C. (2019). Classroom Size and the Prevalence of Bullying and Victimization: Testing Three Explanations for the Negative Association. *Frontiers in Psychology*, *10*. https://doi.org/ARTN 2125 10.3389/fpsyg.2019.02125
Harryson, H. (2020). *Innlit - eitt stórt áratíggju eftir, at fyrstu næmingarnir vórðu innskrivaðir á Skúlan við Løgmannabreyt*. https://pure.fo/en/publications/innlit-eitt-st%C3%B3rt-%C3%A1rat%C3%ADggju-eftir-at-fyrstu-n%C3%A6mingarnir-v%C3%B3r%C3%B0u-inn
Hattie, J. (2012). *Visible learning for teachers*. Routledge, Taylor & Francis Group.
Hattie, J. A. C. (2009). *Visible Learning. A synthesis of over 800 meta-analyses relating to achievement* [Kindle]. Routledge.
Højsted, Erla, Bjarnason, Gunnar og Eidesgaard, Flóvin (2010). *Pisa Føroyar. Førleikin hjá føroyskum 9. Floksnæmingum*, www.nam.fo.
Kák, K. a., Biskopstø, O., & Olsen, E. (2019). *Happing í fólkaskúlanum - ein spurnakanning. Frágreiðing og tilmæli*. https://pure.fo/en/publications/happing-%C3%AD-f%C3%B3lkask%C3%BAlanum-ein-spurnakanning-fr%C3%A1grei%C3%B0ing-og-tilm%C3%A6li

Konstantopoulos, S., & Chung, V. (2009). What Are the Long-Term Effects of Small Classes on the Achievement Gap? Evidence from the Lasting Benefits Study. *American Journal of Education*, *116*(1), 125-154. https://doi.org/Doi 10.1086/605103

Louise Klinge (2023). *Skærm og børnene. De er overalt i klasselokalet. De bærbare computere, mobiltelefonerne, Ipads og smartboardet.. Hvor meget fylder skærme i børnenes skoledag? Og er det et problem?* https://www.dr.dk/lyd/special-radio/genstart/genstart-2023-01-01-05-00-19?fbclid=IwAR2HjriWlmCRaIE1IVgnLeAl3OTZdVYecpCv5gmbvO_D4RoirCob5HqWtto

Løgtingslóg nr. 125 um fólkaskúlan frá 20. juni 1997, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022.

Meld. St.28 (2015-2016). *Fag – Forbypning - Forståelse. Det kongelige kunnskapsdepartement*, Fag Fordypning Forståelse - En fornyelse af kunskabsløftet.pdf

Mentamálaráðið (2013). Pisa 2012 - Føroyar. Førleikin hjá føroyskum 9. floksnæmingum, www.nam.fo.

Mentamálaráðið (2014). *Tilmæli um sernámsfrøðiliga økið innan fólkaskúaløkið*, www.BUMR.fo .

Mentamálaráðið (2014). *Tilmæli um skúlabygnað og læriumstøður*, www.BUMR.fo .

Mentamálaráðið 2018, *Frágreiðing til orðaskiftið um fólkaskúlan*, www.BUMR.fo.

Nám (2016 og 2018). *Pisafrágreiðingar*, www.nam.fo .

Nandrup, A. B. (2016). Do class size effects differ across grades? *Education Economics*, *24*(1), 83-95. https://doi.org/10.1080/09645292.2015.1099616

Nielsen, Lise Tinglev (2021). *Folkeskolen har brug for, at vi tør tale om de svære ting*, https://www.altinget.dk/uddannelse/artikel/eva-folkeskolen-har-brug-for-at-vi-toer-tale-om-de-svaere-ting .

NOU (2014). *Elevernes læring i fremtidens skole. Et kunnskapsgrunnlag*, Elevenes læring i fremtidens skole.pdf.

NOU (2015). *Fremtidens skole. Fornyelse av fag og kompetanser,* Fremtidens skole Fornyelse av fag og kompetanser.pdf.

OECD (2021), *Education at a Glance 2021: OECD Indicators*, OECD Publishing, Paris, https://doi.org/10.1787/b35a14e5-en.

Próvstovan (2016, 2019,2020, 2021 og 2022). *Frágreiðing um landsroyndir*, www.provstovan.fo

Rasmussen, Sissal M, Didriksen Lydia, Kjølbro Turið og Ziskason Marjun (2019). *Átøk at fremja lesihugin*-Føroyar lesa, www.BUMR.fo.

Road Map for Arts Education the World Conference on Arts Education: *Building Creative*
*Capacities for the 21st Century* Lisbon, 6-9 March 2006

UiO. *Dybdelæring er en forutsetning for fremtidens skole*, Presentation Sten Runar Ludvigsen.pdf.

UMMR (2021). *Fremmandamál í føroyska skúlaverkinum*, www.bumr.fo.

Undirvísingarstýrið (2020). *Frágreiðing um umskipan av tíma- og lærugreinabýtinum*, www.uvs.fo
Vimeo (2022) *KL´s Børn og Unge topmøde 2022. Børnenes skole Holbæk og Fremtidens skole Esbjerg*, KL's Børn og Unge Topmøde 2022 (vimeo.com)
Vive og forfatterne Slottved, Mette, Kjær, Søren Foged og Nøhr, Katrine (2019) *Læreruddannelse i et internationalt perspektiv. En litteraturkortlægning,* Læreruddannelse i et internationalt perspektiv.pdf
Word, E., Johnston, J., Bain, H. P., Fulton, B. D., Zaharias, J. B., Schilles, C. M., Lintz, M. N., John, F., & Breda, C. (1990). *The state of Tennessee's student/teacher achievement ratio (STAR) project*.
YouTube**.** *Seks co-teaching tilgange*, https://www.youtube.com/watch?v=SgZ4Dwr6EDM

# Tilmæli – Kostnaður og íverksetan

| | Evni | 2023-24 | 2024/25 | 2025-26 | 2026-27 |
|---|---|---|---|---|---|
| **I** | Kt-høvuðsevni á lærara-døgunum í nov. 2023 | 100.000 | | | |
| **I** | Kt-skeið | 600.000 | 600.000 | 600.000 | |
| **II** | Floksstødd 20 næmingar | | 4 mió.kr. | 4 mió.kr. | 4 mió.kr. |
| **III** | Eftirútb. í evnis-, verkstaðar- og verkætlanararbeiði | | 100.000 | 100.000 | 200.000 |
| **V** | Eftirútbúgving, nevnd og skipan | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 |
| **V** | Drúgvari eftirútbúgving | | 3.5 mió.kr. | 3.5 mió.kr. | 3.5 mió.kr. |
| **VI** | Skeið innan lærugreinaøki í handaverki og list | 100.000 | 100.000 | 200.000 | 200.000 |
| **VII** | Námsætlanararbeiði | 1 mió.kr. | 1 mió.kr. | 1 mió.kr. | 1 mió.kr. |
| **VIII** | Tvílæraraskipan | | 2 mió.kr. | 2 mió.kr. | 2 mió.kr. |
| **VIII** | Samlæring, skeið og ráðgeving | 50. 000 | 200.000 | 200.000 | 200.000 |
| **IX** | Eftirútbúgving innan flokslæraraarbeiði | | 750.000 | | |
| **IX** | Tíð til flokslæraraarbeiðið | | 1.7 mió.kr. | 1.2 mió.kr. | 0.6 mió.kr |
| **X** | Lækka kravda undirvísingar-tímatalið | | - 4 mió.kr. | - 4 mió.kr. | - 8 mió.kr. |
| | Kostnaður 2023/24 - 2032/33 | 1.9 mió.kr. | 10 mió.kr. | 8.85 mió.kr. | 3.75 mió.kr. |
| **IV** | Raðfesting innan eftirútbúgving og drúgvari skeið: Skúlabókavarðaútbúgving, Kt- varðaútbúgving, lesivegleiðaraútbúgving, samstarvandi læring, serlæraraútbúgving, flokslæraraútbúgving, orðblindalæraraútbúgving, leiðsluútbúgving, skúlavegleiðaraútbúgving, náttúruvísindi (náttúruvegleiðari), støddfrøðivegleiðaraútbúgving, Akt- læraraútbúgving, eykaprógv í føroyskum | | | | |
| **XI** | Dagliga undirvísingartímatalið: 1.-3. fl.: 5 tímar, 4.-6. fl.: 6 tímar og 7.-9. fl.:7 tímar | | | | |
| **XII** | Skipa lærugreinarnar í 4 høvuðspartar: 1. mállærugreinar, 2. náttúruvísindi, 3. mentan og samfelag og 4. likamlig og skapandi læring | | | | |
| **XIII** | Undirvísingarpartar:<br>Grunddeild: 1.-3. fl., Miðdeild: 4.-6. fl. og Hádeild: 7.-9. fl. | | | | |
| **XIV** | Alis- og evnafrøði kravd lærugrein í 7.-9. fl. Partur av lærugreinaskipanini í 7.-9. fl.<br>Bólkastødd: 12 næmingar í sambandi við royndir | | | | |
| **XV** | Tíma- og lærugreinbýtið í prosentstigum í 1.-3. flokki | | | | |
| **XVI** | Tíma- og lærugreinabýtið í prosentstigum í 4.-6. fl. | | | | |
| **XVII** | Tíma- og lærugreinabýtið í prosentstigum í 7.-9. fl. | | | | |
| **XVIII** | Hægri prosentpartur av BTÚ verður nýttur sum játtanargrundarlag til skúlaverkið, herímillum fólkaskúlan.<br>Útvega hagtøl, so til ber at samanbera við hini Norðurlondini og lond, sum eru í OECD samanberingum | | | | |

| 2027-28 | 2028-29 | 2029-30 | 2030-31. | 2031-32 | 2032-33 | Ábyrgd |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | Nám |
| | | | | | | Nám/UVS |
| 4 mió.kr. | 4 mió.kr. | 4 mió.kr. | 4 mió.kr. | 4 mió.kr. | 4 mió.kr. | BÚMR/ UVS |
| 200.000 | | | | | | Nám |
| 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 | BÚMR |
| 3.5 mió.kr. | 3.5 mió.kr. | 3.5 mió.kr. | 3.5 mió.kr. | 3.5 mió.kr. | 3.5 mió.kr. | BÚMR/ NÁD/UVS |
| | | | | | | Nám |
| 1 mió.kr. | | | | | | Nám/ BÚMR |
| 2 mió.kr. | 2 mió.kr. | 2 mió.kr. | | | | BÚMR/ UVS |
| 200.000 | 200.000 | | | | | Nám/NÁD/BÚMR/ UVS |
| 750.000 | | | | | | BÚMR/ NÁD |
| | | | | | | BÚMR/ UVS |
| . | | | | | | BÚMR |
| 11.7 mió.kr | 9.75 mió.kr. | 9.55 mió.kr. | 7.55 mió.kr. | 7.55 mió.kr. | 7.55 mió.kr. | 78.2/10=7.8 mió.kr. |
| | | | | | | BÚMR |
| | | | | | | BÚMR og skúlaleiðsla |
| | | | | | | BÚMR/ UVS, skúlaleiðsla |
| | | | | | | BÚMR |
| | | | | | | BÚMR/ UVS |
| | | | | | | BÚMR |
| | | | | | | BÚMR |
| | | | | | | BÚMR |
| | | | | | | Løgtingið/ Fíggjar-nevndin/ stovnar |

**FØROYAPRENT** | SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705